BUMBUATSÓKNIN

móti løgtingshúsinum í 1945

Bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í 1945
Hendingin, kanningin og samanhangurin

© 2022 Hans Andrias Sølvará og Fróðskapur
Permumynd: Løgtingshúsið 18. september 1945
– tilgjørd mynd, við støði í veruligum myndum og
upplýsingum um hendingina
Bókin er sett við Baskerville 11,5/15
Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

ISBN: 978-99972-55-16-7

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Hans Andrias Sølvará

BUMBUATSÓKNIN

móti løgtingshúsinum í 1945

Hendingin, kanningin og samanhangurin

fróðskapur

Faroe University Press
Tórshavn 2022

INNIHALDSYVIRLIT

Fororð 7
Inngangur 9
Nakrar viðmerkingar um granskingaretikk 25
Politiska støðan í Føroyum frá 1940 til 1945 33
Ein bumba brestur við løgtingshúsið 49
Løgreglan kannar málið 59
Fráveruprógv 69
Kanningarnar hjá løgregluni 73
Frágreiðingar hjá Ziska brødrunum 77
Samanbering av frágreiðingum 87
Preben, Palli og okkurt ivamál 99
Ósamsvar í frágreiðingum 105
Bumban við løgtingið 113
Nakrir ósvaraðir spurningar 123
Petur Mohr Dam og bumbumaðurin 133
Bumbuatsóknin og Petur Mohr Dam 145
Bumbuspreingingin í politisku søgu Føroya 165
Niðurstøða og perspektiv 179
Føroyskur samandráttur 187
English summary 189
Myndayvirlit 191
Heimildir 193

FORORÐ

Hendan bók snýr seg um eina bumbuatsókn móti løgtingshúsinum í september 1945. Bókin er skrivað við støði í samtíðarkeldum, sum eru á Tjóðskjalasavninum í Havn. Eg havi eisini fingið upplýsingar frá fólki, sum vita nakað frá øðrum ella lógu inni við tilfari um hendingina. Hesi eiga tøkk fyri hjálp og beinasemi.

Tað hevur ikki verið lætt at skriva hesa bókina. Bumbumálið er óviðgjørt, viðbrekið, óloyst, knýtt at fólkum, sum vóru undir illgruna, og seinni umgirt av ivasomum politiskum tulkingum. Ofta eri eg í arbeiðinum við bókini komin tætt – ofta tættari enn eg persónliga havi havt hug til – at ávísum fólkum, men eg havi kent tað soleiðis, at evnið og tilfarið hevur tikið hesi valini fyri meg. Tað hevur í veruleikanum illa borið til at skriva hesa bókina, uttan at koma tætt at fólkum, sum (fyri tað mesta) av órøttum vóru undir illgruna fyri at hava verið við til at fremja bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum í september 1945. Illgrunar ella bara onkur ábending í tilfarinum, sum bara kann seta onkran í eitt keðiligt ljós, havi eg ikki mett kundu standa óviðgjørdir, men eg havi hildið tað verið neyðugt at kanna tílíkar illgrunar/ábendingar móti fólki

nærri. Í veruleikanum hevði eg havt tað betri, um onkur annar hevði havt átikið sær at kannað og skrivað um hetta viðbrekna evnið, men soleiðis hevur tað ikki verið. Eingin hevur kannað hetta málið, men fleiri hava gitt uttan at kanna nakað, og tað hevur í veruleikanum einans økt um tørvin á at kanna hetta málið nærri.

Tað hevur verið mítt val at kanna hetta málið, og eg vóni, at eg havi funnið eina hóskandi javnvág millum søgufakligu viðgerðina av keldunum og persónlig atlit móti teimum fólkum, sum verða umrødd í teimum.

Takk til Bergur P. Dam fyri at hava sagt mær frá tí, sum hann hevur fingið fortalt frá pápa sínum, Peturi Mohr Dam, sum var formaður Javnaðarfloksins og løgtingsmaður í 1945.

Eisini ein tøkk til Rigmor Dam fyri samskifti um hesa hendingina.

Bjarni Wilhelm skal hava takk fyri, at hann hevur sagt mær frá tí, sum hann hevur hoyrt frá pápa sínum, Thomas Wilhelm, sum var løgreglumaður í Havn í 1945.

Takk til Marius T. Rein fyri upplýsingar um tinghúsið og flokkar í tinghúsinum.

Takk til Høgna Djurhuus, sum hevur givið mær atgongd til óprentaðu endurminningarnar hjá abba sínum Kristiani Djurhuus, sum var kanningarleiðari í 1945.

Eisini vil eg at takka fleiri øðrum fólkum, m.a. fleiri, sum ikki vilja vera nevnd, fyri at hava hjálpt og givið mær upplýsingar í sambandi við hetta málið.

Takk til Fróðskap fyri at hava átikið sær at geva hesa bókina út.

Henda bók kundi ikki verið skrivað uttan hjálp frá hesum fólkum, men bert eg kann lastast fyri innihaldið.

Tórshavn
18. september 2022

Hans Andrias Sølvará

INNGANGUR

Hendan bókin snýr seg um eina bumbuatsókn móti løgtingshúsinum 18. september 1945, eina atsókn, sum ongantíð er uppklárað. Hóast hetta bumbumálið javnan hevur fingið umrøðu millum fólk, og nógv er gitt um tað, so er lítið skrivað um hetta mál. Nógv er skrivað um krígsárini og fólkaatkvøðuna í 1946, men ongantíð er bumbuspreingingin við løgtingshúsið viðgjørd í hesum samanhangi (m.a. West 1972, Harder 1979, Skála 1992, Sølvará 2002, Andreasen 2006, Wang 2010, Mohr 2012, Thorsteinsson 2014). Fyrstu ferð eg havi sað hesa bumbuatsóknina alment umrødda – uttanfyri bløðini í samtíðini – er í eini blaðgrein í myndablaðnum *Eygað* hjá Niels Juel Arge (1920-1995) í 1974 (*Eygað* Nr. 3, 1974) og síðani í eini sjónvarpssending í 1996 hjá Høgna Hoydal (1966-) um fólkaatkvøðuna í 1946 (*Fólkaatkvøðan,ið hvarv* 1996). Sjálvur havi eg fyrstu ferð umrøtt atsóknina í eini bók frá 2016 (Sølvará 2016, 142). Í óprentaðum tilfari havi eg sað hana umrødda í endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus (1895-1984), løgmanni, frá 1962-1966 (Djurhuus 1962-1966). Tað kann tykjast løgið, at so lutfalsliga lítið er granskað og skrivað um hesa hendingina í politisku søgu Føroya.

Hóast tað kanska ikki eru øll, sum ynskja ljós varpað á hesa bumbuatsóknina, so er tað neyvan bert kollektiv politisk burturskotran, sum er høvuðsorsøkin til, at hendan hendingin ikki hevur fingið søgufakliga viðgerð av eitt nú søgufrøðingum (sí t.d. Dalsgaard 2000, 2005, 2013, 2016 og 2017, har líknandi politiskar tulkingar av atsóknini verða settar fram). Tað tykist vera eftir eina sakliga grein hjá Eiriki Lindenskov í *Sosialinum* 22. mai 1999, sum byggir á greinina í myndablaðnum *Eygað* frá 1974, at ein øðrvísi politiskur áhuga er ímkomin fyri hendingini – ein áhuga, sum tykist vera kveiktur av mótstøðu móti fullveldissamráðingunum, ið stóðu fyri í 2000 (sí Dalsgaard 2000). Hendan bumbuatsóknin varð umrødd í bløðunum í september 1945, og hon er ofta umrødd í politiskum kjaki tey seinastu árini, eisini í bókmentum er hon umrødd. Tá atsóknin hevur fingið frið til at liva sítt egna lív, uttan søgufakliga viðgerð, so man ein høvuðsorsøkin mest sannlíkt vera, at hvørki høvundar ella søgugranskarar, leik ella lærd, hava havt atgongd til onnur skjøl enn tey, sum fólk flest hava havt atgongd til umvegis tey almennu føroysku tíðindabløðini. Tað hevur tí ikki verið so nógv at leggja afturat hjá søgugranskarum. Tá tað heldur ongantíð alment bleiv avdúkað, hvør ella hvørji stóðu aftanfyri bumbuspreingingina, so hava góðar umstøður verið fyri, at hendingin fekk sítt egna lív í politiskari skriving, har tulkingarnar hava havt ein ávísan politiskan lit og verið vendar móti ávísum lesaraskara í samtíð høvundans.

Í hesum seinni varðveittu frásagnum um hendingini, t.e. hvussu hendan viðkomandi hendingin seinni hevur verið borin fram, skilt og móttikin av lesarum – á fakmáli vanliga nevnt receptiónssøga – sum eru at finna í nýggjari føroyskum miðlum, hava politisku tulkingarnar aloftast nøkur serlig felagseyðkenni. Hóast nógv ymisk frávik eru í teimum ymisku frásagnunum, so eru nærum altíð tvey felagseyðkenni í teimum seinnu varðveittu frásagnunum. Í fyrra lagi verður tað ofta sagt, at víðgongd føroysk fullveldisfólk stóðu aftanfyri bumbuatsóknina, og í seinna lagi verður tað ofta upplýst, at bumbumaðurin ætlaði at raka Petur Mohr Dam (1898-1968), formann Javnaðarfloksins, sum hevði sitið í løgtinginum og arbeitt hetta kvøldið. Hinvegin, so er frásøgnin eisini varðveitt í eini heilt aðrari útgávu, har málið var loysingarrørslan. Í sjálvum sær kundi tað verið áhugavert at kanna allar hesar varðveittu søgurnar nærri, men talan er um frásagnir, sum ikki byggja á samtíðarkeldur, og onkuntíð eru orsøkirnar handan frásagnirnar heilt týðiliga politiskar og knýttar at ávísum politiskum sjónarhornum. Tað hevur tí neyvan almennan áhuga at kanna hesar reseptiónssøgurnar nærri. Tó so, í einstøkum førum tykjast tær seinnu varðveittu frásagnirnar kunna førast aftur til samtíðarkeldur, – um ikki altíð til eygnavitni – sum kunnu varðveita onkra upplýsing um bumbuatsóknina frá eygnavitnum.

Her er ikki ætlanin at kanna allar hesar seinni varðveittu frásagnir um bumbuatsóknina. Høvuðsendamálið í hesi bókini er at lýsa, kanna og greina hetta bumbumálið við støði í teimum varðveittu samtíðarskjølunum, sum hendingin hevur latið eftir seg í samtíðini, t.e. í 1945. Tó so, í tann mun tann søgan, sum fæst burturúr eini keldukritiskari viðgerð av teimum varðveittu samtíðarkeldunum, stríðir ímóti teimum seinni varðveittu frásagnunum, er tað eisini viðkomandi at viðmerkja og umrøða seinnu varðveittar frásagnir. Og er ósamsvar millum frágreiðingar, sum fáast burturúr samtíðarkeldunum, og seinni varðveittar frágreiðingar, so noyðast tær seinni varðveittu frásagnirnar í útgangsstøði at víkja fyri teimum fyrru frásagnunum, sum eru grundaðar á eina keldukritiska viðgerð av samtíðarkeldum, men tað skal sjálvandi altíð ein ítøkilig viðgerð og meting til.

Høvuðsendamálið er við øðrum orðum at lýsa málið við støði í samtíðarkeldunum, men tá hetta bumbumál seinni eisini er blivið partur av politiska kjakinum í samtíðini hjá ymiskum høvundum, verða niðurstøðurnar onkuntíð settar upp ímóti uppáhaldum í hesum politiska kjakinum, sum annars kann føra til mytuskapan.

Tá henda bók er skrivað, so er orsøkin ikki, at eg haldi, at bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í september 1945 er ein rættiliga av-

gerandi hending í politisku søgu Føroya. Heldur tvørturímóti, so eri eg eftir at hava rannsakað øll skjølini og kannað samanhangin komin til ta niðurstøðu, at bumbuatsóknin í 1945 ikki er ein heilt avgerandi hending í politisku søgu Føroya. Tá eg kortini havi skrivað eina bók um hetta evnið, so eru m.a. hesar grundir til tað, 1) at eingin fyrr hevur kannað hetta mál við støði í samtíðarkeldum, 2) at javnan hevur verið gitt – mytologiserað – um hetta málið, og 3) so hava fólk eisini javnan borið fram tað sjónarmið, at hendingin er tagd burtur úr politisku søgu Føroya. Hóast eg ikki haldi, at hetta málið í sjálvum sær hevur avgerandi týdning, so er hetta hóast alt ein hending í Føroya søgu, sum ongantíð veruliga er vorðin kannað. Fyri at politisk-søguliga kjakið, sum byggir brúgv millum fortíð og nútíð, skal byggja á so neyvt grundarlag, sum til ber, og ikki á mytur, so er tað eisini umráðandi, at vit hava so neyva vitan, sum til ber um fortíðina. Harumframt er málið *í sjálvum sær* avgerandi, tí talan er um fyrstu bumbuatsóknina í politisku søgu Føroya. Ein sera umráðandi orsøk til, at hetta málið eigur at kannast gjølla er eisini, at *seinni* er bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í politiskum kjaki lýst sum ein atsókn móti Peturi Mohr Dam, t.e. ein morðroynd. Tí tykist tað hóast alt undranarvert, at eingin fyrr hevur kannað hesa bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum í 1945.

Tá eingin fyrr hevur kannað hetta málið, so eru eisini aðrar grundir til tað enn, at málið kanska ikki hevur verið mett serliga avgerandi fyri politisku søgu Føroya. Samtíðarskjølini, sum snúgva seg um málið, hava heldur ikki verið atkomulig fyri áhugaði og granskarar, men nú er støðan nakað øðrvísi. Sambært donskum ásetingum um varðveitslu av almennum skjalasavnstilfari um privat viðurskifti skulu tílík skjøl verða vard av eini atkomufreist uppá 75 ár (Arkivloven 28/09/2016, § 23). Hetta er m.a. galdandi fyri tilfar, sum snýr seg um revsimál. Tilfarið um hetta bumbumálið frá september 1945 hevur tí verið vart av lóg um varðveitslu av almennum skjølum og hevur tí ikki verið atkomulagt í 75 ár, t.e. til september 2020.

Løgreglan gjørdi sjálvandi sítt til at lýsa og fáa greiðu á bumbuatsóknini móti løgtingshúsinum, men skjølini hava ikki verið atkomulig hjá nøkrum fyrr enn í september 2020. Tað er tí ikki fyrr enn nú, at tað ber til at leggja nakað afturat hesum máli við støði í leysgivna tilfarinum hjá løgregluni. Í hesi bók verður skjalatilfar hjá m.a. løgtinginum, sum lýsir politisku málini í Føroyum í fyrru helvt av 1940-árunum, gagnnýtt til at lýsa politiskar stríðsspurningar í Føroyum í tíðarskeiðinum 1940 til 1945. Eisini verða politisku bløðini og tað, sum annars er skrivað um hetta tíðarskeiðið, brúkt til at lýsa tær politisku fyritreytirnar í Føroyum undan bumbuspreingingini. Eg havi eisini havt atgongd til skjøl frá 1945, har serliga sjónarmið hjá Fólkaflokkinum verða lýst (Dahl 1945), umframt endurminningarnar hjá Kristiani Djurhuus løgmanni, sum bert lutvíst eru útgivnar (Jacobsen 2021). Harumframt verður áðurnevnda samtíðarkeldutilfar frá september 1945 – sum til fyri nýliga hevur verið óatkomiligt og ikki áður troytt – hjá løgregluni, sum í september í 1945 gjølla kannaði og rannsakaði bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum (í bókmentalistanum *Bombeattentatet mod Lagtingshuset 18/9-1945* og *Bombeattentatet mod Tinghuset)*, saman við upplýsingum úr serliga teimum politisku føroysku bløðunum í samtíðini, brúkt til at greina og viðgera bumbuspreingingina móti løgtingshúsinum. Bulurin í bókini er ein viðgerð av kanningararbeiðinum og keldutilfarinum hjá løgregluni í sambandi við atsóknina í 1945, og í frásjónini móti endanum verður atsóknin sett inn í ein størri samanhang í samtíðini og eftirtíðini í politisku søgu Føroya.

Tilfarið hjá løgregluni frá 1945 er høvuðskeldutilfarið, sum hevur sínar styrkir og sínar avmarkingar. Tilfarið finst í tveimum arkivmappum á Tjóðskjalasavninum í Havn – í mappu, sum er skrásett undir Suðuroyar sýslu, og í eini mappu, sum er skrásett hjá fútanum. Í mappuni, sum er skrásett undir Suðuroyar sýslu, eru umleið 70 maskinskrivaðar síður av keldutilfari, tilsamans eini 30 skjøl, fyri tað mesta frágreiðingar hjá løgregluni, sum kannaði málið. Løgreglan avhoyrdi umleið 130 einstaklingar í døgunum aftaná bumbuspreingingina 18. september 1945. Veruliga talið av vitnum var í veruleikanum nógv


Suderø Sysels J. Nr. 434 1946

Bombeattentatet
mod
Løgtingshuset 18/9-1946

Politimesteren

Í savninum hjá Suðuroyar sýslumanni á Tjóðskjalasavninum í Havn eru nógv skjøl um bumbuspreingingina. Suðuroyar sýslumaður fekk av fútanum litið upp í hendur at leiða kanningararbeiðið í sambandi við atsóknina.

størri, tí 19 eru skrásett sum húski, har eitt fólk úttalar seg vegna øll húsfólkini, og nógv vitni vórðu harumframt avhoyrd av løgregluni fleiri ferðir. Hýruvognsførarirnir í Havn blivu eisini avhoyrdir, túrar skrásettir, og allar telefonsamrøður vórðu eisini skrásettar. Harumframt eru fleiri frágreiðingar frá teimum átta løgreglufólkunum, sum avhoyrdu vitnini, serfrøðingum innan spreinging, fútanum og frá Suðuroyar sýslumanni, sum stóð fyri kanningararbeiðinum.

Orsøkin til, at hetta tilfarið er skrásett undir Suðuroyar sýslu er, at Cai Andreas Vagn-Hansen (1911-1990), setti fútin, seinni fyrsti ríkisumboðsmaðurin í Føroyum – sambært avtalu við Carl Aage Hilbert (1899-1953) amtmann – heitti á Kristian Djurhuus, Suðuroyar sýslumann, um at leiða kanningarnar av hesum málinum. Orsøkin var sambært endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus, at tað varð ikki mett, at setti fútin var nóg royndur til at taka sær av hesum málinum (Djurhuus 1962-1966, 866). Sýslumaðurin átók sær uppgávuna, og skjalatilfarið er tí eisini skrásett í savninum hjá honum. Kristian Djurhuus hevði sitið í løgtinginum sum fólkavalt umboð fyri Sambandsflokkin síðani 1932, og harumframt var hann løgtingsformaður frá 28. august 1945 til 24. november 1945. Í savninum hjá fútanum eru skjøl – fyri tað mesta originalarnir – eisini at finna. Savnið hjá fútanum um hetta bumbumál er nógv rúgvusmiklari enn tað hjá sýslumanninum, fleiri enn 200 síður av váttaðum maskinskrivaðum originalskjølum, hondskrivaðum kladdum umframt avritum av teimum váttaðu maskinskrivaðu originalunum. Harumframt eru nógv skjøl í savninum hjá fútanum, sum ikki eru í savninum hjá sýslumanninum, og tað eru eisini nýggjari frágreiðingar í savninum hjá fútanum, sum ikki eru í savninum hjá sýslumanninum. Orsøkin til hetta tykist vera, at setti fútin yvirtók ábyrgdina og leiðsluna av kanningararbeiðinum, eftir at Suðuroyar sýslumaður, helst longu 19. september 1945, lat málið frá sær og fór til Suðuroyar – uttan at hann hevði loyst løgreglumálið. Tað framgongur ikki heilt týðiliga – heldur meira óbeinleiðis – av teimum óprentaðu endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus, at hann legði frá sær og fór til Suðuroyar longu

fyrrapartin 19. september, men tað sæst av løgreglufrágreiðingunum, at seinnapartin 19. september tók fútin yvir og fór sjálvur at avhoyra vitni. Tí eru tey flestu skjølini og frágreiðingarnar, sum eru framleidd í sambandi við hetta málið, skrásett í tveimum ymiskum søvnum (t.e. hjá sýslumanni og fúta), sum ikki eru samlík, meðan fleiri av teimum seinnu skjølunum bert eru skrásett hjá fútanum. Tað er sostatt neyðugt hjá søgufrøðingum, sum vilja kanna hetta málið, at gjøgnumganga øll skjølini í báðum søvnunum.

Ein samanbering av yvirlitinum yvir tilfarið og skjølini vísir, at onkrar frágreiðingar mangla í báðum søvnum. Talan er um tvær frágreiðingar av skaðunum á løgtingshúsið og nakrar myndir, sum vórðu tiknar. Tað hevur ikki eydnast at finna hetta tilfar, men sambært lýsingini av innihaldinum er tað neyvan avgerandi fyri málið. Skaðar, sum bumban gjørdi á løgtingshúsið, eru lýstir í føroyskum bløðum, men myndir eru ikki í bløðunum. Tað hevur tíverri ikki eydnast mær at finna myndirnar, sum kundu verið áhugaverdar. Eitt eygnavitni hevur upplýst fyri mær, at myndirnar lógu fyri seg í eini skuffu í einum høli á gomlu løgreglustøðini í Bringsnagøtu í Havn í 1950-unum, men ein fyrispurningur á løgreglustøðini í Havn í februar í 2022 um myndirnar hevur ikki givið úrslit, hóast løgreglan hevur verið sera hjálpsom og bæði hevur stuðlað og hjálpt mær við at leita eftir myndunum. Í áðurnevndu grein í myndablaðnum *Eygað* frá 1974 (Eygað, Nr. 3. 1974) eru hinvegin nakrar fáar privatar myndir endurprentaðar og tær verða eisini endurprentaðar og viðmerktar seinni í hesi bókini.

Fólkatalið í Havn var í 1945 umleið 4390. Gangast má út frá, at flest øll fólk, sum vóru vitni til hendingina ella høvdu onkra serliga vitan um ella okkurt tilknýti til tað, sum hendi í miðbýnum í Havn fyri og eftir midnátt 18. september í 1945, skuldu avhoyrast. Fólk, sum høvdu sæð, hoyrt ella upplivað okkurt viðkomandi hesa náttina í Havn, sum kundi berast saman við tað, ið onnur høvdu sæð, hoyrt ella upplivað. Tilfarið er sostatt vælegnað til at gera eina mynd av tí, sum gekk fyri seg í miðbýnum fyri og eftir at bumban brast, t.e. hvar fólk vóru stødd og hvussu tey ferðaðust í tíðarskeiðinum. Hetta má metast at vera styrkin í tilfarinum hjá løgregluni. Tað vóru eisini fólk, sum vitni høvdu sæð (men ikki kendu) í miðbýnum hesa avgerandi náttina, sum tað ikki eydnaðist løgregluni at finna og koma í samband við. Tilfarið hjá løgregluni kann eisini brúkast til at fáa upplýsingar um, hvat ávís fólk mettu vera orsøkina til bumbuspreingingina og hvørji fólk hesi hildu stóðu aftanfyri illgerðina. Tílíkar metingar eru eisini at finna í tilfarinum. Her má keldukritiskt fyrivarni takast fyri, at eingin segði seg hava sæð nakran leggja eina bumbu við løgtingshúsið, og at útsagnir hjá fólki hesum viðvíkjandi illa kunnu metast sum vitnisfrágreiðingar, men heldur sum illgrunar ella git um, hvør ella hvørji hesi mettu kundu staðið aftanfyri illgerðina. Git, sum kunnu verða litað av politiskum sannføringum ella øðrum viðurskiftum. Seta vit tilfarið hjá løgregluni inn í ein samanhang, so hómast eisini eitt ávíst misálit millum tey, sum vórðu avhoyrd, og løgreglufólkini, sum avhoyrdu tey. Í øllum førum vóru nógv trek við at lata upplýsingar. Tað tykist greitt av tilfarinum, at uttanfyri frágreiðingarnar er ein onnur frásøgn, sum tey avhoyrdu ikki fortaldu fyri føroysku løgreglufólkunum. Hetta sæst m.a. av, at onkuntíð fóru løgreglufólkini til vitnir við spurningum um okkurt, sum vitnini sambært løgreglufólkunum skuldu havt fortalt fyri øðrum føroyingum, men sum vitnini mótvegis løgregluni kortini ikki vildu kennast við, at tey nakrantíð skuldu havt sagt. Keldutilfarið – t.e. frágreiðingarnar – sipar sostatt eisini til annan tekst, eina aðra óalmenna frásøgn, sum ikki er at finna í frágreiðingunum hjá løgregluni. Keldutilfarið er sum vera man best egnað til tað, sum tað eisini varð framleitt til av løgregluni – t.e. at eftirkanna fráveruprógv (t.e. alibi) hjá ymiskum fólkum.

Frágreiðingarnar eru niðurskrivaðar av løgreglufólkunum, lisnar upp fyri vitnunum, váttaðar av vitnunum og av løgreglufólkunum. Gangast má út frá, at tað, sum stendur í frágreiðingunum, er tað, ið vitnini vildu hava skuldi standa har. Tað merkir sjálvandi ikki, at vitnini hava sagt alt tað, sum tey vistu um bumbumálið, fyri løgreglufólkunum. Eg havi tó gingið út frá, at tað ber til at tulka frágreiðingarnar – í øllum førum tær elstu – rættiliga beint fram, uttan at taka hædd fyri, at eisini sjálv svarini kundu verið rættiliga gjøgnumhugsaði og sniðfundig. Tey

fyrstu vitnini hava ikki havt møguleika fyri at hugsa seg væl um og kjakast við onnur, áðrenn tey svaraðu, so tað ber til at ganga út frá, at tá vitnini onkuntíð geva undranarverd svar ella undranarverdar upplýsingar, sum *ikki* tæna teirra egnu søk, so er grundin mest sannlíkt tann, at hesi svar eru trúlig. Í tílíkum førum ber sjálvandi altíð til at finna sniðfundigar frágreiðingar uppá, at vitnini svaraðu sum tey gjørdu, men í meginregluni havi eg mett, at í hesum førum hava vitni hvørki havt tíð, møguleika ella umstøður til at finna uppá sniðfundig svar. Eg havi í meginregluni tulka keldurnar við støði í tí, sum vitnini *hava* svarað, og ikki við støði í tí, at vitni kundu havt verið so sniðfundig, at tey í útgangsstøði hava svarað fyri at *villleiða* løgregluna. Tað kunnu hinvegin vera nógvar aðrar grundir til, at svarini hjá vitnunum ikki altíð eru nøktandi/eftirfarandi, t.d. at vitni kundu verið millum tey seku, men har eru tað vanligar keldukritiskar metodur, ið er umráðandi. Í tílíkum førum havi eg eisini gingið út frá, at vitnini *verja* seg sjálvi, og valla seta seg sjálvi í eitt óheppið ljós.

Her skal havast í huga, at lokali løgreglumyndugleikin í sýslunum, sýslumaðurin, eins og løgreglufólkini, sum vórðu sett og lønt av kommununum til 1959 (Skálagarð 2000), vanliga vóru føroyingar, meðan fútin, ovasti løgreglumyndugleikin í Føroyum, var ein av teimum trimum hægstu donsku embætisfólkunum í oyggjunum. Tað fyrra hevur helst verið við til at skapa tætt samband millum borgaran og løgregluna, meðan tað seinna óivað hevur skapað økta – professionella – frástøðu millum borgaran og tann ovasta løgreglumyndugleikan. Tað sæst kanska aftur í tí, at hóast ein sýslumaður stóð fyri kanningini, so gjørdi fútin í fleiri førum sjálvur uppfylgjandi forhoyr. Tað vil siga, at vóru onkur ivamál í eini frágreiðing, so gjørdi fútin sjálvur nýtt forhoyr.

Hetta seinasta kann vera tekin um misálit millum fútan og løgregluna, men fjølbroyttari frágreiðing hómast í endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus, Suðuroyar sýslumanni. Hann skrivar, at „Da jeg herefter ikke fik den fornødne støtte af politikorpset, og jeg ikke alene mand følte mig istand til at rende byen rundt for at samle oplysninger, måtte jeg lade de på politistationen tilbageholdte, men ikke arresterede, personer gå. Jeg sagde til Henry Djurhuus og de menige betjente, at var jeg deres daglige chef, så ville jeg have indstillet dem til afsked. – Derefter opsøgte jeg amtmanden og sagde til ham, at jeg ikke ønskede at fortsætte arbejdet ved sagens efterforskning, da jeg faktisk blev modarbejdet af politibetjentene og særlig Henry Djurhuus.“ (Djurhuus 1962-1966, 867). Í øllum førum var tað ikki bert tann danski fútin, sum hevði misálit á lokalu føroysku løgregluna. Sýslumaðurin hevði sambært hesum ikki stórt álit á løgreglufólkunum, og tað er ikki vist, at tey lokalu løgreglufólkini gjørdust trúfastari móti sýslumanninum av tílíkum. Í skjalatilfarinum sæst, at tá sýslumaðurin hevði lagt frá sær, var tað ofta fútin sjálvur, sum fór til fólk og gjørdi forhoyr. Um orsøkin var, at fútin var samdur við sýslumanninum í meting hansara av løgreglufólkunum ella bert tann, at hann noyddist at gera okkurt sjónligt fyri at taka hædd fyri skuldsetingunum frá sýslumanninum, sæst ikki av hesum tilfarinum, men tað eydnaðist heldur ikki fútanum at fáa nakað avgerandi nýtt fram um málið. Tá sýslumaðurin skrivaði nærum 20 ár seinni ber heldur ikki til at síggja burtur frá, at hann møguliga broytti ella tillagaði frásøgn sína um bumbumálið, sum hann ikki megnaði at loysa, soleiðis at løgreglufólkini fingu ábyrgdina fyri at bumbumálið ikki varð loyst. Tað sæst hinvegin eisini í samtíðarkeldunum, at sýslumaðurin mótvegis fútanum hevði víst eina misnøgd við samstarvið við tey lokalu løgreglufólkini. Í brævi til Suðuroyar sýslumann 26. september 1945 skrivaði C. A. Vagn-Hansen, setti fútin, at „Betjentene er blevet lettere at arbejde sammen med, men de har dog ikke kunnet fremvise Resultater af større Betydning“. Tað tykist undirskilt, at sýslumaðurin frammanundan hevði kært seg um samstarvið við løgreglufólkini. Tær seinastu avhoyringarnar tykjast vera gjørdar 28. september, 10 dagar eftir bumbuatsóknina við tinghúsið. Tá sæst av keldutilfarinum hjá sýslumanni og fúta, at løgreglufólkini høvdu gjørt eitt stórt arbeiði við at avhoyra nógv fólk í Havn, og lítið bendir heldur á, at tey hava borið seg undan at seta teir røttu spurningarnar til vitnini.

Keldukritiskt mugu frásagnirnar hjá løgregluni sostatt tulkast í

trimum stigum. Einum ítøkiligum stigi, har tað við rímiliga stórum neyvleika er møguligt at endurskapa ferðamynstur hjá viðkomandi fólkum undan og eftir bumbuspreingingina, einum stigi, har viðkomandi fólk greiða frá egnum illgrunum um, hvør ella hvørji stóðu aftanfyri illgerðina, og einum stigi, har teksturin sipar til ein annan tekst – eina aðra frágreiðing – sum ikki er ein partur av tekstinum hjá løgregluni. Hetta triðja stigið er tað, sum sipar til tann størra kontekstin, og sum kann samanberast við og haldast upp ímóti øðrum upplýsingum, sum vit hava um hendan størra kontekstin.

Eitt sjónarhorn

Í Dimmalætting hevur Rolf Guttesen í eini viðmerking í 2010 orðað seg soleiðis í einum politiskum blaðkjaki um m.a. hesa hendingina. Eitt fakligt kjak um hesa hendingina hava vit ikki havt í Føroyum:

„Sjarrligir tjóðveldismenn hava fingið koyrilin. – So, skulu tjóðveldisfólk og aðrir nationalistar gremja seg um at fáa koyrilin? Gremja seg um, at orðini ikki eru rósandi, herðaklappandi, sjálvforherligandi? Teir, sum í 50-80 ár hava gingið fremstir í grovum málbrúki, útspilling og eisini regulerari terrorismu? Ja, terrorismu av grovasta slag hava teir, ekstremu nationalistarnir, fleiri ferðir brúkt. … . Eg vil minna á, at ekstremir nationalistar hava gjørt nøkur ting, sum tíverri næstan eru tagd burtur. So eg vil siga, ja, nakrir ekstremir nationalistar hava verið terroristar. – Nøkur dømir um nationalistiska terrorismu – Í 1945 sprongdist ein bumba undir Tinghúsinum, sum var so kraftig, at húsið lyftist uppfrá, fór illa, allir rútar knústir, líka sum rútar í Bókahandlinum og Kommunuskúlanum og aðra staðni fóru í knús. Skúlin varð stongdur í fleiri dagar. Bumban var ætlað P.M. Dam, sum einsamallur hevði sitið og arbeitt í Tinghúsinum tað kvøldið.“ (Dimmalætting 27.01.2010).

Lesarin fær at vita, at „tjóðveldisfólk og aðrir nationalistar“, hava gingið á odda við grovari útspilling og „regulerari terrorismu“, „Ja, terrorismu av grovasta slag“, „sum tíverri næstan er[u] tagd burtur“, tey/teir hava lagt eina bumbu „undir“ løgtingshúsið, sum var so ógvuslig, at tað „fór illa“, og høvdu ætlað at raka Petur Mohr Dam, „sum einsamallur hevði sitið og arbeitt í Tinghúsinum hetta kvøldið“.

Tað ber til at seta nakrar spurningar til hendan og líknandi tekstir um hetta mál í føroyskum bløðum:

- Vóru tað ekstremir nationalistar, sum stóðu aftanfyri bumbuspreingingina við løgtingið?
- Vita vit yvirhøvur hvør ella hvørji stóðu aftanfyri bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum?
- Vita vit hvørjar grundirnar – motivini – vóru til, at bumbuatsóknin varð framd?
- Var nakar undir illgruna fyri at hava framt bumbuatsóknina?
- Varð nakar skuldsettur ella dømdur fyri bumbuatsóknina?
- Um ikki, hvussu kunnu vit so vita, at ekstremir nationalistar stóðu aftanfyri?
- Varð bumban ætlað Petur Mohr Dam?
- Hevði Petur Mohr Dam sitið einsamallur og arbeitt í løgtinginum hetta kvøldið?
- Vita vit hvar Petur Mohr Dam var, tá ið bumban brast við løgtingið?
- Var hetta terrorisma av grovasta slag?
- Hevur hendan bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum nærum verið tagd burtur?
- Um so er, hví hevur bumbuatsóknin verið tagd burtur?
- Hvønn týdning hevur hendan atsóknin havt fyri politisku søgu Føroya?
- Hvat kunnu samtíðarkeldurnar siga okkum um bumbuatsóknina móti løgtinginum?

Hetta eru nakrir av spurningunum, sum verða viðgjørdir í hesi bókini.

Her eru, sum vit skulu síggja, onkrar misskiljingar. Kanska er tað ikki er so løgið, tá eingin faklig viðgerð ella kjak hevur verið um hendingina, men tað er kanska heldur avgjørt at leggja føroyingar við ávísum sjónarmiðum undir at hava framt eina bumbuatsókn, sum eingin var/er skuldsettur fyri at hava framt. Svarið uppá tann eina spurningin omanfyri er sostatt noktandi, meðan hini svarini koma seinni í bókini.

Tað er sjálvandi møguligt, at høvundurin hevur grein í sínum máli, men hann leggur, sum tað er vanligt, tá ið henda atsókn verður umrødd, eingi skjøl fram, sum prógv fyri, at ávís fólk við ávísum politiskum sjónarmiðum høvdu ábyrgdina av atsóknini. Mær kunnugt hevur eingin lagt fram tílík prógv, og uttan tílík prógv eiga skuldsetingar um, at ávís fólk stóðu aftanfyri, ikki at setast fram. Tílíkt kann skapa mytur.

Tað ber til at verja høvundin við, at talan er um eitt politiskt blaðkjak í einum føroyskum dagblaði, har málburðurin kann vera harður og sjálvandi ikki livir upp til nakran fakligan standard, men tað vísir bara, hvussu trupult tað er at menna eitt sakligt kjak um evnir, sum eingin hevur kannað. Í tílíkum førum ber í veruleikanum til at skriva so nógv ymiskt, sum kann skapa politiskar mytur, og eingin hevur møguleika fyri at koma við kvalifiserandi íkasti til kjakið, uttan so, at kvalifiserað faklig gransking er á økinum.

Hendan bókin er ein fyrsta roynd at fara til samtíðarkeldurnar fyri at lýsa hetta málið so neyvt sum til ber við støði í keldunum, – samtíðarkeldunum – sum hendan bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í september 1945 hevur lagt eftir seg. So vítt til ber haldi eg meg til tað, sum keldurnar upplýsa, men tað verður eisini – sum neyðugt er í allari søguskriving – neyðugt at viðgera hetta keldutilfarið og við støði í hesi viðgerð taka støðu til tað, sum higartil er skrivað um hesa atsóknina – tað mesta í politiskum høpi.

Í bókini verður bumbuatsóknin lýst við støði í eini klassiskari keldukritiskari greining av keldutilfarinum hjá løgregluni. Hóast keldutilfarið einki upplýsir um, hvussu løgreglan hevur arbeitt við tilfarinum, so kunnu vit ganga út frá, at hon hevur arbeitt á líknandi hátt. Løgreglan hevur tó havt tann fyrimun, at hon sjálv hevur skapt tilfarið og hevur kunnað sett nýggjar spurningar til vitnini. Tað hevur ikki borið til hjá mær, tí vitnini eru ikki longur á lívið. Hjá einum søgufrøðingi, sum kannar málið meira enn 70 ár seinni, er alt keldutilfarið givið, og heldur ikki havi eg funnið nakað annað samtíðarkeldutilfar, sum løgreglan ikki kendi í 1945. Sum søgufrøðingur havi eg hinvegin havt tann fyrimun, at onkuntíð eru viðkomandi upplýsingar frá eygnavitnum komnir fram nógv seinni, sum tað hevur verið møguligt at gagnnýta í sambandi við kanningina av málinum. Tílíkar seinni upplýsingar hevur løgreglan valla havt møguleika fyri at gagnnýta í september 1945. Hinvegin noyðist ein seinni søgufrøðingur at vera serliga ansin við at gagnnýta tílíkar seinni framkomnar upplýsingar. Eisini um talan er um seinni upplýsingar, sum stava frá eygnavitnum, tí tað er nógv, sum kann ávirka minnið. Samtíðarkeldurnar eru altíð tað berandi í eini søguligari rannsókn, meðan seinni tekstir kunnu stuðla undir.

Atsóknin verður síðan sett inn í ein søguligan og politiskan samanhang í samtíðini, og síðan verður ein roynd gjørd uppá at meta um tann týdning, sum bumbuatsóknin hevur havt fyri ta veruligu og varðveittu politisku søgu Føroya. Her verður skilt ímillum ítøkiligar avleiðingar og lýsingar av hesum málinum í seinni frásagnum. Hetta seinasta er serliga avgerandi í hesum máli, tá ið nógv er seinni gitt, men einki granskað, um hetta mál.

Ítøkiliga verður roynt at svara hesum spurningum:

1. Hvørjir vóru høvuðsstríðsspurningarnir í føroyskum politikki undir krígnum og við krígslok, sum bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum mest sannlíkt eigur at skiljast við støði í?
2. Hvat kann keldutilfarið upplýsa um sjálva atsóknina móti løg-

tingshúsinum, hvør ella hvørji vóru undir illgruna av føroyingum og løgregluni, og hvørji vóru tey mest sannlíku motivini?

3. Hvønn leiklut hevur bumbuatsóknin havt í politisku søgu Føroya í samtíðini og í eftirtíðini, bæði í veruligu søguni (t.e. ítøkiligar avleiðingar) og í tí varðveittu (t.e. í seinni umrøðum av atsóknini)?

Í hesi bók verður kanningararbeiðið hjá løgregluni lýst, kannað og viðgjørt. Bókin verður skipað við støði í omanfyri nevndu trimum spurningum. Síðani verður hendingin sett inn í eitt størri høpi, og mett verður um týdningin av bumbuspreingingini. At enda verður gjørd ein niðurstøða við teimum týðandi úrslitinum.

Víst verður til bókmentir og keldutilfar inni í tekstinum, men skjalatilfar hjá løgregluni á Tjóðskjalasavninum, sum snýr seg um kanningarnar av bumbuálopinum móti løgtingshúsinum, verður einans víst til undir einum í Heimildir, Óprentað. Í øðrum førum verður víst til bókmentir og heimildir á vanligan hátt inni í tekstinum.

NAKRAR VIÐMERKINGAR UM GRANSKINGARETIKK

Í søgu eins og innan onnur granskingarøki koma granskarar tíðum at viðgera persónliga eymar upplýsingar, sum krevja serligt varsemi. Lógin um dátuvernd (t.e. persónliga viðkvæmar upplýsingar) er serliga galdandi fyri fólk, sum eru á lívi, men hon kann eisini vera galdandi fyri deyð fólk, um so er, at tað kann grundgevast fyri, at á lívi ynsktu viðkomandi fólk ikki, at ávís fólk skuldu fáa ávísar persónliga viðkvæmar upplýsingar um tey sjálvi. Hetta skal setast upp ímóti, at viðkvæmir upplýsingar um deyð kunnu leysgevast eftir eina ávísa tíð. Í hesum føri er ikki longur talan um vardar viðkvæmar persónsupplýsingar, men í meginregluni er talan um nakrar – nýliga leysgivnar – upplýsingar, sum vóru lætt atkomuligar í 1945, og nú kunnu geva eina mynd av, hvar ávís fólk ferðaðust í Havnargøtum ávísa nátt í september 1945 – upplýsingar, sum flest øll í Havnargøtum kundu havt fingið atgongd til í samtíðini, um tey vóru í býnum hesa septembernáttina í 1945. Óivað eru eisini

persónliga viðkvæmir upplýsingar í tilfarinum, men tað avgerandi í hesum sambandi er, at keldutilfarið nýliga er leysgivið, og at øll áhugaði – leik eins væl sum lærd – nú kunnu fáa atgongd til tilfarið.

Tað merkir sjálvandi ikki, at tað er óneyðugt at vísa varsemi í sambandi við tílíkar almennar upplýsingar um fólk, sum ikki longur eru á lívi. Eisini hóast skjalatilfar, sum í hesum førinum, er so gamalt, at tað ikki longur er vart av ásetingum um atgongd til skjalatilfar. Øll, eisini fólk, sum ikki longur eru á lívi og ikki eru vard av lógini, eiga í granskingarhøpi at viðgerast við virðing. Fyrst og fremst tí, at øll fólk eiga at verða viðgjørd við virðing, men eisini tí, at deyð fólk hava livandi næstringar, t.e. familju, vinfólk ella bara fólk, sum seinni hava fingið stóra virðing fyri tí, sum tey deyðu hava gjørt og latið eftir seg. Her er eisini neyðugt hjá granskarum at gera sær greitt, at tey deyðu ikki eins og tey livandi hava møguleika fyri at verja seg móti atfinningum frá livandi. Hetta er eitt serligt atlit mótvegis deyðum fólkum, sum leggur eina heilt serliga ábyrgd á granskarar.

Tað er tí umráðandi, at virðing fyri fólkum ikki einans er nakað, sum er galdandi fyri fólk, sum eru á lívi, men at virðingin er alment menniskjanslig – tvørturum einstaklingar, familju, fólkabólkar og tjóðir, uttan mun til, um talan er um livandi ella deyð fólk, tí øll eru knýtt saman í einum samleika tvørtur um stað og tíð. Tað merkir sjálvandi ikki, at tað ikki ber til at finnast at nøkrum, sum fólk gera, tað skal bara gerast virðiliga og sakliga.

Ávísar avbjóðingar gera seg meira galdandi á summum granskingarøkjum, meðan aðrar avbjóðingar gera seg meira galdandi á øðrum granskingarøkjum, men etikkur eigur altíð at vera ein partur av granskingini. Í søgu eru tað ofta deyð fólk, sum ikki sjálvi kunnu verja seg, ið søgugranskarar fáast við. Í hesi bókini verður eitt evni, sum er serliga viðbrekið, viðgjørt. Tey flestu – ella fleiri – av fólkunum, sum verða umrødd í bókini, vóru ung í 1945 og avhoyrd í sambandi við ein eygleiðaraleiklut ella vóru undir illgruna fyri at hava verið við til at fremja atsóknina móti løgtingshúsinum í 1945. Tey seinastu av teimum eru flest øll deyð so seint sum nakað eftir aldaskiftið 2000,

Á ólavsøku í 1945. Hálvan annan mánað seinni sprongdist ein bumba við útnyrðingshornið á tinghúsinum.

onkur so seint sum í 2020. Kanska er onkur framvegis á lívi. Tey flestu hava helst onkra familju, m.a. barnabørn og børn, sum framvegis eru á lívi. Hóast – ella kanska akkurát tí – eingi fólk vórðu dømd ella yvirhøvur skuldsett fyri at hava framt hesa bumbuatsóknina, so er hetta málið framvegis viðbrekið, fleiri eru enn undir illgruna, og tað tyngir enn ávís fólk og ávísar familjur.

Hetta eru atlit, sum eru neyðug at hava í huga, tá hetta keldutilfarið og hetta bumbumálið verður viðgjørt.

Tað ber til at broyta/anonymisera nøvn, tá ið talan er um gransking viðvíkjandi størri bólkum (t.e. flokkar, kvinnur, menn, kyn, tilflytarar o.s.fr.), ið ikki eru treytað av einstaklingum, men í hesum førinum – og í søgu yvirhøvur, sum í fleiri førum snýr seg um serstakar hendingar og einstaklingar – ber hetta illa til. Teksturin hevði

mist nakað grundleggjandi orsakað av hesum – sjálva hendingina, individualitetin. Høvdu nøvn verið anonymiserað, so hevði tað heldur ikki loyst avbjóðingina við, at fyri at lýsa, hvar ávís fólk vóru og fluttu seg í Havnini hesa náttina, er ein avgerandi upplýsing, hvar viðkomandi fólk búðu og nær hesi fólkini komu heim hesa náttina. Tílíkar upplýsingar avdúka í einum lítlum býi, uttan mun til um nøvn eru anonymiserað, hvørji fólkini eru. Og verða bústaðarupplýsingar eisini anonymiseraðir, sum kanska hevði loyst avbjóðingina, so hevði tað heilt einfalt ikki borið til at orða ein meiningsfullan tekst um hetta málið. Harafturat kemur ikki minst, at skuldi tað borið til at broytt ella anonymisera nøvn og bústaðir, so hevði eitt av høvuðsmálinum við at kortleggja hetta málið – at *avmarka* ta politisku mytologiseringina rundan um hetta málið – verið mist burtur, møguliga hevði tað bara skundað undir hetta rákið. Tað hevur í hesum førinum sostatt hvørki verið mett møguligt ella gagnligt at broyta ella anonymisera nøvn og bústaðir. Og tá øll avhoyrd løgfrøðiliga eru í somu støðu, – fríkend – havi eg heldur ikki hildið tað vera rætt at latið summi verið ónevnd, tá ið tað kann skiljast soleiðis, at eg haldi summi hava betri av ikki at verða nevnd við navni, meðan onnur kunnu nevnast.

Summi avhoyrd hava ein størri leiklut í kanningini hjá løgregluni, men eingin varð skuldsettur. Tilgongdin í hesum førinum hevur heldur verið, at leggja tekstin so tætt sum til ber at keldutilfarinum (frásagnunum hjá fólkunum sjálvum), og – heldur enn royna at prógva nakað – eftirkanna fráveruprógvini hjá fólkunum, sum hava verið avhoyrd. Teksturin leggur seg sostatt ikki eftir at avdúka, hvør ella hvørji vóru sek, men heldur leggur hann seg eftir at greina fráveruprógvini hjá teimum einstøku fólkunum so neyvt, sakliga og reiðiliga, sum til ber við støði í keldunum. Endamálið er ikki – og hevur heldur ongantíð verið – at avdúka, hvør ella hvørji vóru sek, men heldur hevur tað verið ein roynd at útihýsa so nógv avhoyrd ella mistonkt sum til ber frá bólkinum av mistonktum. Hetta er ikki bert eitt viðurkent vísindaligt háttalag (Popper 1996), tað er eisini ein granskingaretisk tilgongd, sum minnir um keldukritisku tilgongdina í sambandi við revsirættarmál í eini rættarskipan í einum nýmótans fólkaræðisligum samfelagi, har øll fólk eru ósek til tað øvugta er prógvað.

Í bókini slepst sostatt ikki undan nógvum nøvnum, sum eyðmerkja nógv fólk, men samanhangur er millum granskingartilgongdina (at útihýsa møguleikum) og granskingaretikkin (at fríkenna heldur enn at skuldseta). Kanska er hetta eisini akkurát í hesum málinum, har illgrunar enn verða settir fram, beinleiðis rætt at gera.

Tað merkir hinvegin, at summi fólk koma meira í miðdepilin í bókini enn onnur, sum eru lættari at útihýsa, men tað merkir eisini, at møgulig sek, sum løgreglan ongan illgruna hevði til, heldur ikki koma í miðdepilin í hesi bókini. Sum søgufrøðingur noyðist eg at halda meg til keldurnar og vera tilvitaður um avmarkingarnar. Fyrivarni skal tí eisini takast fyri, at í søgu, sum byggir á eina kritiska viðgerð av søguligum samtíðarkeldum, ið altíð eru avmarkaðar til at viðgera ein kendan og avmarkaðan part av einum ávísum evni, ber ikki til at útihýsa møguleikar í nøkrum skilvísum týdningi, men talan verður altíð um sannlíkindi grundað á keldurnar.

Eitt annað sjónarhorn

Annar viðmerkjari, Jóannes Nielsen, setti sær fyri at verja ein, sum sambært honum av óróttum kom undir illgruna, og tí ongantíð varð skuldsettur ella dømdur. Hann tók soleiðis til í Dimmalætting í 2010:

„Bumban brast stutt eftir midnátt, og ein tíma seinni tók løgreglan næstyngsta sonin hjá Andriasi Ziska til avhoyringar. Preben Ziska segði seg vera sakleysan, og tíbetur var hansara alibi í lagi. Beint áðrenn brestin hevði hann nevniliga tosað við ein ungan havnarmann, sum fylgdi eini gentu til húsa. Eg leggi ikki í at nevna navnið á tí manninum, men hann er framvegis á lívi. Hesin „navnleysi“ var

heintaður til avhoyringar á løgleglustøðini somu nátt, og „navnleysi“ kundi vátta, at hann hevði tosað við Preben beint áðrenn brestin. Hann hevði sostatt ikki haft møguleikar at rigga til dynamitt og annað, sum kravdist til sprongingina. Hvør annar, ið var tikin av løgregluni, ella um nakar annar yvirhøvur var til avhoyringar, tað veit eg ikki. Plakatir vórðu negldar á pelarnar tann næsta dagin, 5.000 krónur vórðu bodnar teimum, sum kundu leiða løgregluna á sporið til bumbumannin ella bumbumenninar. Men tíverri var ongin bumbumaður funnin, og tískil spurdist heldur ongin rættarsak burturúr. So kann mann spyrja, hvør beitti løgregluna eftir soni Ziska? Ziska sjálvur var ivrigur tjóðskaparmaður, men tað er ikki nakað brotsverk, og tað gjørdi heldur ikki son hansara til bumbumann.“ (Dimmalætting 28.01.2010).

Tann „navnleysi“ var bert ein av rættiliga nógvum avhoyrdum, sum við fullum navni í september 1945 hava latið løgregluni sína frágreiðing. Tað koma vit aftur til seinni í bókini. Her skulu vit einans hava fyri eyga, at tey nógvu, sum vórðu avhoyrd av løgregluni, ongantíð vórðu skuldsett, kanska vóru onkur undir illgruna, men fyrst og fremst vóru øll hesi fólk avhoyrd, tí tey høvdu verið í eini støðu, har tey kundu geva løgregluni upplýsingar, sum kundu føra til, at málið varð uppklárað. Tey kundu sum vitnir útihýsa seg ella onnur frá illgruna ella geva løgregluni upplýsingar, ið kundu leiða hana á rætta sporið í kanningini.

Tað er heldur ikki vist, at nakar beitti løgregluna eftir nøkrum, keldutilfarið bendir í veruleikanum ikki á tað, men løgreglan hevði skyldu til at kanna øll viðurskifti, sum kundu vera við til at loysa bumbumálið.

At útihýsa møguleikar vil tí altíð merkja at útihýsa empiriskt og keldukritiskt, – ikki fyritreytaleyst og skilvíst – nakrar *kendar* møguleikar

við støði í einum *kendum* empiriskum tilfari. Tað fer ongantíð at vera at útihýsa møguleikarnar – empiriskt og keldukritiskt – við støði í *øllum* viðkomandi keldutilfari um viðkomandi evni. Møguleikin, sum ikki kann útihýsast, kann vera at finna í upplýsingum, sum ikki eru í kenda keldutilfarinum. Tað snýr seg ikki um at *verifisera* (prógva) nakað alment, tað snýr seg um at *falsifisera* (mótprógva) ítøkiligar illgrunar móti ávísum fólkum, soleiðis at vit møguliga koma tættari eini sannlíkari mynd av hesum málinum. Hetta er tað meira avmarkaða – útihýsandi – endamálið, sum arbeitt verður eftir og fram ímóti í hesi bókini.

Áðrenn komið verður til viðgerðina av hesum spurningunum, skal søguligi samanhangurin, høpið, lýsast.

POLITISKA STØÐAN Í FØROYUM FRÁ 1940 TIL 1945

Spurningurin um mentanarligt og politiskt sjálvstýri í Føroyum hevði verið ein politiskur høvuðsspurningur í føroyskum politikki síðan flokkabýtið í 1906. Tað vóru tó eisini aðrir stórir spurningar í føroyskum politikki, m.a. rúsdrekkaspurningurin og sosialir spurningar, og fullveldisspurningurin hevði ikki verið so avgerandi undan seinna heimsbardaga. Tað var meira spurningurin um at varðveita verandi støðu ella økt sjálvstýri innan karmarnar á danska ríkinum, sum politisk ósemja var um í Føroyum í tíðarskeiðinum undan seinna heimsbardaga. Krepputíðirnar í 1930-árunum høvdu eisini við sær, at spurningurin um økt sjálvstýri ikki hevði heilt stóra fólksliga og politiska undirtøku í Føroyum. Tó so, í 1936 fekk Vinnuflokkurin (stovnaður í 1935), sum politiskt hevði tað mál, at í Føroyum skuldu føroyingar ráða, tvey umboð vald í løgtingið. Í januar 1940 fekk Fólkaflokkurin (stovnaður í 1939), sum varð settur á stovn av fólkunum aftanfyri Vinnuflokkin, saman við útbrótarum úr Sjálvstýrisflokkinum

(stovnaður í 1909), seks fólkavald umboð í løgtingið. Fólkaflokkurin vildi í veruleikanum, at Føroyar skuldi gerast sjálvstøðugt ríki, kanska í kongssambandi við Danmark eins og Ísland í 1918-1944. Meiriluti var langt frá í 1940 fyri stevnuskrá Fólkafloksins í løgtinginum, har Sambandsflokkurin (stovnaður í 1906) hevði átta vald løgtingsumboð, Sjálvstýrisflokkurin fýra og Javnaðarflokkurin seks løgtingsumboð (Hansen 2003, 158). Tá seinna heimskríggj brast á í 1939, var undirtøkan í Føroyum fyri skilnaði frá Danmark rættiliga avmarkað.

Tó so, spurningurin um eitt føroyskt fullveldi var fyri fyrstu ferð orðaður alment av Sverra Patursson (1871-1960) í bóklinginum „Móti Loysing“ frá 1925. Í 1942 fór Andrias Ziska (1883-1960), keypmaður í Havn, undir at geva út blaðið *Fríu Føroyar*, sum kom út undir krígnum. Andrias Ziska hevði samstarvað við Sverra Patursson í sambandi við „Móti Loysing“, og tá hann fór at geva út loysingarsinnaða blaðið *Fríu Føroyar*, fekk hann hjálp frá Maurentiusi Sofus Viðstein (1892-1971), sum saman við Peturi Mohr Dam (1898-1968) var fyrsti løgtingsmaður Javnaðarfloksins í 1928, og formaður Javnaðarfloksins til 1937, tá ið hann gjørdist ósamdur við Petur Mohr Dam og Javnaðarflokkin um ta politisku kósina. Petur Mohr Dam, sum tá gjørdist formaður floksins til hann doyði, stóð fyri tí hóvligu sosialdemokratisku kósini, meðan Maurentius Viðstein stóð fyri tí meira kollveltingarligu og altjóða sosialistisku kósini. Í 1935 fór Maurentius Viðstein at arbeiða á *Dagblaðnum*, sum í 1940 gjørdist politiskt málgagn hjá loysingarsinnaða Fólkaflokkinum. Í 1949 varð hann blaðstjóri *Dagblaðsins*. Anton á Krákusteini (1892-1958) og Ásbjørn Poulsen (1915-1988) hjálptu Andriasi Ziska við at geva út *Fríu Føroyar*, sum – umframt at vera loysingarsinnað eisini var sosialistiskt – kom út í 1942-1948 (Wang 2010, 26-27 og Dalsgarð 2002, 94 – til tey føroysku bløðini annars, sí Dalsgarð 2002).

Hetta broyttist skjótt, tí bæði politiskt og búskaparliga broyttist føroyska samfelagið grundleggjandi undir krígnum. Danmark varð hersett av Týsklandi 9. apríl 1940, meðan Føroyar vórðu hersettar av bretum 13. apríl 1940. Harvið blivu Danmark og Føroyar partur av

Andrias Ziska var sannførdur loysingarmaður á vinstravonginum í føroyskum politikki. Hann var við til at stovna Skipafelagið Føroyar í 1919 og gav í 1942-1948 út blaðið Fríu Føroyar. Skrivstovan hjá felagnum og blaðið Fríu Føroyar hildu til í húsum hansara í Sverrisgøtu. Andrias Ziska mótmælti einsamallur bretsku hersetingini av Føroyum í apríl 1940, og hann var eins og nógv føroysk fullveldisfólk hart ímóti, at løgtingið í september 1945 samtykti, at Føroyar aftur skuldu fara at brúka donsku krónuna við danska krónuvirðinum.

hvør sínari síðu í krígnum. Tað hevði við sær, at alt beinleiðis samskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar nærum helt uppat, og føroyskir og danskir myndugleikar í Føroyum máttu taka við politisku leiðsluni. Tað gjørdi sjálvstýrisrørslan í Føroyum sær dælt av. Longu 10. apríl legði Fólkaflokkurin uppskot fyri løgtingið um, at alt vald í Føroyum var í Føroyum, tí danska ríkið við týsku hertøkuni varð hildið uppat við at vera til. Bretar gjørdu hinvegin dagin eftir greitt, at teir fóru at herseta Føroyar av strategiskum grundum, og at teir fóru at lata oyggjarnar aftur til Danmark, tá ið kríggið var av. Lagt varð upp til politiskt stríð millum føroysku loysingarrørsluna øðrumegin og hinumegin hersetingarvaldið og danskar myndugleikar (amtmannin), ið ikki vildu, at Føroyar gjørdust sjálvstøðugt ríki.

Á løgtingi var heldur ikki meiriluti fyri ætlanunum hjá Fólkaflokkinum, og hinir tríggir føroysku flokkarnir (Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin), sum høvdu 18 umboð í løgtinginum, fóru undir eitt samstarv við amtmannin. Hesir tríggir flokkarnir samtyktu í mai eina fyribils stjórnarskipan, har løgtingið saman við amtmanninum fekk lóggávuvald í føroyskum viðurskiftum, meðan amtmaðurin fyrisat donsk málsøki í Føroyum. Harumframt varð neyðugt at seta á stovn serstakar appel dómstólar í Føroyum.

Bretar høvdu longu 25. apríl góðkent føroyska flaggið at brúka á sjónum, tá ið føroysk skip ikki kundu sigla við donskum flaggi í bretskum sjóøki. Helst vistu bretar ikki fyrr enn ov seint, at teir harvið stuðlaðu einum gomlum politiskum ynski hjá føroysku sjálvstýrisrørsluni. Bretska viðurkenningin av føroyska flagginum var í veruleikanum ein politiskur stórsigur fyri føroysku sjálvstýrisrørsluna, sum í 1920- og 1930-árunum hevði virkað fyri at vinna føroyska flagginum rættindi í Føroyum, – á sjógvi og á landi – og undirtøka var eisini fyri hesum í Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum. Tá hetta hevði so stóran týdning, so hekk tað eisini saman við, at føroysk skip undir krígnum fingu stórt sæð óavmarkaðan rætt til at flyta feskfisk á bretska marknaðin. Áðrenn kríggið varð føroyska fiskaframleiðslan mest saltfiskur, sum varð útfluttur til lond í Suðurevropa, meðan bretski feskfiskamarknaðurin stórt sæð var stongdur fyri føroyingum. Politiskur ófriður í Grikkalandi, borgarakríggj í Spania og útflutningsbann hjá Tjóðasamgonguni móti fasistiska Italia hevði rakt føroyska útflutningin hart í 1930-árunum. Tá bretar undir krígnum høvdu tørv á, at onnur tóku sær av at flyta feskfisk til Bretlands, varð føroyska fiskivinnan løgd um frá saltfiskframleiðslu til feskfiskaveiðu og feskfiskaflutning til bretska marknaðin.

Tær ótryggu krígstíðirnar gjørdu, at prísirnir vóru høgir, og samstundis vórðu Føroyar búskaparliga knýttar tættari at Bretlandi. Føroyski búskapurin kom undir krígnum burtur úr stóru kreppuni, sum hevði valdað í 1930-árunum. Búskaparliga bjartskygnið hevði eisini við sær størri sjálvstýrispolitiskt bjartskygni í Føroyum. Tá fólkatingsval var í Føroyum í 1943 fekk Fólkaflokkurin 48% av atkvøðunum, og á løgtingsvalinum seinni sama árið tvífaldaði flokkurin sína umboðan úr seks upp í tólv løgtingsumboð og vantaði bert eitt umboð í einsamallur at hava meiriluta í løgtinginum. Bretar bóru so stóran ótta fyri, at flokkurin, um hann einsamallur fekk meiriluta í løgtinginum, fór at lýsa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki, at teir vendu sær til flokkin við boðum um, at einki ríki fór at viðurkenna eitt føroyskt fullveldi, sum varð lýst, meðan frælsar samráðingar við eitt frælst danskt kongaríki ikki vóru møguligar. Tað hevði, saman við tí sannroynd, at Fólkaflokkurin heldur ikki eftir løgtingsvalið í 1943 einsamallur hevði meirilutan í løgtinginum, við sær, at spurningurin um eitt sjálvstøðugt føroyskt ríki varð útsettur til eftir kríggið. Fyri at skapa frið um spurningin, meðan kríggj var, hevði amtmaðurin kunngjørt, at hann vildi hava, at samráðingar skuldu vera við føroyingar um hendan spurningin eftir kríggið, og at hann fór at heita á stjórnina um at gera tað. Tað var greitt, at hesin spurningurin varð útsettur til eftir kríggið, men tað var samstundis heilt greitt fyri allar partar, at spurningurin fór at taka seg upp aftur í samráðingunum millum Danmark og Føroyar eftir kríggið, tá ið Bretland hevði lovað at lata Føroyar aftur til eitt frælst Danmark.

Tá kríggið endaði, bjóðaði danska stjórnin umboðum fyri føroysku

Kríggið varð liðugt nakrar fáar mánaðir áðrenn ein bumba brast við løgtingshúsið á síðuni, sum vendi burtur frá Tinghúsvegnum, oman móti Havnará. Her koma bretskir hermenn og hernaðarakfør gjøgnum Tórsgøtu.

flokkarnar til Danmarkar at samráðast um eina nýggja skipan millum londini. Samstundis boðaði stjórnin frá, at fyribils skipanin, sum hevði verið í gildi í Føroyum undir krígnum, skuldi vera í gildi til ein nýggj skipan varð sett í verk. Fyribils skipanin var tí í gildi í Føroyum til 1. apríl 1948, tá ið ein meiriluti í løgtinginum – eftir at ein tepur meiriluti av føroysku veljarunum á eini fólkaatkvøðu 14. september 1946 hevði atkvøtt fyri loysing frá Danmark – samtykti at seta heimastýrislógina í gildi í Føroyum. Harvið vóru viðurskiftini millum Danmark og Føroyar komin (aftur) í eina trygga politiska legu, men nógvir føroyingar høvdu í fleiri ár ynskt, at føroyskt fullveldi gjørdist úrslitið.

Longu í september 1945, stutt eftir at sambandið millum Danmark og Føroyar varð tikið uppaftur eftir fimm ár við kríggi, vórðu gjørdar nakrar rættiliga týðandi broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum skaptu nógva politiska øsing í Føroyum. Fólkaflokkurin helt ikki, at nakrar broytingar, sum kundu knýta Føroyar tættari at Danmark, skuldu gerast, fyrr enn løgtingsval hevði verið, og føroyingar høvdu havt høvi til at geva sína støðu til kennar. Ein av teimum stóru broytingunum, sum hendu undir krígnum, var sum nevnt, at føroyski búskapurin gjøgnum útflutningin og samhandilin við bretar varð nógv tættari knýttur at bretska búskapinum, meðan sambandið við danska búskapin viknaði. Tað hevði við sær, at longu tá kríggið byrjaði, varð neyðugt at brúka serstakar føroyskar pengaseðlar í Føroyum – ikki danskar seðlar, sum vórðu brúktir í tí av Týsklandi hersetta Danmark. Í fyrstuni vórðu danskir pengaseðlar, við einum serligum stempli á, brúktir í Føroyum, men seinni vóru serligir føroyskir pengaseðlar prentaðir í Bretlandi. Í 1940 varð virðið á føroysku krónuni knýtt at sterlingpundinum, og føroyska krónan fekk í mai eftir meting og samráðingar við bretar eitt fyribils virði í mun til bretska pundið uppá 20.00 krónur. Fyri at tryggja, at virðið á krónuni ikki broyttist, so varð samstundis forboð sett fyri at innflyta m.a. danskar seðlar og myntir til Føroya. Longu í juni 1940 varð virðið á føroysku krónuni eftir umbøn frá bretum sett til 22.40 fyri

hvørt bretskt pund, og hetta varð fasta virðið á føroysku krónuni í mun til bretska pundið restina av krígnum. Tá Danmark varð hersett 9. apríl 1940, hevði danska krónan eitt virði uppá 19.80 krónur í mun til bretska pundið, men í mun til føroysku krónuna, sum í 1940 fekk eitt annað og fast virði í mun til pundið, so kundi virðið á tí donsku krónuni harumframt broytast í mun til pundið – og tí eisini í mun til virðið á føroysku krónuni. Føroyska samfelagið varð sostatt ikki einans óformliga knýtt nógv tættari at bretska búskapinum, men formliga gjørdist føroyska gjaldoyrað eisini leyst av donsku krónuni og fast knýtt at virðinum á bretska pundinum. Tað var kortini amtmaðurin, sum vegna danska tjóðbankan lat serligu føroysku pengaseðlarnar prenta. Teir fyrstu mánaðirnar eftir hersetingina í apríl 1940 høvdu føroyingar ikki nóg mikið av bretskum pundum at gjalda fyri tann nógv økta innflutningin av vørum úr Bretlandi, og neyðugt varð tí at taka sterlinglán uppá 30.000 pund úr Bretlandi. Longu á heysti í 1940 var støðan orsakað av stóra føroyska feskfiskaútflutninginum til Bretlands kortini broytt so mikið grundleggjandi, at føroyingar umvegis eitt stórt útflutningsyvirskot áttu rættiliga stórar upphæddir í pundum til góðar, sum fyritøkurnar orsakað av avmarkaðu nøgdini av føroyskum pengaseðlum ikki kundu veksla um til føroyskar krónur. Bæði fyritøkur og bankar settu tí ynski fram mótvegis amtinum um, at fleiri føroyskir pengaseðlar vórðu prentaðir. Í hesum sambandi setti Thorstein Petersen (1899-1960), næstformaður Fólkafloksins, sum eisini var stjóri í Sjóvinnubankanum, fram eitt „Önske om, at der blev oprettet en færösk Nationalbank“ (Løgtingstíðindi 1945, 100 – í sambandi við stríðið um krónuvirðið verður yvirhøvur vístt til Løgtingstíðindi 1945, 98-109). Bankarnir fingu loyvi til at fáa føroyskar krónur frá amtinum fyri sínar sterlingágóðar, sum so skuldu latast amtinum. Føroya Banki tók av hesum møguleikanum, meðan Sjóvinnubankin ikki í sama mun tók av hesum møguleikanum, sum í apríl 1941 varð avmarkaður nakað fyri at minka um vandan fyri prísvøkstri í Føroyum.

Í juli 1945 høvdu Føroyar onga skuld í øðrum gjaldoyra, men Føroyar áttu 2.800.000 pund til góðar í serliga bretskum bankum. Harav hevði ríkið longu yvirtikið 2.000.000 pund til krónukursin 22.40, 300.000 pund hjá útflutningsvinnuni og Sjóvinnubankin átti restina, eini 500.000 pund, sum bankin ikki hevði selt amtinum.

Tað var tann nærum óavmarkaða atgongdin hjá føroyingum at selja feskfisk á stóra feskfiskamarknaðinum í Bretlandi, saman við eini í mun til pundið rættiliga nógv niðurskrivaðum føroyskum krónuvirði (frá kr. 19.80 til 22.40), sum vóru høvuðsorsakirnar til stóru búskaparligu uppgongutíðirnar í Føroyum undir krígnum.

Kjak stóðst av hesum longu undir krígnum. Fólkaflokkurin hevði í 1941 verið ímóti, at Føroyar „ger sáttmála við orrustutjóð, sum

Tá Føroyar vórðu hersettar í apríl 1940, hendu fleiri rættiliga avgerandi broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar. Løgtingið fekk størri heimildir, flaggið varð viðurkent til nýtslu umborð á føroyskum skipum, og búskaparliga vórðu oyggjarnar knýttar at sterlingblokkinum. Føroyska krónan hevði gjøgnum tey fimm krígsárini annað virði enn tann danska. Í fyrstuni vórðu yvirstemplaðir danskir seðlar brúktir í Føroyum

bindur niður rásarúm og yrkisfrælsi Føroya" – t.e. at Føroyar gjørdust partur av bretska Sterlingblokkinum. Thorstein Petersen, næstformaður Fólkafloksins, ivaðist eisini í, um amtmaðurin hevði rætt til at prenta føroyskar pengaseðlar vegna danska tjóðbankan. Hann metti eisini, at serliga tað, at virðið á føroyskum pengaseðlum var knýtt at danska tjóðbankanum, kundi hava við sær stóran búskaparligan miss fyri Føroyar eftir kríggið í sambandi við, at farið varð aftur til at brúka teir vanligu donsku pengaseðlarnar. Thorstein Petersen metti, at danska krónan mest sannlíkt fór at standa rættiliga veik eftir kríggið. Hansara búskaparliga meting var, at danska krónan í besta føri fór at hava helvtina av virðinum á føroysku krónuni.

Hetta kann hava verið ein grund til, at Sjóvinnubankin ikki lat stóran part av sínum sterlingágóða í Bretlandi – 500.000 pund – veksla um til krónur fyri kurs 22.40. Í øllum førum hevði tað verið ein stórur fyrimunur hjá Sjóvinnubankanum at bíða til eftir kríggið at veksla pundini til krónur, um so var, at danska krónan gjørdist so veik, sum Thorstein Petersen undir krígnum metti, at virðið á donsku krónuni fór at vera eftir kríggið. Í staðin fyri at selja hvørt pund undir krígnum til amtið fyri 22.40 krónur, so kundi tey eftir kríggið seljast til amtið fyri í minsta lagi 44.80 krónur – um forsøgnin hjá Thorstein Petersen skuldi verið røtt. Tað var hon bara ikki. Eftir kríggið gjørdu bretar og danir semju um, at danska krónan skuldi knýtast fast at pundinum soleiðis, at hvørt pund kundi seljast ella keypast fyri 19.32 danskar krónur. Í veruleikanum merkti hetta, at danska krónan gjøgnum kríggið varð styrkt í mun til pundið – úr 19.80 í apríl 1940 til 19.32 krónur fyri hvørt pund í 1945. Tann danska krónan var nú 15% sterkari enn tann føroyska krónan í mun til pundið, og besti kursurin at veksla sterlingágóðan til danskar krónur var nú føroyski kursurin, 22.40 krónur fyri hvørt pund. Lógu spekulatiónsmotiv undir avgerðini hjá Thorsteini Petersen undir krígnum at bíða við at selja pundini hjá Sjóvinnubankanum til eftir kríggið, so var skeivt spekulerað, tí tey búskaparligu útlitini broyttust øvugt.

Men óivað vóru tað eisini onnur atlit enn spekulatión, sum lógu undir avgerðunum hjá Sjóvinnubankanum. Thorstein Petersen óttaðist eisini fyri, at tann danski búskapurin fór at vera so illa fyri eftir fleiri ára kríggj, at vandi kundi vera fyri, at allur sterlingágóðin, sum føroyingar høvdu vunnið sær við samhandlinum við bretar undir krígnum, kundi fara fyri skeyti, um hann varð vekslaður um til veika danska krónu (Skála 1992, 37-38).

Tað tykist hinvegin greitt, at aðrar enn búskaparligar grundir helst eisini liggja undir gerðum hjá Thorsteini Petersen, sum umframt at vera bankastjóri eisini var politikari og næstformaður Fólkafloksins, sum undir krígnum hevði sett fram uppskot um, at Føroyar skuldu loysa frá Danmark. Tá Fólkaflokkurin í 1940 hevði verið ímóti, at Føroyar gjørdust partur av sterlingøkinum, so høvdu grundgevingarnar verið, at Føroyar ikki áttu at gerast partur ella stuðul hjá nøkrum stríðandi pørtum í kríggi, – „orrustutjóð" – og at Føroyar heldur ikki máttu lata frá sær „rásarúm og yrkisfrælsi". Í grundgevingunum hómast ein uttanveltað støða hjá einum sjálvstøðugum føroyskum ríki. Tað framgongur eisini av, at sambært Thorsteini Petersen átti ein føroyskur tjóðbanki at setast á stovn, ið skuldi taka sær av búskaparligu viðurskiftum landsins. Tað var óivað við støði í m.a. tílíkum sjónarmiðum og virknum andstøðupolitikki í teimum fyri Føroyar búskaparliga góðu og politiskt lutfalsliga sjálvstøðugu krígsárunum, at flokkurin hevði fingið so stóra politiska undirtøku, at hann nærum einsamallur hevði meirilutan í løgtinginum. Tað var tí heilt náttúrligt, at flokkurin hevði somu støðu til hesar spurningarnar við krígslok í 1945, tá danska stjórnin og løgtingsmeirilutin høvdu ætlanir um at flyta Føroyar aftur undir danska krónuøkið. Í skrivi til amtið 10. august 1945 boðaði danska stjórnin frá, at hon góðtók alla sølu av pundum til krónukursin 22.40, sum amtið hevði játtað, og at hon eisini fór at góðtaka tær sølur, sum framyvir fóru at vera gjørdar sambært ásetingunum hjá amtinum og sambært avtaluni frá 1940 við bretar. Tey 500.000 pundini hjá Sjóvinnubanknum, sum bankin ikki hevði selt, vóru tó ikki fevnd av hesum. Tað var tí líkt til, at Sjóvinnubankin fór at fáa 3 krónur og 8 oyru minni fyri hvørt av teimum

500.000 pundunum enn øll onnur, sum høvdu ella fóru at selja síni pund til amtið – eitt tap uppá 1.540.000 krónur. Stjórnin boðaði samstundis frá, at tá hendan avtalan kostaði ríkiskassanum nógvan pening, so kundi tað ikki roknast við, at avtalan fór at standa við. Í hesum sambandi helt stjórnin eisini, at løgtingið skuldi taka málið til viðgerðar.

Tað var í hesum sambandi, at løgtingið tók til viðgerðar spurningin um, at Føroyar aftur skuldu fara at brúka donsku krónuna. Tá gjørdist tað greitt, at Fólkaflokkurin metti hetta vera eitt sera týðandi mál, sum ikki átti at viðgerast, fyrr enn Føroya fólk hevði havt høvi til at siga sína hugsan um málið. Í sambandi við framløgu til fyrstu viðgerð av málinum 13. august 1945 boðaði Fólkaflokkurin frá, at flokkurin mótmælti, at málið varð viðgjørt í løgtinginum, áðrenn løgtingsval hevði verið, og øll tey tólv løgtingsumboðini hjá flokkinum rýmdu úr løgtinginum, tó uttan at niðurleggja síni fólkavaldu umboð. Hetta sama varð eisini upplýst í einum mótmælisskrivi til løgtingið 23. august 1945, sum øll løgtingsmanning Fólkafloksins hevði undirskrivað (Dahl 1945). Her skal havast í huga, at Fólkaflokkurin hevði havt stóra framgongd á løgtingsvalinum í 1943, tá ið Fólkaflokkurin tvífaldaði sína umboðan, og Fólkaflokkurin manglaði bert eitt løgtingsumboð (Fólkaflokkurin hevði 12 av 25 løgtingsumboðum) í fyri at hava meirilutan einsamallur í løgtinginum. Við fyrstu viðgerð av málinum 23. august 1945 varð málið sent í eina løgtingsnevnd við fimm umboðum. Bæði umboðini hjá Fólkaflokkinum í fimmmannanevndini, formaðurin Jóannes Patursson (1866-1946) og Thorstein Petersen fingu fundarboð, men tey boðaðu bæði skrivliga frá, at tey ikki fóru at luttaka í hesum nevndararbeiðinum.

Politiska kjakið undir krígnum var yvirhøvur hart. Politikarar skuldsettu hvønn annan ella felagsskapir fyri at vera „nasist“ ella „Hitler Jugend“, og amtmaðurin varð lagdur undir embætismisnýtslu. Rættarmál spurdust burturúr, politikarar fingu dóm og bøtur, meðan bretar settu forboð fyri, at ávís bløð komu út (Mitens 1969, 54-55). Tað harða politiska kjakið helt fram eftir krígslok, eisini í sambandi við viðgerðina av krónuvirðinum. Politiskir fundir vórðu fyriskipaðir í Sjónleikarahúsinum í Havn, har heilt nógv fólk møttu, kjakið var óvanliga hart og stórt trýst varð lagt á tey 13 løgtingsumboðini, sum sótu eftir í løgtinginum (Mohr 2012, 138-140).

Einki løgtingsval varð útskrivað, og viðgerðin av krónumálinum varð tí avgreidd í løgtinginum, uttan at tann størsti flokkurin, sum hevði 12 av 25 løgtingsumboðum, luttók. Hinir báðir flokkarnir, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum høvdu ávikavist átta og fimm umboð – Sjálvstýrisflokkurin misti øll síni fýra umboð í 1943 – viðgjørdu alt málið. Keldutilfarið, t.e. nevndarálit og annað tilfar hjá løgtinginum, fevnir tí einans um sjónarmiðini hjá hesum báðum flokkunum, meðan sjónarmið Fólkafloksins ikki eru so sjónlig í hesum tilfari. Álitið umrøður einans jaligu avleiðingarnar av, at virðið á føroysku krónuni við uppskotinum hjá ríkisstjórnini varð uppskrivað soleiðis, at keypikraftin hjá føroyingum øktist við eini 15%, meðan lítið verður nevnt um, at málið sambært Fólkaflokkinum eisini hevði politiskan týdning fyri ríkisrættarligu framtíð Føroya. Eisini tykist greitt, at ein uppskriving av tí føroysku krónuni við 15% í mun til pundið fór at hava avbjóðingar við sær fyri fiskaútflutningin til Bretlands, sum hevði verið grundarlagið undir framburðinum undir krígnum. Tann 7. september 1945 varð uppskotið, at føroyska og danska krónan aftur skuldu hava sama virði, samtykt við 13 atkvøðum. Dagin eftir boðaði amtið frá, at eftir henda dag skuldu øll pund vekslast eftir nýggja kursinum, 19.32. Undantøk fóru at vera fá, sterlingágóðin hjá Sjóvinnubankanum var ikki íroknaður (Skála 1992, 38).

Í teimum føroysku bløðunum var eisini kjak um málið, og har vóru eisini sjónarmið Fólkafloksins at síggja.

Løgtingsvalið, sum Fólkaflokkurin vildi hava skuldi vera, áðrenn nakrar samráðingar vóru millum Danmark og Føroyar um framtíðar støðu Føroya – í ella uttanfyri danska ríkið – og eisini áðrenn løgtingið viðgjørdi spurningin um føroyska krónuvirðið, varð útskrivað 17. september 1945. T.e. 10 dagar eftir, at løgtingið – 7. september



Nr. 44 FØROYA SOSIAL-DEMOKRATUR 30. oktober 1945

FISKIMAÐUR!

SKULU TYGUM BYGGJA ELLA KEYPA SKIP (træskip, stór ella smá, skjótreiðlandi nútíðarhákandi fiskifer, lætt meg at hjálpa tygum við teknigum og øðrum spurningum. Eg hev stóran kunnleika viðvíkjandi skipsbygging. Bindið tygum ikki til keyp fyrr enn tygum hava seð mínt tilboð

OLIVER HOLM, PLATANVEJ 5, FREDERIKSSUND

Brævið frá statsministara Buhl,
eitt lógvatak til Føroya fólk.

Hetta er eitt bugvið politiskt dokument ið danska fólkið sendir til Føroyar, og samstundis eitt lógvatak til okkum. Áftandvri tendur ríksdagurin og eitt samleint ministerium. Hollari grundarlag kann eitt demokratiskt ríkt land ikki geva einum skrivi. Og fyri eli menniskjur á hesum eygglum, ið av alvara ynskja og vóna ein heldigan útgang av ti ruðuleika, ið Fólkaflokkins politiska ómegd er við at føra okkum út í, má hetta brev sigast at vera serra væl komið.

Í róligum, vælvaldum orðum tilsigur hetta brev okkum samarbeiði frá danskari síðu og undirteku fyri okkara tjóðskaparligu krevum. Viðari sigur tað at um vit við komandi val vísa at vit vilja leysing frá Danmark, so skal danska fólkið ikki seta seg imóti. Og fyri at prógva sín vilja til at koma okkum á mótí, nevnir brevið í 5 punktum eil tey mál, ið tann føroyska tjóðskaparrørslan hevur arbeitt fyri og positivt gevur tilsagn um stjórnarinnar undirteku. Og brevið endar við at ynskja og vóna at saklig og fordómafri samráðing má føra okkum fram til eitt grundarlag fyri samarbeiði Danmarkar og Føroya millum, sum kann vera til sóma og heiðurs fyri okkum í framtíðini.

Eitt meira fráinnað og vælviljandi skrivi kann valla hugsast frá ti dansku ríkisstjórnini.

Hvat skriva so bløð um hetta brev?

Ja, vit vistu frammanundan hvat Fólkaflokksblaðini fóru at siga. Illgitur, missteinkiliggeran, skavan út yvir sannleikan, og ikki eitt einasta ískligt orð. Tey 5 punkt. ini í brevinum, sum avgjeri ikki er at skilja ørvisi enn eitt samráðing uppskot, ein bendan á hvat vit skulu samráðast um, verður sligið upp í »Tinsnum og »Dagblaðnum» til at vera eitt nýtt tjóður, ið Danskurin vil lokka okkum í. Ikki eitt orð verður sagt um at vit kunnu fáa loysing um vit ynskja tað.

Mr. Richard Long, landsmaður. Tú hevði gjørt eingv beinari í at loyna brevið grundigu og fordómafritt igjegnum og fyri tað fyrsta lært av ti hvussu eitt mentað fólk stillar eitt politiskt skrivi, ti aldri hevur tú vist okkum enn at tú, sum kastar teg upp til at leiðin okkum sum sjálvstødugt ríki, hevur kultur ella evni til at skriva sakliga og sámenligu í politikki. Tín politiska skriving hevur einans verið uppest illgitandi skeidsorð og eyknevn til hegru og vinstu, til eina manninnikan fyri fólk okkara. Av frokunum skal tráðið kennast. Nú bjóðar tú teg fram sum avlovsara fyri Buhl, sum statsberandi fyrisætt. Kennir tú onga ábyrgd fyri at stiga fram sum hansara lítkomaður í politiskum kulturi. Heldur tú, at tann mentaði Føroyingurin dugur ikki at siggja at tú ríður á hákinum í politiskum sólaloysi og at skriving tín virkar forgittandi í ti føroyska fólkalikasinnum?

Og so »Dagblaðsins» pennar. Keyp og ról, endavent søguligt tvætt, illgitan og fávitskt tónatos. Hvi leggjast tit á hetta brevið at skraða sundur beina vegin? Ti tað er tykkum ov tjóðingarmikið ti tað ferir eil verdigan tóna, sum tit ráðast. Hevði tað verið í stil við Th. Petersen og Co's skriv um Danmark undir krigsins hevði tað passað beint. Hevði tað verið eitt politiskt »makverk» í stil við Fólkaflokkins kupp í 1940, við Prikkaldgina, við rýmingina av tingi í ár, við alt tað politiska arbeiði, ið Th. Petersen hevur pikkað sín fingur við, so hevði tað verið óskaðilig. Men hetta, at eitt politiskt skjal av »formatr» kemur deitandi niður í Fólkaflokkins grunnhavdakrógv, er farligt.

Landsmenn. Taið tit nu róliga og sakliga samanbera tann tóna í hesum danska politiska skjalinum, saman við tann tóna ið Richard og »Dagblaðið» føra, siggja tit so ikki munin? Halda tit, at tit við komandi val vilja frásiga tykkum danskan statsborgarrætt imóti at fáa statsborgarrætt í einum stati, har Richard og Thorstein Petersen eru tónaangavandi? Tá vit hava í mínti hvussu Richards og Th. Petersens bløð hava málborið seg um Danmark, og danskt statsumboð her heima, so kundu vit vantað at skrivið frá Danmark var metrkt av hesum, men nei, ikki við einum orði verður tyðað til alt tað ljóta, vit hava gryst eftir teimum. Hvi. Ti soleiðis arbeiða bunir politikkarar, persónig uppgerð, ovarsinni, lógtinggjandi kegl fer ikki innivist. Við øðrum orðum, vit mugu koma til tað óvalt, at hvørki Richard ella Th. Petersen á nakran hátt eru bunir til at føra okkara samlelag, teir riða alt ov lágt sum politikkarar.

Takið ti valdagin klara og greiða støðu og sigið nei fyri at kasta landið í armarnar á hesum politisku kvaksalvarunum og velji Javnaðarmenn á ting, tum vóru við til at bjarga landinum gjegnum kriggsárini, sum vilja taka lógvatak saman við ti danska fólkinum og í samráð og semju við ti, vinna Føroya fólki allar tær sømdir fyri okkara tjóðskaparligu krevum, sum vit til einhvørja tíð sjálvi ynskja og kunnu bera kostnaðin við.

Vit javnaðarmenn hava altíð bæði sagt og skrivað, at vit fáa tað sum vit vilja, statsrættligu, men mótstøðumenn okkara hava misstrúð og mótsagt hesum. Nú hava vit tað svart uppá hvítt sum eitt positivt tilsagn frá ti sameinda danska fólkinum.

Eg takki teimum, ið vardu okkum móti fólkaflokksins lønhøggi.

Tá ið meirlutin í prisansingarráðnum setti útsøluprisirnar á landshandilsvørunum niður sama dagin sum pristalgrótirnir skuldu takast — tann 15. sept. — kendu arbeiðararnir og allir, ið vórðu lønir eftir pristalinum, tað sum ein knýttan neva móti sær. Ætlanin hjá fólkaflokksmonnum í prisansingarráðnum var eitt tað grovasta hegg, ið arbeiðarin hevði verið fyri frá teirri síðu:

Arbeiðarin skuldi missa tann í prinlogini ætlaða bata, ið prislækkanin skuldi bera við sær við, at lønin skuldi standa við um ½ ár aftaná at prisirnir vóru niður farnir.

Vóru prisirnir farnir niður tann 15. sept. tá ið prisirnir skuldu takast at reikna pristalið út eftir, vildu pris- og lønhækking fylgst.

Javnaðarmenn vóru imóti hesum. Teirra maður mótmælti tí í prisansingarráðnum.

Løgtingið — teir 13 — segði prisansingarráðnum, at tingsins ætlan var, at prisnúðursetingin var ætlað at henda líka aftaná tann 15. sept. hvarvið arbeiðararnir vildu fáa tann fyrimun, at prislækkanin ikki vildi virka á lønina fyr enn ½ ár aftaná. Og prisansingarráðið varð biðið at seta dagin fyri prisnúðursetingina aftaná tann 15. sept.

Men meirlutin í prisansingarráðnum við fólkaflokksmannínum Poul Petersen á odda regdi, eil! Prisirnir skuldu fara niður tann 15. og lønirnar skuldu beinanvegin niður tilsvarandi!

So var einki at gera hjá tinginum enn at áleggja anstmannínum at gera prisansingarráðnum vitanar til at lýsa prisnúðursetingina til tann 25. sept. so hon ikki kem at virka á lønirnar tað fyrsta fjórðingsárið.

»Dagblaðið» er eitt í eðini og royndir at verja fólkaflokksins álop á arbeiðararnar.

Men tað kann spurt sær ómakin at royna at villa arbeiðararnar við at biða P. M. Dam og leggja

Løgtingsvalið 6. november 1945 var rættiliga avgerandi. Tað vistu føroyingar og tað vistu danskir politikarar. So avgerandi, at 24. oktober lat danski forsætisráðharrin Vilhelm Buhl (1881-1954) prenta eitt opið brev til føroyingar í teimum føroysku bløðunum, har hann vísti á, hvat danska stjórnin bjóðaði føroyingum, um so var, at teir valdu eina nýskipan innanfyri danska grundlógarøkið – økt rættindi til flaggið og føroyskt mál og peningastuðul til at útbyggja føroyska samfelagið fyri. Buhlsbrevið kallað, varð av Fólkaflokkinum mett at vera ein stuðul til samríkjaflokkarnar, meðan brevið varð vel móttikið av samríkjaflokkunum. Dagblaðið helt, at tað er „ein løgin vegur at fáa Føroya fólks greiðu støðu á, tá føroyingar verða bidnir um at taka støðu til tilboð um fremmandar pengar“.

uttan luttøku av Fólkaflokkinum, sum í august varð rýmdur av løgtingi – við 13 av 25 atkvøðum hevði samtykt, at føroyska og danska krónan aftur skuldu hava sama virði. Politiska ósemjan í Føroyum um framtíðarstøðu Føroya var stór, og spenningurin í løgtinginum var so stórur, at tað í veruleikanum – um ikki í meginregluni – var óarbeiðsført, tá ið krónumálið varð viðgjørt. Spenningurin var so stórur, at dagin eftir at løgtingsvalið varð útskrivað, t.e. 18. september í 1945, hoyrdist ein ógvuslig spreinging um alla Havnina.

Samanhangurin við ta spentu politisku støðuna í Føroyum við endan á krígnum tykist greiður (Sølvará 2016, 142 og 2021, 18), men spurningurin er, hvør hesin samanhangur meira ítøkiliga var, og um bumbuatsóknin varð fyriskipað av politiskum bólkum ella einans var eitt einstakt álop á tinghúsið frá einstøkum persónum.

EIN BUMBA BRESTUR VIÐ LØGTINGSHÚSIÐ

Løgtingið kom í 1945 eins og undanfarin ár saman fyri at viðgera ymisk mál. Tað heilt serliga hetta árið var, at undanfarnu fimm tingseturnar høvdu Føroyar verið hersettar av bretum, meðan Danmark hevði verið hersett av Týsklandi. Nú vóru Føroyar og Danmark ikki longur hersett, heimskríggið var liðugt og londini vóru aftur frels. Meirilutin av løgtinginum var í ólavsøkusetuni 1945 farin at fyrireika sameiningina við Danmark, og onkrar avgerðir vórðu samtyktar hesum viðvíkjandi, áðrenn løgtingið fór heim 15. september. Friður hevði lagt seg yvir løgtingið og løgtingsarbeiðið, nú ólavsøkutingsetan 1945 varð slitin 15. september.

Heilt friðarligt var tað kortini ikki, hóast ólavsøkutingsetan var liðug.

Týsnáttina tann 18. september 1945, klokkan fimm minuttir í eitt, hoyrdist ein ógvuslig spreinging víða um í Havnini. Talan var um eina bumbu, sum sprongdist við útnyrðingshornið á løgtingshúsinum.

Í løgtingssalinum hanga tvær bringumyndir av donskum kongum á bróstinum á vestursíðuni, har bumban brast 18. september 1945. Hendan myndin er helst frá tí tíðini, tá ið Christian Bærentsen (1862-1944) var amtmaður og løgtingsformaður (1897-1911), men báðar bringumyndirnar á vegginum, sum duttu niður, eru tær somu – av Fríðrikki VII og Christiani IX. Harumframt hekk í 1945 ein triðja bringumynd á vegginum av Fríðrikki VIII, sum eisini datt niður. Bringumyndin av Christian X er ikki komin upp, men í 1945 stóð hon á eini hyll uppi yvir formansstólinum á vegginum suðureftir, sum sæst beint fyri á hesi myndini.



BOMBEATTENTATET

PAA

LAGTINGSHUSET

For Oplysninger, der fører til Opklaring af Bombeattentatet, udloves

en Ducør paa indtil 5000 Kr.

Der tilsiges streng Hemmeligholdelse af Navnene paa enhver, der giver Oplysninger.

Landfogeden (Politimesteren) paa Færøerne,

den 18. September 1945.

Vagn-Hansen.

kst.

Ein stór peningaupphædd varð latin til tann ella tey, sum kundu lata fútanum upplýsingar, sum kundu føra til, at bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum varð uppklárað, soleiðis at tann ella tey seku vórðu handtikin. 5.000 krónur í 1945 hevur verið ein stór upphædd, sum svarar til umleið 100.000 krónur í dagsins peningi. Originala plakatin er á Tjóðskjalasavninum, sum hevur brúkt hana í sambandi við almennar framsýningar.

Spreingingin var sambært *Tingakrossi* so ógvuslig, at hol varð sprongt á grundina, og løgtingshúsið lætti sær sambært blaðnum á (*Tingakrossur* 19.9.1945). Nógvir rútar á vestursíðuni á løgtingshúsinum brotnaðu, og træverkið rundan um vindeyguni fekk stóran skaða. *Tímin* upplýsti hinvegin, at „Inni í sjálvum Tinghúsinum var skaðin ikki so nógvur“ (*Tímin* 20. 9.1945). Bringumyndir í løgtingssalinum av Fríðrikki VII (1808-1863), Fríðrikki VIII (1843-1912) og Christiani IX (1818-1906) duttu á gólv og fóru í sor, men sum eitt undur varð bringumyndin av Christiani X (1870-1947) standandi eftir á hyll síni uppi yvir formansstólinum. Eingin av málningunum inni í løgtingshúsinum fekk nakran skaða, men ein var komin at hanga nakað skeivur. Einki annað verður nevnt. Rútarnir fóru hinvegin eisini í sor langt frá løgtingshúsinum. Á eystaru síðu á kommunuskúlanum fóru allir rútarnir í sor. Teir flestu rútarnir í niðara enda á telefonstøðini brotnaðu. Á posthúsinum brotnaðu allir teir stóru rútarnir, og í sparikassanum og í meinigheitshúsinum brotnaðu eisini rútar. Í Tórsgøtu brotnaðu teir stóru rútarnir í Zacharias Heinesens handli. Inni í húsum tætt við løgtingshúsið fór nógv um koll, brotnaði og myndir duttu niður av bróstinum. *Tingakrossur*, politiska málgagn Sjálvstýrisfloksins, ivaðist ikki í, at talan var um eina politiska atsókn, og blaðið tók frástøðu. Tað

gjørdu eisini onnur bløð í Føroyum, men politiskt tók kjak seg nú upp um, hvør stóð aftanfyri atsóknina.

Týskvøldið vórðu plakatir hongdar upp við boðum frá C. A. Vagn-Hansen um, at ein upphædd upp til 5.000 krónur varð latin til tann ella tey, sum kundu koma við upplýsingum, sum førdu til, at hetta bumbumálið varð uppklárað (*Dagblaðið* 21.9.1945), men sambært Kristiani Djurhuus, Suðuroyar sýslumanni, var tað eingin, sum vendi sær til løgregluna við nøkrum viðkomandi upplýsingum (Djurhuus 1962-1966, 867).

Eisini *Dagblaðið*, politiska málgagn Fólkafloksins, tók frástøðu frá atsóknini og kallaði eins og *Tingakrossur* bumbuatsóknina fyri eina „beistagerð".

Øll tey føroysku bløðini tóku frástøðu frá hendingini, men tað tykist týðiligt, at sambandsbløðini, serliga *Dimmalætting*, málgagn Sambandsfloksins, hevði hug til at geva loysingarrørsluni ábyrgdina av atsóknini.

Tíðindini um bumbuspreingingina breiddust eisini út um føroysku landoddarnar, og politiskar skuldsetingar vóru settar fram í Føroyum um, hvør stóð aftanfyri. *Tímin*, sum varð málgagnið hjá Føroya Framburðsfelag, upplýsti 27. september 1945, at fríggjakvøldið (t.e. 21. september) hevði svenska útvarpið sagt soleiðis frá um bumbuatsóknina móti tinghúsinum: „Från Thorshavn pa Færøarna meddelats, at forsøk på att spränga Parlamentsbygnaden i Luften udførtst av misnøjda elementen tilhørande det färøske självstyreparliet." (sí *Tímin* 27.9.1945). Her tykist heldur ósannlíkt verða sipað til tann meira hóvliga Sjálvstýrisflokkin, sum einki umboð hevði havt í løgtinginum síðan 1943 – tað tykist nógv meira sannlíkt, at svenska útvarpið hugsaði um Fólkaflokkin ella sjálvstýrisrørsluna yvirhøvur. Í *Tímanum* 4. oktober 1945 varð tikið soleiðis til um tey somu svensku tíðindini, men hesaferð varð lagt afturat í mun til fyrru frásøgnini: „Fáar dagar aftaná spreingingina sendi Stockholm radio út, at tað vóru „misnøjda elementen tilhørande självstyrepartiet",

FØROYA AMTS BOKASAVN
TÓRSHAVN

TINGAKROSSUR

FØROYA SJÁLVSTÝRISBLAÐ

Nr. 39. Mikudagin 19. septbr. 1945 45. árg.

BUMBA LØGD UNDIR LØGTINGSHÚSIÐ

EIN BEISTAGERÐ

Stórur skaði, nógvir rútir brotnir.

Bresturin hoyrdist kl. 1 týsnáttina.

Tað ljóðað sum ein hvellur minubrestur; so øll Havnin vaknaði úr svevni, tá ein bumba brast undir útnyrðingshornínum av tinghúsinum í gjáranáttina.

Bumban sló hol inn gjegnum grundina og hevur lætt tinghúsinum á. Allir rútirnir á vestaru síðu fóru, og lonanfyri duttu niður á gólvið bustirnar av Friðriki kongi VII, Kristiani kongi IX og Friðriki kongi VIII og smyldraðust sundur. Sum við eitt undur var bustan av kongi okkara Kristiari X standandi eftir á kyll sini yvir formannspallinum.

Á eystaru síðu í kommunuskúlanum brotnaðu øllir rútirnir, serliga illa fór húsið hjá Isak Joensen og har helst handilsvindeyguni hjá firmainum Ludvig Poulsen. Tey flestu vindeyguni í niðara enda á telefonstøðini fóru. Á posthúsinum fóru tey stóru videyguni; í Sparikassanum og í Meinigheitshúsinum brotnaðu eisini rútar, og enntá móti Tórsgetu fóru teir stóru rútirnir í Z. Heinesens handil. Inni í húsum nærindis Tinghúsinum datt nógv um koll, nógv brotnaði, og bilæt duttu niður av bróstinum.

Líkindi eru til, at personurin sum hevur lagt bumbuna, er komin frá norðara enda av tinghúsinum og hevur ikki torað longur enn um útnyrðingshornið á húsinum, við tað at ein lyki brendi á Vaglinum, sum gjerdi vestaru síðu á tinghúsinum ljósa. Har hevur hann lagt bumbuna, man hava tendrað fjúsið og er rýmdur.

Tinghúsið var standandi.

At henda beistagerðin hevur politiska bakgrund, kann eingin ivi vera um. Hvi skuldi bumban annars verið løgd inn at tinghúsinum?

Tinghúsið stóð hrestin av, og Føroya fólk eigur eisini at standa tann brestin av, sum ætlaður er fyri at endavenda øllum her á landi.

Føroyingar!

Reisið lykkum nú móti li brutala mentalitetinum, sum er við ei drepa hina føroyska fólkasálina og føroyingar sum fólk.

Hann ger brátt øllum føroyingum fyri skemmum.

SEÐILBANKIN OG HANDILSSKAPUR

Tá Th. Petersen kom í neyð av pundvirðinum 19.34, rópti hann út í »Dagblaðnum« at nú skuldu Føroyar hava egnan seðilbanka, og grundarlagið undir bankanum skuldi verða pund. Føroyar skuldu alto fáa pundvaluta umroknað í krónur, og krónuseðlarnar skulu vit sjálvir prenta. Harvið vunnu Føroyar:

Fyrst allar krónuseðlarnar, sum føroyingar missa burtur.

Síðan rentuna av pundunum, ið standa sum mótvirði móti krónum.

Við øðrum orðum: Tá vit fáa egnan seðilbanka, vil tað verða ein nationalekonomiskur vinningur at bróka peningaseðlar at kyka ella festa sær í við — tað sigur Th. Petersen, og so má tað vera rætt.

So sigur maðurin eisini, at tryggingin aftanfyri Teðilgerðina, pundini, skulu geva nógva rentu av sær. Við øðrum orðum: tryggingin aftanfyri pundini skal út í resiko fyri at vinna pening — men hvar er so tryggingin?

Jú, hon er just har, sum pundini hjá Sjóvinnubankanum umroknað í krónur vóru aftand kurskyfnd.

Soleiðis vil tað ganga øllum, sum fara út á »Vildene Veje«.

Ab, teir pengar, Thorstein Petersen fær út av pundunum, sum amtmaðurin hevur keypt frá føroyingum: 10—11 miljónir.

Sjálvur misti hann yvir eina miljón av teim pundum, hann hevði keypt til Sjóvinnubankan.

At stovna seðilbanka í Føroyum fyri at fjala eitt mistak í peningamálum, sum Th. Petersen hevur gjørt, fer ikki at bera til.

Tá Føroyar undir krignum fóru inn í sterlingblokkin, mótmælti fólkaflokkurin og kravdi frihandil. Nú vil fólkaflokkurin binda allan okkara handil til Bretlands, so har verður ikki til at koma uttanum.

Vit ynskja stóran handil við Bretland, men tað skal tó máti vera við. Vit ynskja ikki at verða bundnir.

Vit ynskja eisini frían handil upp á Bretland sjálvt, t. v. s., vit vilja hava loyvi til at velja okkum tey handilssambond í sjálvum Bretlandi, sum vit halda vera okkum hentast.

Her í Føroyum ganga menn og erpa sær av, at tað er eydnast teimum at fáa Bretland til at leggja á okkum handilsband. Tað er eisini nakað at erpa sær av.

Bretland hevur verið frihandisland og gjegnum friar tingingar og avtalur kundu vit lagt handil okkara við Bretland í lego.

Men nú hevur Sjóvinnubankin ovtið seg í pundum, og tað skal so avgera spurningin um føroyskan seðilbanka og um allan okkara handil við útheimin.

I øllum hesum peningamálsvevjinum, sum fáur skilir, verður hin føroyski stjórnarmálspurningurin gloymdur, nú ið mest umræður. Hetta skal vera ramur føroyskur sjálvstýrispolitikkur.

— Okkara klippfiskaselu í suðurlondum vilja danir eisini kanna sær, sigur Th. Petersen. Latum okkum ikki tala ov nógv um tað.

Hvat var mótvirðið úr suðurlondum móti okkara klippfiskselu har? Tað var frukt, mest appelsinir og sitrónir, nógv meira enn vit føroyingar kundu eta. Danir ótu meginpartin av ti.

Hatta dømi visir best, hvussu neyðugt eitt samarbeiði í handilskapi er.

Men Th. Petersen, sum tann bluffarin hann er, sipar hetta út sum eitt dømi um, hvussu danir vilja tæna alt frá okkum.

Kennir Th. Petersen ævintýrið um glóðina, sum skuldi ganga yvir um ánna eftir einum hálmstrá? men tá hon kom mitt á leið, brendi hon stráið av, datt í ánna og segði: »Puff«. So var hon ikki glóð meira.

Seðilbankin er hálmstráið hjá Th. Petersen.

J. Patursson biður amtmannin um hús.

Teir 12 tingmennirnir, sum rýmdir eru av tingi, hava biðið formann sín fingið tingingar í lag við teir 13, sum innantings eru, um løgtingsval.

Fyrst býður fólkaflokksformaðurin teim 13 á løgtingsskrivstovuna. Nei! hinir kunna koma í tingið.

So biður hann amtmannin um hús. Gaman í, sigur amtmaðurin, tit eru væl komnir. Nei, teir 13 vilja ikki til amtmannin. Hinir kunna koma í tingið.

Løgtingsformaður Chr. Djurhuus setti fram hesar treytir fyri at uppfaka tingingar:

»Fyri at tann tilætlaða samráðing kann koma í lag, má J. Patursson:

1) ásanna, at teir 12 løgtingsmenn sum rýmdu av tinginum og nú hava verið burtur í longri tíð, hava handlað óregluligt,

2) at teir 13 tingmenn, sum blivu eftir á tingi, eiga fullan parlamenteriskan rætt til at halda ting, og at tað, sum avgjørt verður við 13 atkvæðum, er lógliga samtykt,

3. og at tær av J. Patursson ætlaðu samráðingar fara fram á løgtingi«.

Nei, ongar tingingar taka teir 12 upp undir slíkum treytum. Rýmingarnir koma ikki aftur á ting.

Nú er eftir bert hjá Føroya fólki við komandi val at lata teir vera uttantings við alla.

Hesum politiska siðaloysinum eigur Føroya fólk nú at sleppa sær burtur úr.

Tey føroysku bløðini skrivaðu nakað um málið fyrstu dagarnar, men áhugin fyri málinum minkaði skjótt. Her er ein av einans heilt fáum forsíðugreinum í føroyskum bløðum um bumbuspreingingina við løgtingshúsið.

sum høvdu roynt at sprongt Tinghúsið í luftina við tí endamáli at vinna atkvøður á komandi løgtingsvali. Hesi tíðindi eru komin frá Reuter, og blaðstjóri Dimmalættingar, G. Lindenskov-Samuelsen, er teirra tíðindamaður her saman við Sverra Patursson. – Opinlýst hevur blaðskrivari á Dimmalætting, Eiden Müller, sent telegram til Politiken, har hann sigur: „Det kan ikke være Tvivl om at Motivet er af politisk Karakter, da der forud er gaaet en voldsom Kampagne og Demonstrationer fra Løsrivelsesside mod Sambandspartiet."" (*Tímin* 4.10.1945). Georg Lindenskov Samuelsen (1910-1997) avsannaði í *Dimmalætting* 6. oktober (*Dimmalætting* 6.10.1945), at hann skuldi havt sent nakað líknandi fjarrit til *Reuter* ella nakran í Danmark, Svøríki ella nakra aðrastaðni, men tað tykist greitt, at í Føroyum vóru onkur skjótt farin at gita og skuldseta onnur fyri at hava ábyrgdina av bumbuni. Eg havi ikki lagt merki til nakra tílíka avsannan frá Eiden Müller í føroysku bløðunum.

Nógv meira fæst ikki burtur úr teimum føroysku bløðunum um hesa atsóknina móti løgtingshúsinum, men onkur onnur tíðindi eru kortini eisini viðkomandi fyri at lýsa spentu støðuna í Føroyum, eftir at tingmanning Fólkafloksins rýmdi úr løgtinginum. Í *Tímanum* varð sagt frá einum rættarmáli, sum fyribils setti fútin, C. A. Vagn-Hansen, hevði reist móti keypmanninum Andriasi Ziska. Andrias Ziska hevði í sambandi við, at tey 12 fólkafloksumboðini 23. august 1945 rýmdu úr løgtinginum, fleiri ferðir verið í løgtinginum rópt „quislingur og landsforredarar" eftir teimum 13 sambands- og javnaðartingfólkunum, sum sótu eftir í løgtinginum. Andrias Ziska játtaði, at hann hevði brúkt hesi orðini, og hann vardi gerðirnar og orðini hjá sær. Verjin hjá Andriasi Ziska upplýsti, at hetta var ikki nakað eindømi, og at eingin hevði talað at, tá Andras Samuelsen (1873-1954) úr Sambandsflokkinum 1. desember í 1942 hevði skýrt síni egnu politisku mótstøðufólk, fólkafloksfólk og Thorstein Petersen, at vera „reindyrkaðir landsforredarir". Andrias Ziska, sum, tá ið bretar fyrst í apríl 1940 hersettu Føroyar, einsamallur hevði mótmælt hersetingini, fekk 60 dagar hefti fyri at hava brotið tingfriðin og fyri at hava verið ov opinskáraður í løgtingssalinum (*Tímin* 13.9.1945 og *14. September* 30.10.1947). Dómurin í Føroya Rætti varð feldur 12. september 1945 – einans seks dagar áðrenn bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum. Hetta málið kann skiljast sum eitt av fleiri dømum um, hvussu djúpar tær politisku gjáirnar millum føroysku samríkjafólkini og eina í gjøgnum krígsárini rættiliga nógv styrkta føroyska loysingarrørslu vóru blivnar. Akkurát hetta rættarmálið móti Andriasi Ziska sipaði eisini beinleiðis til tær politiskt rættiliga umstríddu hendingarnar í tinginum í sambandi við krónustríðið í 1945, tá Fólkaflokkurin rýmdi úr tinginum.

Løgreglan kannaði bumbumálið gjølla í døgunum eftir atsóknina móti løgtingshúsinum, og løgreglufólkini avhoyrdu rættuliga nógv fólk í Havn. Tá bumban brast náttina til 18. september stutt fyri klokkan 01, vóru eingi fólk inni í løgtingshúsinum, men tað var kent, at fýra javnaðarfólk høvdu verið uppi á loftinum inni í løgtinginum nakað framman undan bumbuspreingingina. Javnaðartingmenninir Petur Mohr Dam, hann var floksformaður, og Johan Pauli Andrias Henriksen (1902-1980), hann var borgarstjóri í Havn í nógv ár, m.a. í 1944-1948, vóru saman við Magnusi Tórsheim (1905-1986) og Poul Karbech Mouritsen (1904-1969) inni í løgtinginum til umleið klokkan 23.55, t.e. til umleið ein tíma áðrenn bumban brast. Teir høvdu fundast í flokshølinum hjá Javnaðarflokkinum uppi á loftinum í løgtingshúsinum. Tað var tí ikki óhugsandi, at tann ella tey fólkini, sum løgdu bumbuna við løgtingshúsið, kundu hava havt í hyggju at gera seg inn á teir fýra javnaðarmenninar, sum høvdu sitið á fundi í løgtingshúsinum seint hetta kvøldið. Í samtíðarkeldum tykist tó ikki nógv at vera gjørt við hetta sjónarmiðið, men síðani er tað ofta nevnt av politiskum viðmerkjarum.

Jenny Jacobsen, sum vaskaði í løgtinginum, hevði verið í húsinum frá klokkan 20.30 til 21.30. Ljós var uppi á loftinum, og hon hoyrdi, at fólk vóru har. Meðan hon var har, kom ein maður, sum seinni varð eyðmerktur at vera Gutti Fossadal, keypmaður úr Haldórsvík, inn og spurdi eftir Peturi Mohr Dam. Hann fór uppá loftið, men hon sá

Løgtingshúsið mitt fyri. Høgrumegin tinghúsið fremst á myndini er Havnar Klubbi, meðan Telefonstøðin er vinstrumegin tinghúsið. Vinstrumegin Telefonstøðina, niðanfyri Tinghúsvegin, er húsið hjá Andriasi Ziska.

hann ikki fara út aftur úr løgtinginum. Annars hevði Jenny ikki sæð nakran í løgtingshúsinum.

Tá teir fýra javnaðarmennirnir umleið klokkan 23.55 fóru úr løgtinginum, fóru teir sum frá leið hvør til sítt. Áðrenn teir fóru, sløktu teir øll ljósini í løgtinginum og stongdu hurðina. Poul Karbech Mouritsen fór niðaneftir og framvið klubbanum og síðani heim (í Snikkarastovu, har hann búði), meðan hinir tríggir fóru oman í býin. Poul Karbech Mourtisen sá bert Thomas Nygaard og Christian Haraldsen á veg heim. Johan Pauli Andrias Henriksen fór frá hinum trimum við Hotel Djurhuus og út á Reyn, har hann búði, meðan

Petur Mohr Dam og Magnus Tórsheim fóru eftir Skansavegnum og gingu yvir móti prentsmiðjuni hjá Arnold Øster (1909-1987) í Jónas Broncks gøtu eftir nøkrum prentaðum bløðum. Á leiðini frá løgtinginum, við Hotel Djurhuus, – har matstovan Áarstova er í dag – høvdu teir hitt Preben Ziska (1922-2001), Christian Paula (Palla) Ziska (1916-2003) og ein ungan ónevndan mann, sum vóru á veg niðan eftir Áarvegnum. Frá prentsmiðjuni hjá Arnoldi Øster fóru teir gjøgnum „Viadukten“ og oman á bryggjuna, har Petur Mohr Dam hevði ørindi við bløðunum umborð á skipið M/K *Hamranes*, sum lá við bryggju og skuldi til Íslands. Haðani fóru teir beinleiðis eftir bryggjuni og niðan á Káta Hornið, og haðani gingu teir víðari til húsið hjá Mikkjal Paula Jacobsen (1890-1954), sum var svágur Petur Mohr Dam, í Dr. Jakobsens gøtu, har Petur Mohr Dam búði, tá hann var norðuri í Havn. Petur Mohr Dam var ikki komin í songina, tá hann hoyrdi eina spreinging, sum svágurin helt stavaði frá eini minu. Magnus Tórsheim, sum saman við Poul Karbech Mouritsen, Peturi Mohr Dam og Johan Paula Andrias Henriksen hevur greitt frá hesum hendingum fyri løgregluni, gekk síðan einsamallur heim – út í Grønland, har hann búði. Á vegnum heim, tá ið hann kom framvið húsinum hjá Chr. Christiansen, hevði hann sæð Joen Christiansen standa á trappuni. Ein ókendur maður stóð við síðuna av trappuni. Tá hann kom út í Grønland, hoyrdi hann spreingingina, ið hann gekk út frá stavaði frá eini minu.

Spurningurin var, hvør ella hvørji høvdu lagt og sprongt bumbuna við løgtingshúsið og hvørji motivini vóru?

LØGREGLAN KANNAR MÁLIÐ

Løgreglan gjørdi eitt stórt arbeiði fyri at kanna og avdúka málið um bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum. Rættiliga nógv fólk vórðu avhoyrd dagin eftir og í døgunum eftir spreingingina. Komandi kapitlarnir byggja, eins og nevndu frágreiðingar hjá Peturi Mohr Dam, Johan Paula Andrias Henriksen, Poul Karbech Mouritsen og Magnusi Tórsheim, tá ið ikki verður víst til annað, á tað avgerandi samtíðar keldutilfarið hjá løgregluni – Fútanum og Suðuroyar Sýslumanni – á Tjóðskjalasavninum (*Bombeattentatet mod Lagtingshuset 18/9-1945* og *Bombeattentatet mod tinghuset*). Í øðrum førum verður víst til keldutilfar og bókmentir inni í tekstinum.

Ein ávísur illgruni fall millum fólk skjótt á Ziska familjuna, men tað er sambært keldum eitt sindur ivasamt, um hetta var meint í álvara ella um talan einans var um nakað, sum fólk skemtaðu sær við, tí Ziska fólkini vóru alment kend fyri at vera í andstøðu til løgtingsmeirilutan, sum Andrias Ziska legði undir at vera „quislingar“. Karl Mouritsen (1910-1989) – beiggi Poul Karbech Mouritsen, sum var í løgtinginum saman við m.ø. Peturi Mohr Dam umleið ein tíma


FÆRØERNES POLITIKREDS

Formodningsbar Efterforskning

~~Tiltaltes Navn:~~ Bombeattentat mod Tinghuset

Forseelse:

Straffesag Nr. 53 /1945

Á Tjóðskjalasavninum í Havn er nógv samtíðarkeldutilfar hjá løgregluni og hjá Suðuroyar sýslumanni um bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum 18. september 1945. Her sæst ein skjalapakki um málið í savninum hjá fútanum. Tað sæst, at revsimálið hjá fútanum hevur fingið heitið „Bombeattentatet mod Tinghuset", sum bumbumálið eisini verður nevnt í øllum øðrum samtíðarkeldum, eisini í teimum føroysku bløðunum.

framman undan bumbuspreingingina – upplýsti beint eftir bumbuspreingingina fyri løgregluni, at ein av Ziska brøðrunum, sum tó ikki verður navngivin, sama dag sum bumban brast ella nakrar fáar dagar frammanundan, hevði fylgt aftaná – t.e. „skygget" – Petur Mohr Dam frá løgtinginum til bryggjuna og heim. Tað skuldi Poul Karbech Mouritsen havt upplýst fyri Karl Mouritsen. Sambært Villy Juul var Marius Ziska (1918-1971), sum arbeiddi í H. N. Jacobsens Bókahandli saman við honum, longu morgunin eftir, klokkan 9.30, argur inn á Poul Karbech Mouritsen, sum skuldi havt sett Ziska familjuna í samband við bumbuspreingingina. Tá løgreglan setti seg í samband við Poul Karbech Mouritsen, sýtti hann kortini fyri, at hann skuldi havt sett spreingingina í samband við tey hjá Ziska. Hann sýtti eisini fyri, at hann kendi nakað til bumbuatsóknina ella at hann skuldi havt hoyrt nakran siga „at der snart vilde ske noget", sum tað sambært høpinum tykist hava verið lagt upp til mótvegis løgregluni. Her liggur helst onkur munnlig samtíðarfrásøgn – vanligt prát millum fólk – aftanfyri, sum ikki sæst í tí skrivliga samtíðarkeldutilfarinum hjá løgregluni, og vit kenna heldur ikki rætta samanhangin. Karl Johan Poulsen (1919-1994) upplýsti fyri løgregluni, at hann einki hevði hoyrt um, at Ziska brøðurnir høvdu nakað við bumbumálið at gera, men hann hevði møguliga dagin eftir í „spøg" sagt við Marius Ziska, at hann (Marius) helst stóð aftanfyri, men tað var einans skemt. Sólrun Árting (1926-2014) upplýsti, at hon hevði hoyrt frá onkrum, – mintist ikki hvørjum – at Ziska brøðurnir „blev beskyldt for Attentatet". Sólrun Árting hevði tó onga vitan um tað, men hon hevði kanska sagt tað við onkur onnur eisini. Jens Christian Cornelius Askildsen (1927-1989) hevði hoyrt fólk siga, at tað kundu vera „ivrige personer" sum Kjartan Mohr (1899-1979) og Andrias Ziska, men hann visti einki um tað. Elsa Hansen (1927), sum arbeiddi saman við Mariusi Ziska í H. N. Jacobsen Bókahandli, upplýsti, at hon argaði hann við, at hann hevði lagt bumbuna, men hetta var heldur ikki meint sum nakað annað enn skemt. Ásbjørn Poulsen (1915-1988) upplýsti fyri løgregluni, at hann kendi Ziska familjuna, – hann hoyrdi til sama

politiska vong sum tey – men hann kendi einki til, at nakar í bólkinum hevði umrøtt ætlanir um at fremja politisk mál við harðskapi.

Annars svaraðu øll, eisini tey, sum skuldu havt sett orð á onkran illgruna móti navngivnum fólkum, familjum ella politiskum flokkum, at tey ikki vistu nakað um, hvør stóð aftanfyri bumbuspreingingina. Tað er eisini møguligt, at vitnini ikki upplýstu løgregluna um alt.

Hetta er alt tað, sum stendur í løgreglufrágreiðingunum, sum kann benda á, at onkur í Ziska familjuni stóð aftanfyri, men sum sæst er einans talan um leyst prát, sum onkur hevði hoyrt frá onkrum, sum gitti okkurt. Leyst prát millum fólk í Havn beint eftir spreingingina. Eingi høvdu sjálvi sað nakað ella havt nakran illgruna til nakran í Ziska familjuni – talan tykist bara vera um „spøg“ millum fólk í Havn, ið kendu Ziska familjuna og politisku sjónarmiðini hjá teimum. Í øllum førum vóru tað eingi, sum mótvegis løgregluni vildu vátta, at tey høvdu sagt ella meint nakað annað enn „spøg“ við sínum orðingum til onnur havnarfólk eftir hendingina. At tílíkar orðingar sambært frágreiðingunum hjá løgregluni onkuntíð vórðu sagdar beinleiðis við onkran í Ziska familjuni kundi bent á, at nógv var ikki annað enn skemt. Tó so, skemt ella álvara, so kundi hetta í sambandi við kanningarnar hjá løgregluni gerast tyngjandi. Johan Ziska (1911-2004), beiggi Marius Ziska, upplýsti fyri løgregluni, at hann eftir spreingingina hevði hildið tað vera neyðugt at venda sær til eitt løgreglufólk fyri at reinsa umdømið hjá sær og brødrum sínum, „fordi Folk fortæller, at Attentatet kan sættes i Forbindelse med os“. Av nevndu løgreglufrágreiðing sæst eisini, at Johan Ziska „anmoder om at faa tilført Rapporten, at to af Socialdemokraterne i Lagtinget nemlig P. M. Dam og P. Henriksen samt Poul K. Mouritsen og Magnus Tórsheim havde været til Møde i Lagtingsbygningen saa sent som kun nogle faa Minutter før Eksplosionen indtraf til ca. 10 Minutter før Kl. 1.“ – tað rætta tíðarbilið millum báðar hendingarnar er umleið ein tíma – „Kpt. finder det derfor mærkeligt, at disse Personer særlig Poul Karbech Mouritsen skal have foraarsaget det Rygte sat i Omløb, at det er Kpt. og hans Brødre, der har forøvet Attentatet“. Tað er tí ikki óhugsandi, at søgurnar, sum hava ferðast millum fólk í Havn, hava havt eitt annað og kanska meira avgjørt og álvarsamt innihald enn tær, sum hesi somu fólk sjálvi hava vilja viðgingið mótvegis myndugleika og løgreglu. Hetta er eitt fyrivarni, sum neyðugt er at hava í huga í sambandi við tulking av vitnisfrágreiðingunum hjá løgregluni.

Í hesum førinum er tað kortini greitt, at søgan, sum Johan Ziska fortelur, neyvan hevur hald í veruleikanum.

Tað er ikki greitt, hvaðani Johan Ziska hevði ivasomu søguna um, at teir fýra javnaðarmenninir vóru í løgtingshúsinum til einans nakrar fáar minuttir áðrenn bumban brast, men óbeinleiðis tykist hann við hesi søguni benda á, at bumbumaðurin við atsóknini kundi havt í hyggju at skaða javnaðarfólkini í løgtinginum. Í samtíðarkeldunum er tað bara eingin annar, sum nevnir hetta fyri løgregluni – heldur ikki javnaðarmenninir, sum vóru farnir úr løgtingshúsinum ein tíma áðrenn bumban brast. Óivað ætlaði Johan Ziska einans at vísa løgreglufólkunum á, at javnaðarmenninir inni í løgtinginum illa kundu vita nakað um, hvør ella hvørji høvdu lagt bumbuna, teir gittu bara, men samstundis váttaði hann óbeinleiðis, at javnaðarmenninir – serliga Poul Karbech Mouritsen – skuldu havt sett hesa skuldsetingina móti Ziska brøðrunum fram. Tað tykist hinvegin rættiliga ósannlíkt, at Johan Ziska skuldi havt orðað seg soleiðis fyri løgregluni, um hann sjálvur – ella onkur, sum stóð honum nær – kendi seg sekan í ella var sekur í bumbuatsóknini móti løgtingshúsinum. Tá Johan Ziska orðaði seg soleiðis fyri løgregluni, – at bumbumaðurin veruliga kundi havt rakt javnaðarmennirnar – so kann grundin illa vera onnur enn, at Johan Ziska var ósekur og ongan illgruna hevði til brøðurnar. Hann tykist hava fortalt søguna fyri løgregluni við tí eina endamáli at sáa iva um tað, sum Poul Karbech Mouritsen skuldi havt sagt um, at Ziska brøðurnir stóðu aftanfyri bumbuatsóknini, meðan hann ikki tykist hava havt bumbumannin í hugsanunum. Hendan søgan hjá Johan Ziska tykist vera sera ivasom. Tað er møguligt, at Poul Karbech Mouritsen – hóast hann ikki vildi viðurkenna tað fyri løgregluni – í práti hevði skuldsett Ziska brøðurnar fyri at standa



Í sambandi við kanningararbeiðið fekk fútin gjørt eitt kort yvir vegir og hús í miðbýnum í Havn. Húsið hjá Andriasi Ziska sæst á horninum við Sverrisgøtu og Tinghúsvegin, stutt frá løgtingshúsinum. Tað sæst eisini, at Havnará enn var opin, soleiðis at tað ikki hevur borið væl til at fara beina leið frá løgtingshúsinum og niðan eftir Niels Finsens gøtu. Neyðugt hevur verið fyrst at fara ein umveg oman á Vaglið. Annars var nærmasta brúgv tvørtur um Havnará niðaneftir frá Niels Finsens gøtu á Káta Horninum eftir Sverrisgøtu.

aftanfyri bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum, men tað er ikki rætt, at teir fýra javnaðarmenninir vóru í løgtinginum til einans nakrar fáar minuttir áðrenn bumban brast uttanfyri tingið.

Leggjast skal afturat, at tilfarið hjá løgregluni eisini hevur upplýsingar, sum leggja illgrunan aðrar vegir enn á Ziska familjuna. Arthur Juul Rasmussen (1904-1963) hevði sambært teimum óprentaðu endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus frá umleið 1962-1966 longu 18. september 1945 upplýst fyri Kristiani Djurhuus, „at han vidste, hvem der havde forøvet attentatet“ (Djurhuus 1962-1966, 867). Hansara upplýsingar høvdu tó sambært Kristiani Djurhuus lítið virði. Kristian Djurhuus nevndi í hesum sambandi heldur eingi nøvn, men hann upplýsti, at Arthur Juul Rasmussen hevði nevnt nøvn. Sambært váttaðu frágreiðingini hjá Arthur Juul Rasmussen fyri løgregluni 19. september 1945 upplýsti hann bert, at „Jeg ved ikke, hvem der har forøvet Attentatet, men formoder, at det maa være foranlediget af Folkeflokken, fordi denne lover saa meget“.

Eisini Dánjal Fríðrikkur á Krákusteini (1921-1995) upplýsti í frágreiðing síni fyri løgregluni, at onkur hevði lagt Fólkaflokkin undir at standa aftanfyri. Tílíkar útsagnir tykjast kortini neyvan vera so nógv annað enn politisk grundað sjónarmið millum fólk. Sum nevnt nevndi onkur eisini Kjartan Mohr, men í hesum føri tykist eisini vera talan um óváttað politisk git. Felags fyri tey, sum vórðu løgd undir illgruna, tykist vera, at tey hildu, at løgtingið átti at verið sent heim og nýval útskrivað, áðrenn løgtingið tók avgerð um, at Føroyar skuldi fara aftur at brúka donsku krónuna. Hetta høvdu fólkafloksumboðini í løgtinginum skrivað undir uppá, tað hevði m.a. Kjartan Mohr eisini gjørt, og Andrias Ziska hevði týðiliga borið hetta sjónarmið fram í løgtinginum.

Í keldunum sæst, at tað fyri tað mesta vóru ungfólk, flestu fyrst í 20´unum, sum hava sett orð á og mótvegis løgregluni viðurkendu, at tey høvdu sett orð á hesar illgrunar, meðan meira tilkomin fólk, t.d. Poul Karbech Mouritsen, føddur í 1904, ongantíð fyri løgregluni vildi kennast við, at hann í øðrum – meira óformligum – høpi skuldi

havt sett fram líknandi illgrunar, sum hann sambært øðrum vitnum skuldi havt sett orð á. Hetta bendir eisini á, at løgreglan í formligum avhoyringum neyvan fekk atgongd til allar viðkomandi upplýsingar.

Kjartan Mohr og Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim (1881-1954), sum eisini høvdu verið inni í løgtinginum og mótmælt umleið 14 dagar frammanundan bumbuspreingingina, upplýstu báðir, at teir vóru heima, tá ið bumban brast, og teir sýttu fyri, at teir kendu nakað til málið ella høvdu havt ætlanir um at eggja til nakað tílíkt við sínum mótmælum í løgtinginum. Tað skilst eisini, at Johan Johannesen (1906-1965) hevði verið við teimum í løgtinginum við kravinum um, at løgtingið varð sent heim. Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim váttaði fyri løgregluni, at nakrir av hansara politisku vinum høvdu havt ætlan um at royna at fáa ein løgtingsmann hjá Javnaðarflokkinum úr Suðuroy, Johan Hendrik Danbjørg (1896-1968), til ikki at møta í løgtinginum, tí so hevði løgtingið ikki verið viðtøkuført, hóast allir hinir 12 sambands- og javnaðartingmennirnir møttu, men hendan ætlanin varð slept. Seinni hoyrdi Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim, at nøkur fólk kortini høvdu roynt at seta hesa ætlanina í verk – eftir øllum at døma við at royna at skipa soleiðis fyri, at Johan Hendrik Danbjørg var upptikin, tá ið løgtingið skuldi atkvøða um málið. Í skjølunum hjá løgregluni verður hetta mál beinleiðis nevnt „Bortførelse“ – í gásareygum. Tað verður eisini nevnt í eini frágreiðing til løgregluna hjá Páll Patursson (1894-1967), kongsbónda í Kirkjubø, í sambandi við atsóknina, at eitt løgreglufólk hevði spurt Páll Patursson um nevndu „Bortførelse“, at Johan Hendrik Danbjørg og Páll Patursson høvdu vitjað Kjartan Mohr og fingið nakrar snapsir og eina øl. Johan Hendrik Danbjørg hevði sambært Páll Patursson sagt, „at han havde været paa Sold den foregaaende Dag“. Ætlanin hevði verið, at Johan Hendrik Danbjørg skuldi koma ein túr saman við Páll Patursson til Kirkjubøar at vitja hann. Páll Patursson helt, at ein avtala varð gjørd við Johan Hendrik Danbjørg um vitjanina í Kirkjubø, men tá hann seinni hendan sama dagin fór eftir Johan Hendrik Danbjørg, sýtti hann fyri at koma við til Kirkjubøar. Páll Patursson vildi kortini ikki



Til

Føroya løgting.

Føroya framtíðarlagna skal avgerast, nú veraldarbardagin er av. Undirritaðu løgtingsmenn hava fyrr framhildið, og mugu fasthalda, at tað einans er Føroya fólk, sum kann taka avgerð, hvussu mannagongdin nú skal verða.

Føroya framtíðarskipan umfatar alt. Harundir falla stjórnarmál og vinnumál, men ikki minnst fíggjarmál og annað. Fyrsta stig eigur tí at vera nýtt løgtingsval.

Amtið hevur nú boðað frá, at forsetisráðharri Dana ynskir fíggjarliga nýskipan gjørda beinanvegin, soleiðis at danskur og føroyskur peningur verður at meta javnt. Hetta vildi verið at tikið rsði frá fólkinum. Hetta vil, um tað verður gjørt, vera at gera av stjórnarspurningin við ognaravreiðing og fíggjarligum bondum, áðrenn fólkið fær høvi til at tala.

Vit undirritaðu tingmenn mótmæla hesum.

Um hetta verður samtykt og gjørt til lógarreglu, vil tað fyri Føroyar týða a) at øll okkara Sterlingpund eru avreidd til Danmarkar, b) at øll sterlingpund, vit fáa í framtíðini, fara sama vegin, c) at tey sterlingpund, okkum tørvast til nýtslu, mugu vit bøna Danir um at veita okkum.

Úrslitið verður, at øll bond, ið nú knýta okkum til Bretlands í fíggjarligari samvinnu, tey slitna, áðrenn eitt nývalt ting kann samráðast við bretsku stjórnina um líkindir fyri einum føroyskum vinnulívi í framtíðini. Hvat hetta týðir fyri fólk okkara, eiga øll at fata.

Tað hevur verið sagt, at Danir tapa 7 milliónir á henda hátt, men hetta er skeivt. Føroyingar tapa øll sterlingpundini, Danir fáa øll sterlingpundini, og sjálvtum teir beint nú lata nakað meira fyri tey, enn tað virði, teir hava sett á krónu sína, so fer eingin at ivast í, at teir manga ferðir vinna hetta aftur og tað við rentu, tá ið teir hava okkara sterlingpund at keypa sær útgerð fyri.

Fólkaflokkurin rýmdi úr løgtinginum í august 1945 fyri at mótmæla, at løgtingið viðgjørdi spurningin um, at føroyingar aftur skuldu til at brúka somu krónu við sama virði sum tann danska. Onnur mótmæltu eisini.

kennast við eina ætlan at burturflyta Johan Hendrik Danbjørg, og hann hevði í øllum førum einki við eina tílíka burturflytingarætlan at gera. Tann í skjølunum hjá løgregluni nevnda royndin at burturflyta Johan Hendrik Danbjørg skuldi havt verið fyriskipað eini 14 dagar frammanundan, fyrst í september 1945, t.e. um somu tíð, sum løgtingið, uttan luttøku av Fólkaflokkinum, viðgjørdi spurningin um virðið á føroysku krónuni.

Eitt annað vitni, Thomas Nicolajsen (1877-1950), sum búði á horninum millum Jóannes Patursonargøtu og Dalavegin, váttaði mótvegis løgregluni, at hann í samrøðum við nøkur onnur beint eftir bumbuatsóknina hevði sagt, at „jeg kunde forstaa det skete“, t.e. bumbuatsóknina við løgtingshúsið 18. september í 1945. Harvið hevði Thomas Nicolajsen kortini ikki „forsvaret Handlingen, som jeg mener er meningsløs og burde aldrig være sket“. Tað var „paa Baggrund af de politiske Forhold“, at Thomas Nicolajsen hevði sagt, at hann „forstod Handlingen“, t.e. bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum. Tann politiski spenningurin í Føroyum var sambært Thomas Nicolajsen vorðin so stórur, at hann skilti bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum.

Fleiri vóru undir illgruna fyri at hava lagt bumbuna við løgtingið, men tann avgerandi spurningurin er, 1) um tey høvdu haldgóð fráveruprógv, sum vardu móti skuldsetingum, og 2) nær og hvussu fest vard í bumbuna?

FRÁVERUPRÓGV

Tá synirnir hjá Andriasi (1883-1960) og Onnu Kristinu Ziska (1889-1972) beinanvegin komu undir luppin hjá løgregluni, var avgerandi at kanna, um teir høvdu fráveruprógv. Andrias og Anna Ziska áttu átta børn: Johan Ziska (1911-2004), Djóni Ziska (1915-1998), Christian Pauli – nevndur Palli – Ziska (1916-2003), Marin Ziska (1918), Marius Ziska (1918-1971), Christoffer – Stoffa – Ziska (1919-1999), Anna Elisabeth Ziska (1920-1994) og Preben Ziska (1922-2001). Genturnar Marin og Anna eru ongantíð nevndar í nøkrum vitnisfrágreiðingum hjá løgregluni, heldur ikki Djóni, sum var fluttur niðan til Svartafoss at búgva, er nevndur, men Johan, Palli, Marius, Christoffer og Preben eru nevndir. Sambært Onnu vóru allir hinir, uttan Palli, heima klokkan 00.20.

Andrias Ziska hevði sjálvur eitt fráveruprógv, sum einki av teimum heilt nógvu vitnunum hjá løgregluni setti spurnartekin við. Tað verður ongantíð nevnt í nakrari løgreglufrágreiðing, at Andrias Ziska skuldi havt verið sæddur í býnum viðkomandi tíðarbil, t.e. í tíðarbilinum áðrenn ella aftaná bumbuspreingingina, og eingin frágreiðing bendir

á, at løgreglan ivaðist í ella eftirkannaði hjá øðrum fráveruprógv hansara. Sambært Onnu Kristinu Ziska, konu Andrias Ziska, var hann illa fyri hetta kvøldið – „sløj“ – og fór tíðliga í song. Anna Kristina Ziska, kona Andrias Ziska, upplýsti fyri løgregluni, at hon var heima við hús saman við manninum og trimum av teirra synum, Christoffer Ziska, Johan Ziska og Marius Ziska, sum allir fóru til songar millum klokkan 23.00 og 00.20, meðan ein fjórði sonur teirra, Preben Ziska, kom heim til hús tá – klokkan 00.20 – og var saman við henni til eftir, at bumban brast. Anna Ziska visti, at Preben Ziska kom heim klokkan 00.20, tí hon stóð við klokkuna, tá ið Preben Ziska kom heim. Anna Ziska og Preben Ziska vóru norðanfyri húsið í Sverrisgøtu og hongdu tvøst upp, tá ið bumban brast. Tá fóru Preben Ziska, Johan Ziska og Marius Ziska, sum vaknaðu av spreingingini, út fyri at vita, hvat var hent. Preben Ziska helt, at talan mundi vera um eina minu, sum var sprongd í Vágsbotni, og hann fór tí fyrst tann vegin. Andrias Ziska vildi ikki sjálvur úttala seg til løgregluna, – kanska var hann nakað firtin inn á løgregluna eftir dómin, sum hann fekk 12. september 1945 – men hann upplýsti, at hann fór til songar umleið klokkan 23 og vaknaði ikki aftur fyrr enn um 04 tíðina, tá ið ein av synunum hjá teimum kom heim. Sambært hesum var tað bert Palli Ziska, sum var úti, tá ið bumban brast.

Anna Ziska visti ikki, hvør stóð aftanfyri bumbuatsóknina. Hon hevði hvørki sæð ella hoyrt nakran koma frá tinginum framvið húsum teirra á horninum Tinghúsvegur og Sverrisgøta áðrenn ella aftaná spreingingina.

Tað var serliga yngsti bróðurin, Preben Ziska, sum kom undir luppin hjá løgregluni. Orsøkin var helst, at hann í stríð við fráveruprógv sítt varð sæddur í býnum rættiliga seint og – sum vit skulu síggja – eisini var rættiliga stutt frá løgtinginum hesa 18. september náttina í 1945. Tí verður eisini her gjørt lutfalsliga nógv burturúr at eftirkanna fráveruprógvið hjá Preben Ziska, ferðamynstur hansara í býnum hetta kvøldið í Havn.

Tað vóru eisini fleiri onnur fólk, sum høvdu verið úti í gøtunum hesa náttina og høvdu tørv á fráveruprógvi. Tað var hetta arbeiðið, sum lá fyri framman hjá løgregluni eftir bumbuspreingingina 18. september 1945.

Sverrisgøta frá Káta Horninum. Húsið hjá Andrias og Onnu Ziska er ovast til vinstru við Tinghúsvegin.

KANNINGARNAR HJÁ LØGREGLUNI

Í endurgevingum úr løgreglufrágreiðingini hjá teimum báðum løgreglumonnunum, Thomas Wilhelm (1910-2001) og Jacob Andreas Arge (1904-1959), sum vóru á vakt í Havn hesa heystnáttina í september 1945, tá ið bumban við løgtingshúsið brast, verður staðfest, at teir báðir „kort før Eksplosionen indtraf“ hittu seks fólk (í økinum rundanum løgtingshúsið). Hesi seks fólkini vóru Ernst Joensen (1907-1990), Johan Ziska, Dánjal á Krákusteini, Nikkels Adrian Poulsen (1921-2002), Preben Ziska og harumframt „en dem ubekendt Person, hvis Signaliment ikke er opgivet, og anser Betjentene sig ikke i Stand til at give et saadant Signalement“.

Omanfyri er endurgivið úr frágreiðing hjá sýslumanninum frá 18. september, meðan løgreglumenninir, sum fóru av løgreglustøðini í Bringsnagøtu klokkan 23.55, fyrr henda dagin orðaðu seg soleiðis: „Fra Kongebroen op til Hjalmar Jacobsens Boghandel saa vi kun nogle faa Personer, nemlig en ung ukendt mand paa Hjørnet ved

Vilhelm Andreasens Forretning, ved Provstinde Evensens Hus stod Bil No. 129, og ved Gærdet ind til Johan Ziskas Værksted stod Chauffør Ernst Joensen i Samtale med Johan Ziska, samtidig passerede Daniel Kragesteen, Nikkel Poulsen, Poul Thomsen og Ole Mortensen Stedet. – Vi gik opad Niels Finsensgøta og nedad Tróndargøta, ved Restaurant „Fisch and Chips“ mødte vi Preben Ziska for opadgaaende – Paa Strækningen ned til Vaagsbotn og opad Torsgøtu, samt nedad Niels Finsensgøtu til Kongebroen saas ingen Personer. – Vi gik dernæst opad Niels Finsensgøtu igen uden at se Folk, og nedad Sverrisgøtu; kommen til Hjørnet af Herluf Arnesons Hus, hørte vi en meget kraftig Eksplosion i østlig Retning. Kl. var da cirka 0,55“.

Í eini frágreiðing seinnapartin sama dag varð eisini upplýst, at løgtingsumboð fyri Javnaðarflokkin høvdu verið á fundi í løgtingshúsinum hetta kvøldið, men tey vóru farin úr bygninginum beint áðrenn midnátt. Hetta hava teir báðir løgreglumenninir, sum vóru á vakt kvøldið fyri, neyvan sjálvir lagt merki til, tí teir fóru ikki av løgreglustøðini í Bringsnagøtu fyrr enn eftir at javnaðarfólkini fóru úr løgtinginum hetta kvøldið.

Harumframt høvdu fýra onnur fólk eisini verið á gøtuni ikki so langt frá løgtinginum. Tey fýra vóru Thomas Nygaard (1900-1971), rektari á studentaskúlanum, Christian Haraldsen (1904-1976), adjunktur (lærari á studentaskúlanum) og fiskimenninir Jógvan Christiansen (1921-2017) og Erling Christiansen (1920-1981).

Í fyrstuni visti eingin, hvar spreingingin var, tey flestu hugsaðu um eina minu, men nakað seinni hesa somu náttina legði ein løgreglumaður merki til, at ein bumba hevði ligið við útnyrðingshornið á løgtingshúsinum.

Sýslumaðurin í Suðuroy, Kristian Djurhuus, fekk fyrrapartin 18. september 1945 litið ta uppgávu upp í hendi at leiða kanningararbeiðið hjá løgregluni. Løgreglufólkini – tey vóru sjey í tali – fingu longu morgunin eftir spreingingina tillutaðar ymiskar uppgávur frá Kristiani Djurhuus at taka sær av í sambandi við kanningina. Farið varð til verka við kanningunum sama dag, t.e. 18. september 1945. Tað var umráðandi hjá løgregluni at tosa við fólk, sum vóru í økinum, fyri at fáa upplýsingar og fyri at kanna fráveruprógvini hjá ávísum fólki:

- Harry Andrésen (1910-1987), løgreglumaður, skuldi avhoyra allar bilførarar.
- Henry Anton Djurhuus (1905-1970), løgreglumaður, skuldi kanna, um illgrunasom fólk kundu havt fingið hendur á spreingievni.
- Jacob Andreas Arge (1904-1959), løgreglumaður, skuldu avhoyra sjómenninar Jógvan Christiansen og Erling Christiansen.
- Thomas Wilhelm (1910-2001), løgreglumaður, skuldi avhoyra Thomas Nygaard, Christian Haraldsen, Nikkels Poulsen og Dánjal á Krákusteini.
- Søren Vilhelmsen (1880-1963), løgreglumaður, skuldi avhoyra starvsfólkini á matstovunum Stjørnuni og Sjómansheiminum.
- Clement Joen Hans Clementsen (1905-2001), løgreglumaður, skuldi avhoyra havnavaktirnar og skipararnar á ferðabátunum.
- Herluf Hansen (1910-1976), løgreglumaður, skuldi avhoyra løgtingsumboðini hjá Javnaðarflokkinum.

Løgreglumenninir fóru alt fyri eitt til verka. Hesar avhoyringarnar høvdu eisini við sær, at nýggj spor komu til sjóndar og nógv fleiri fólk enn hesi vórðu avhoyrd longu 18. september, og uppaftur fleiri í døgunum aftaná.

Tað er áhugavert, at hóast tveir av Ziska brødrunum vóru nevndir av løgreglumonnunum, sum høvdu vakt á gøtuni hesa náttina, tá ið bumban brast, so stendur eingin á yvirlitinum hjá løgregluni frá seinnapartinum 18. september yvir fólk, sum skuldu avhoyrast, men teir komu skjótt í miðdepilin í kanningararbeiðinum. Í tilfarinum eru vitnisfrágreiðingar, sum fingu Preben Ziska og onnur við í miðdepilin í kanningararbeiðinum.

FRÁGREIÐINGAR HJÁ ZISKA BRØÐRUNUM

Her verður keldutilfarið og avhoyringarnar viðgjørt við støði í teimum fólkunum, sum komu í miðdepilin í rannsóknunum hjá løgregluni, meðan upplýsingar frá vitnum, sum ikki eru í miðdeplinum, verða tiknar við í framsetingina, har tær eru viðkomandi fyri fráveruprógvini hjá teimum, sum eru í miðdeplinum. Fyrst verða avhoyringar teir tríggjar fyrstu dagarnar viðgjørdar, og í næsta kapitlinum verða restina av avhoyringunum umrøddar, og nøkur ivamál í sambandi við tað drúgva kanningararbeiðið hjá løgregluni verða tikin upp.

Johan Ziska segði, at hann hevði verið á verkstaðinum – í Bøkjaratrøðni – saman við Ernst Joensen, har teir høvdu tingast um nakrar takplátur. Klokkan 23.45 fóru teir av verkstaðnum, Ernst Joensen fór yvir til sín bil, meðan Johan Ziska stóð við sítt portur. Johan Ziska var heima við hús – Ziska familjan búði í húsinum, sum Andrias Ziska í 1909 hevði latið byggja á horninum millum Sverrisgøtu og Tinghúsvegin – umleið klokkan 23.55. Dánjal á Krákusteini váttaði





Kort yvir gøtur, gøtunøvn og stovnar í Havn frá 1950.

í síni frágreiðing, at hann hevði sæð teir tosa saman við bókahandilin hjá Hjalmar Jacobsen, men hann tíðarfesti samrøðuna heldur seinni enn Johan Ziska – til „lidt over tolv“. Eins og Anna Ziska (mamma Johan) upplýsti, so vóru Marius Ziska (beiggi Johan Ziska) og kona hansara heima tá. Tey fóru til songar stutt eftir, at Johan Ziska var komin, og umleið klokkan 00.20 fór Johan Ziska eisini sjálvur í song. Tá var tann yngsti beiggin, Preben Ziska, eisini komin heim, men Preben Ziska var verandi í køkinum saman við mammuni, tá ið Johan Ziska fór til songar. Johan Ziska sovnaði skjótt, men vaknaði aftur nakað seinni „ved en voldsom Eksplosion“. Hann fór upp, og hitti Onnu Ziska og Preben Ziska uttanfyri húsið, har tey hongdu grind upp at turka, tá ið tey hoyrdu „Eksplosionen“ – tey vóru „meget bleg“. Preben Ziska fór út, og Johan Ziska fór eisini út saman við Mariusi Ziska, sum eisini var vaknaður av spreingingini. Teir hildu allir, at talan mundi vera um eina minuspreinging. Teir løgdu leiðina móti Vágsbotni, men funnu skjótt útav, at eingin minuspreinging hevði verið har. Marius Ziska upplýsti, at teir fóru „ned gennem Vágsbotn, over til Politistationen ned mod Kongebroen“ og inn á løgreglustøðina fyri at kunna løgregluna um oyðileggingar (m.a. hjá Uhrmager Thorvald Joensens Værksted), sum teir høvdu lagt merki til á vegnum oman í Vágsbotn.

Christoffur Ziska segði seg vera farnan í song áleið klokkan 23.00-23.30, og „har intet hørt til Eksplosionen“. Frágreiðingin hjá honum er sera stutt, – tríggjar linjur – og meira er ikki í hansara frágreiðing til løgregluna. Tað var heldur eingin, sum sambært vitnisfrágreiðingunum hevði sæð hann vera úti í býnum hetta kvøldið.

Marius Ziska váttaði í síni nakað drúgvari frágreiðing frágreiðingina hjá Johan Ziska, og har er einki mótstríð millum frágreiðingarnar, heldur ikki í sambandi við Preben Ziska og Onnu Ziska. Sjálvur hevði hann verið og málað nýggju húsini hjá sær, og var komin heim umleið klokkan 23.00. Tá hann hevði fingið sær at eta, fór hann í song, og stutt eftir kom konan eisini til songar – tá var Anna Ziska, mamman,

Havnará skilti økið við Niels Finsens gøtu og Tinghúsvegin frá Sverrisgøtu til tær knýttust saman á Vaglinum.

einsamøll eftir í køkinum. Her er kortini tann munur, at meðan Johan Ziska upplýsti, at hann og mamman vóru eftir í køkinum, tá Marius Ziska og konan fóru til songar, so nevndi Marius Ziska ikki Johan Ziska. Marius Ziska upplýsti harumframt, at mamman var einsamøll eftir í køkinum, tá ið hann og konan vóru farin til songar. Hetta hevur valla serligan týdning, tí Johan Ziska upplýsti, at hann fór í song stutt eftir, at Marius Ziska og konan vóru farin í song. Tey bæði lógu í songini og prátaðu, tá tey hoyrdu „en voldsom Eksplosion, der rystede hele Huset". Marius Ziska fór upp samstundis sum Johan Ziska og møtti har Onnu Ziska og Preben Ziska, sum „kom lige ind, de havde været udenfor for at hænge Hvalkød op" – Anna Ziska „syntes meget chokeret". Síðani fóru teir allir, Marius Ziska, Johan Ziska og Preben Ziska, út fyri at fregnast eftir, hvat var á vási – fyrst oman í Vágsbotni og síðani niðan aftur eftir Áarvegnum. Av frágreiðingini hjá Johan Ziska sæst óbeinleiðis, at tað ikki var fyrr enn dagin eftir, at teir løgdu merki til, hvat var hent. Johan Ziska upplýsti í síni frágreiðing, at Johannes Pauli Hofgaard (1922-1971), sum teir fylgdist við, eftir at hann hevði fingið at vita, at eingin mina var sprongd í Vágsbotni, á veg niðan eftir Áarvegnum hevði nevnt nakað um, „at der vel ikke var sket noget ved Tinghuset. Vi lyste den Vej opover, men kunde ikke konstatere noget." Hetta váttaði Marius Ziska fyri seg sjálvan, tá hann upplýsti, at hann „fik ikke at vide, hvad der var sket, førend i Formiddag", men Johan Ziska og Preben Ziska vóru úti longri enn Marius Ziska – til kl. 03.30. Marius Ziska legði kortini tað afturat, sum ikki sæst í frágreiðingini hjá Johan Ziska, at á Áarvegnum hittu teir ein annan bróður sín, Palla Ziska, sum kom frá matstovuni Stjørnuni.

Marius Ziska segði seg ikki hava nakran kunnleika til, hvør hevði staðið aftanfyri bumbuspreingingina við løgtingið, og eingi av vitnunum upplýstu nakað um, at hann skuldi havt verið í býnum hetta heystkvøldið.

Palli Ziska upplýsti, at hann var saman við Ólavi Danielsen (1927-2000) hetta kvøldið, tá ið bumban brast. Um 00.05 tíðina fóru báðir – sí frágreiðingina hjá Mariusi Ziska – á Stjørnuna, sum var ein matstova í Niels Finsens gøtu, millum har sum Ebenezer og Bitin eru í dag. Har hittu teir Sigrid Joensen, eina tænastukvinnu á Stjørnuni. Tey trý vóru øll í køkinum á matstovuni, tá ið tey um eitt tíðina hoyrdu eina ógvusliga spreinging, sum tey ikki rættiliga vistu, hvat var fyri nakað. Klokkan 01.10 kom Olevina Danielsen, hin tænastukvinnan á Stjørnuni, heim (á Stjørnuna skilst av samanhanginum). Olevina Danielsen segði frá, at hon hevði verið við handilin hjá Palle Bager, – eitt bakarí á horninum millum V. U. Hammershaimbs gøtu og J. C. Svabos gøtu – tá hon og ein onnur kvinna hoyrdu og sóu spreingingina. Har „hørte de et kraftigt Skud og saa en Lysstraale, de mente det var en Mine". Palli Ziska og Olevina Danielsen – í eini aðrari frágreiðing, sum tykist sipa til ta somu kvinnuna, verður Olevina Danielsen nevnd Oluffa Jacobsen – gingu oman eftir Niels Finsens gøtu, har tey løgdu merki til, at fleiri rútar vóru brotnaðir. Tey fráboðaðu alt hetta á løgreglustøðini í Bringsnagøtu. Á løgreglustøðini vórðu tey so biðin um at fara oman í Vágsbotn fyri at kanna, um ein skúrur, har kommunan goymdi spreingievni, var sprongdur í luftina. Tað var hann ikki, kundu tey boða frá, tá tey bæði komu aftur á løgreglustøðina. Hendan frásøgnin hjá Palla Ziska er váttað í eini aðrari frásøgn hjá einum løgreglumanni á løgreglustøðini. Palli Ziska kendi einki til hendingina og hevði einki hoyrt frá øðrum um, hvør stóð aftanfyri.

Sigrid Joensen váttaði í síni frágreiðing, at Palli Ziska og Ólavur Danielsen komu á Stjørnuna „Kl. 00.20, der sad de inde til kl. ca. 1½". Hetta er nakað seinni enn Palli Ziska sjálvur upplýsti í síni egnu frágreiðing fyri løgregluni, t.e. at teir báðir fóru á Stjørnuna klokkan 00.05, men valla meira enn vanligt ósamsvar millum tvær ymiskar munnligar frásagnir. Signhild Olsen, leiðarin á Stjørnuni, segði seg eisini hava sað Palla Ziska og Ólavur Danielsen saman við øðrum við konditarríið hjá Restorff (Káta Horninum), tó ikki fyrr enn klokkan 00.30, tá ið Ólavur Danielsen eftir áheitan frá henni fór á Stjørnuna at vera saman við Sigrid Joensen, sum var einsamøll. Signhild Olsen

upplýsti, at Palli Ziska fór við Ólavi Danielsen á Stjørnuna. Sambært hesum kann Palli Ziska illa hava havt nakað at gera við bumbuna við løgtingshúsið klokkan 00.55. Um midnáttina var Palli Ziska sæddur saman við øðrum við Hotel Djurhuus á veg niðan eftir Áarvegnum, og stutt eftir varð hann aftur sæddur saman við fleiri øðrum á Káta Horninum, til hann fór inn á Stjørnuna við Ólavi Danielsen.

Palli Ziska segði seg einki kenna til, hvør hevði staðið aftan fyri bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum, og hann hevði heldur ikki hoyrt nakran siga nakað um, hvør stóð aftanfyri atsóknina móti løgtingshúsinum.

Preben Ziska segði umleið tað sama um sína ferð í býnum hesa náttina, sum mamma hansara og onnur við høvdu upplýst. Viðvíkjandi sínum fráveruprógvi upplýsti Preben Ziska hetta: Hann hevði hetta kvøldið verið saman við Christiani Guttesen (1918-1997), sum hann hevði etið eina máltíð saman við á „Fish and Chips" – í Dr. Jakobsens gøtu, har FK er nú – umleið klokkan 22.45. Síðan fóru Preben Ziska og Christian Guttesen á gøtuna og hittu har saman við Johannes Johannesen (1910-1986) áðurnevnda beiggja Preben, Palla Ziska, umframt ein av synunum hjá Vágseið. Eina lítla løtu seinni fór Preben Ziska einsamallur – av Káta Horninum skilst – niðan móti handlinum hjá Arthuri Brend (1880-1959), – húsið á horninum millum Niels Finsens gøtu og Kongagøtu – har hann hitti Andrew Nielsen (1920-1973) og ein son hjá Christiani M. Rubeksen (1894-1969). Tá teir tríggir høvdu tosað saman í eina løtu, „og lige da Gadelygterne slukkedes" – sambært øðrum vitnisfrágreiðingum vórðu gøtuljósini í býnum sløkt á midnátt og tað gjørdu tey eisini hesa náttina – kom ein ung kvinna framvið, sum hann fylgdi heim til Jens Poulsen (1880-1952), har hon var tænastugenta og búði.

Síðan legði Preben Ziska leiðina heim, og hann var eins og Anna Ziska, mamma hansara, upplýsti, heima í Sverrisgøtu klokkan 00.20. Har sótu einans mamman, Anna Ziska, og Johan Ziska, beiggi hansara, í køkinum. Johan Ziska fór til songar stutt eftir, og síðani sat Preben Ziska einsamallur saman við mammu síni í køkinum og drakk te, meðan hann las í eini avís. Nakað seinni fór hann út um fyri at hjálpa mammu síni við at heingja tvøst upp at turka. Tað var meðan tey bæði stóðu uttanfyri húsið, við norðurendan, at spreingingin, sum Preben Ziska helt mundi stava frá eini minu, hoyrdist. Tey hongdu alt tvøstið upp og fóru síðan inn, samstundis sum Marius Ziska og Johan Ziska komu av loftinum. Preben Ziska upplýsti eins og mamman, at hann hevði sitið í køkinum saman við henni frá klokkan 00.20 og til tey bæði fóru útum fyri at heingja tvøst upp, og har hoyrdu spreingingina. Preben Ziska fór so ein túr í býin fyri at finna útav, hvat mundi vera hent. Við Sparikassahornið hitti hann Johannes Paula Hofgaard og Tórarin Evensen (1907-1987), sum eisini helt, at talan mundi vera um eina minu, og leiðin gekk, sum upplýst aðrastaðni, oman í Vágsbotn.

Sambært Johan Ziska vóru Preben Ziska, Marius Ziska og Johannes Pauli Hofgaard farnir frá løgreglustøðini, har Johan Ziska hevði fingið at vita, at eingin minuspreinging var, móti Strond, áðrenn Johan Ziska fekk teir aftur. So fóru teir eftir Áarvegnum. Hetta samsvarar við tað, sum hinir beiggjarnir upplýstu fyri løgregluni.

SAMANBERING AV FRÁGREIÐINGUM

Ziska brøðurnir høvdu sum sæst allir eitt fráveruprógv í mun til bumbuspreingingina, men okkurt ósamsvar tykist vera millum tað, sum onnur vitni upplýstu um, nær Preben Ziska var á Káta Horninum, og nær hann sambært egnari frágreiðing hitti eina gentu umleið við húsið hjá Arthur Brend í Niels Finsens gøtu – t.e. við Kongagøtu. Hetta hevur týdning fyri hansara fráveruprógv, serliga fyri, nær hann kom heim í Sverrisgøtu.

Frágreiðingar, sum vóru festar á blað 18. september, samsvara yvirhøvur væl við hvørja aðra. Frávikini eru smá, og eru tílík, sum kunnu væntast, tá ið fólk óheft av hvørjum øðrum siga frá eftir minninum. Heldur ikki høvdu tey fyrstu vitnini havt góðar stundir til at samskipa síni svar, um tey av onkrari grund skuldu havt ein áhugað í at gjørt tað. Sambært Kristiani Djurhuus vóru tey, sum vóru undir illgruna, avbyrgd í varðhaldi hjá løgregluni fyrsta dagin. Preben Ziska upplýsti eins og mamman og brøðurnir, serliga Johan Ziska, at hann kom

heim klokkan 00.20, og hann var sambært mammuni heima alla tíðina líka til eftir bumbuspreingingina.

Tórolvur Samuelsen (1928-2020) upplýsti hinvegin fyri løgregluni, at hann kom í prát við Preben Ziska, sum kom gangandi niðan eftir Sverrisgøtu frá Káta Horninum, tá Tórolvur Samuelsen sjálvur var á veg heim í lítlu Tvørgøtu, har hann búði. Tórolvur Samuelsen kom frá einum húsum á Abbatrød, har hann hevði verið og vitja eina gentu, tá ið hann kom framvið telefonstøðini og hitti Preben Ziska, ovarlaga í Sverrisgøtu skilst av samanhanginum. Teir steðgaðu á eina løtu og skiftu orð um onkur minni týðandi viðurskifti, og tá ið teir skiltust, umleið tíggju minuttir áðrenn bumban brast klokkan 00.55, stóð Preben Ziska og styðjaði seg ímóti einum garði við húsið hjá teimum í Sverrisgøtu. Tórolvur Samuelsen visti ikki, hvagar Preben Ziska var á veg ella hvar hann fór, tá ið teir skiltust, men hann upplýsti 18. september 1945 fyri løgregluni, at „Preben virkede ganske normal". Her er okkurt, sum ikki hongur saman millum frágreiðingarnar. Brast bumban við løgtingið klokkan 00.55, sum keldurnar upplýsa, so kann Preben Ziska sambært hesum ikki vera komin heim klokkan 00.20, men í fyrsta lagi klokkan 00.45, t.e. 25 minuttir seinni. Tá Preben Ziska varð gjørdur kunnugur við frágreiðingina hjá Tórolvi Samuelsen, umbar hann seg fyri løgregluni og upplýsti, at hann hevði gloymt at nevna, at hann hevði hitt Tórolv Samuelsen, men hann helt fast við, at hann kom heim klokkan 00.20.

Preben Ziska upplýsti fyri løgregluni, „at det ikke er rigtigt, naar Tórolvur Samuelsen forklarer, at han forlod mig ca. 10 Minutter før Eksplosionen Indtraf". Tórolvur Samuelsen helt eisini sambært vitnisfrágreiðingini fast við sína tíðarfesting, men hann vildi nú sleppa at broyta eina aðra tíðarfesting í frágreiðingini, „da det kan skade nogen". Meðan hann í fyrru frágreiðingini hevði upplýst, at hann fór av Abbatrød klokkan 00.35, – tað visti hann, tí hann hugdi eftir klokkuni, tá ið hann fór av Abbatrød – so upplýsti hann sambært seinnu frágreiðingini, „at han slet ikke saa paa sit Uhr, da han forlod Abbatrø". Hetta er eitt av bert fáum dømum í frágreiðingunum um mótstríð, sum kundi verið meira enn eitt tilvildarligt ósamsvar í minninum hjá vitnum.

Tann 17 ára gamla gentan á Abbatrød, ein tænastugenta hjá Jacob Joensen, Elsa Maria Jacobsen úr Klaksvík, sum Tórolvur Samuelsen vitjaði hesa heystnáttina, var dagin eftir, 19. september, rættiliga sannførd um, at klokkan var 00.30, tá ið Tórolvur Samuelsen fór av Abbatrød, tí hon hevði tá hugt at klokkuni á kommoduni. Elsa Maria Jacobsen visti eisini at siga fyri løgreglumanninum, sum fregnaðist eftir neyvu tíðini, at hennara klokka var tríggjar minuttir aftanfyri hana á Havnar kirkju, sum sambært hesum upplýsingum sostatt skuldi havt verið 00.33, tá ið Tórolvur Samuelsen fór frá henni á Abbatrød. Tíðarfestingin hjá Preben Ziska, sum er váttað av familjuni, samsvarar sostatt ikki rættiliga við hetta. Hann segði, at hann var heima klokkan 00.20.

Carl Poulsen, ein av manningini á *Grundick*, sum lá á Havnini hesa náttina, hevði hinvegin gingið framvið klubbanum og løgtingshúsinum umleið 10 minuttir áðrenn bumban brast. Hann legði merki til eina einliga kvinnu við klubban og uppi við telefonstøðina, men sá annars ongan. Hóast Kristian Djurhuus, sýslumaður, helt, at gott hevði verið at funnið og avhoyrt hesa ókendu kvinnuna, so sæst eingin frágreiðing frá henni.

Heldur ikki Jógvan Skýlindal (1902-1977), sum arbeiddi á telefonstøðini, og umleið klokkan 00.30-00.35 fór útum umleið har, sum húsið hjá Andriasi Ziska sást, legði merki til nakað. Jógvan Skýlindal sá ongan, og upplýsti beinleiðis, – óivað uppá fyrispurning frá løgreglumanninum – at hann ikki hevði lagt merki til, at nakar var uttanfyri hjá Andriasi Ziska. Tað sæst av undirstrikingum og spurnarteknum í frágreiðingunum hjá Onnu Ziska og Preben Ziska, at onkur hjá løgregluni, kanska fútin, sum skilligt er hevur undrast á, at Anna Ziska og Preben Ziska hongdu tvøst upp so seint, klokkan 00.55, men tað er hinvegin heldur ikki so lætt at síggja eina grund til, at tey skuldu havt sagt ósatt um hetta. Onkur kundi lætt lagt merki til, at tey *ikki* vóru uttanfyri tá. Tað hevði verið lættari at vart eina íspunna

søgu um, at tey vóru *inni* í húsinum, tá ið bumban brast. Sannlíkasta grundin til, at tey skuldu havt sagt frá eini so ósannlíkari søgu, at tey vóru uttanfyri og hongdu tvøst upp, tá bumban brast, tykist vera, at tey bæði vóru uttanfyri og hongdu tvøst upp, tá bumban brast. Jógvan Skýlindal, sum búði umleið har, ið Tórolvur búði, sá heldur ikki Tórolv Samuelsen á veg heim.

Í yvirlitum yvir grindadráp í Føroyum í 1945 sæst m.a., at grindir vórðu hildnar til í Havn 7. juli (66 hval) og 6. september (93 hval) (Heimabeiti 2018). Tað kann sostatt sambært hesum neyvan útihýsast, at Anna Ziska og Preben Ziska hongdu tvøst upp at turka norðanfyri húsið í myrkrinum eftir midnátt 18. september 1945, hóast tíðin tykist eitt sindur løgin. Tá Preben Ziska eftir bumbuspreingingina fór oman á Káta Hornið fyri at fregnast eftir, hvat mundi vera hent, segði eitt vitni fyri løgregluni, at hann hevði eina lummalykt við sær. Gangast má út frá, at løgreglan, sum ivaðist í hesi søguni, kannaði um tvøst veruliga hekk norðanfyri húsið, men keldutilfarið gevur – burtursæð frá spurnarteknunum – ongar upplýsingar um, at løgreglan seinni setti nakað spurnartekin við søguna. Talan kann sjálvandi eisini hava verið um saltað tvøst ella stórhvalatvøst.

Foreldrini hjá Tórolvi Samuelsen vistu heldur ikki at siga, nær hann kom heim hesa náttina, tí tey vóru øll farin í song. Ein mostir hansara, sum var á vitjan, kundi hinvegin upplýsa fyri løgregluni, at „hun havde hørt Eksplosionen“ og hon hevði eisini hoyrt Tórolv Samuelsen venda sær í songini. Tórolvur Samuelsen hevði ikki sjálvur hugt eftir klokkuni ella lagt merki til, hvat klokkan mundi vera, tá hann kom heim hetta kvøldið.

Tíðarfestingina av bumbuspreingingini til klokkan 00.55 kann spurnartekin valla setast við, tí hetta var tað, sum løgreglufólk upplýstu í frágreiðingum, og vitni upplýstu tað sama. Tað var sostatt umleið klokkan 00.45, at Preben Ziska sambært Tórolvi Samuelsen stóð við ein garð uttanfyri hjá Andriasi og Onnu Ziska í Sverrisgøtu. Hetta er umleið tann sama tíðarfestingin, sum Tórolvur Samuelsen við støði í samanbering av ymiskum klokkum, har hædd m.a. varð tikið fyri, at hansara egna klokka gekk eitt sindur skeivt og tí mátti setast av nýggjum eftir kirkjuklokkuni hvønn dag, at enda kom til – 00.43 – tá ið hann fyri triðju ferðina varð avhoyrdur av løgregluni um hesa tíðarfestingina (00.33, tá ið hann fór av Abbatrød + 4-5 minuttir at ganga til hann hitti Preben Ziska + 5 minuttir prát við Preben Ziska). Tað vóru sostatt framvegis góðir 20 minuttir ímillum tíðarfestingina hjá Ziska familjuni av, nær Preben Ziska *kom* heim (00.20), og tíðarfestingina hjá Tórolvi Samuelsen/Elsu Mariu Jacobsen av, nær Preben Ziska í fyrsta lagi *kundi* verið komin heim (00.43).

Spurnartekin varð eisini av øðrum vitni sett við hesa tíðarfestingina (00.20) av, nær Preben Ziska kom heim.

Kirsten Hansen, ein tænastugenta hjá Jens Poulsen, greiddi løgregluni frá, at tá hon klokkan 00.15 fór heim frá Arthur Brend keypmanni, – í Niels Finsens gøtu – har ein systir hennara var tænastugenta, kom hon við handilin hjá Magnusi Skæling (1891-1973) – ein matvøruhandil á horninum millum Magnus Heinasonar gøtu og Sverrisgøtu – at fylgjast við Preben Ziska, sum harfrá fylgdi henni heim til hús (í Tróndargøtu 51), har Jens Poulsen búði. Tíðarfestingin hjá Kirstin Hansen tykist verða óheft váttað av Ejler Rubeksen (1925-2014), sum stóð uttanfyri húsið hjá Arthur Brend hetta kvøldið, og hevði sæð „en Pige“ – tað tykist ikki sum hann kendi hana – koma út úr húsinum hjá Arthur Brend umleið klokkan 00.15. Hesa søgu upplýsti Preben Ziska eisini fyri løgregluni í síni frágreiðing, men hann hevði onga neyva tíðarfesting av hesum, uttan tað, at gøtuljósini sambært honum sløknaðu, tá ið hann hitti Kirstin Hansen. Sambært Kirsten Hansen tosaðu hon og Preben Ziska í 10 minuttir uttanfyri hjá Jens Poulsen, áðrenn hon fór inn í húsið. Kirsten Hansen var sannført um, at klokkan var 00.15, tá ið hon fór frá systur síni (t.e. frá Arthur Brend), tí hon hevði hugt eftir klokkuni í køkinum hjá systrini, tá ið hon fór avstað haðani, men hon hevði sjálv einki ur, og hon kundi tí illa við vissu siga, hvat klokkan mundi vera, tá ið hon skiltist frá Preben Ziska uttanfyri hjá Jens Poulsen. Tað er vert

Húsið hjá Arthur Brend á horninum Niels Finsens gøta og Kongagøta.

at leggja merki til, at sambært upplýsingunum hjá Preben Ziska var klokkan eftir øllum at døma rættiliga tætt við midnátt, t.e. 00.00, tá ið hann hitti Kirsten Hansen, og ikki nakað aftaná klokkan 00.15, sum tykist vera neyðug fylgja av tí, sum Kirstin Hansen upplýsti, og neyvan heldur tætt við handilin hjá Magnusi Skæling í Sverrisgøtu, men longu hjá Arthur Brend uppi í Niels Finsens gøtu. Men klokkan má sambært upplýsingunum hjá Kirsten Hansen í øllum førum hava verið 00.30, tá ið hon og Preben Ziska skiltust niðri í Tróndargøtu (t.e. 00.15, tá ið Kirsten Hansen fór frá Arthur Brend + umleið 5 minuttir at ganga, har hon á vegnum heim til Jens Poulsen, har hon búði, kom í fylgi við Preben Ziska + 10 minuttir prát uttanfyri hjá Jens Poulsen). Og sambært nevndu upplýsing frá Tórolvi Samuelsen má tað hava verið nakað eftir hetta (t.e. nakað aftaná klokkan

00.30), at hann og Preben Ziska hittust millum Káta Hornið og telefonstøðina, og prátaðu í umleið 5 minuttir uttanfyri hjá Ziska familjuni ovast í Sverrisgøtu. Hetta er eisini tann raðfylgjan millum báðar hendingarnar, sum Preben Ziska sjálvur upplýsti fyri løgregluni í síni egnu frágreiðing. Sambært hesum kann Preben Ziska valla vera komin heim til húsið hjá familjuni í Sverrisgøtu nógv fyrr enn umleið klokkan 00.40, ein tíðarfesting, sum eisini samsvarar rættiliga væl við ta endaligu tíðarfestingina hjá Tórolvi Samuelsen.

Her eigur at havast í huga, at talan er um tvey *óheft* vitni (Kirstin Hansen og Tórolvur Samuelsen, í øllum førum Tórolvur Samuelsen, sum ikki vildi geva Preben Ziska ella nøkrum trupulleikar, og ynskti at broyta sína fyrstu frágreiðing), sum óheft av *hvørjum øðrum* (tey vistu ikki av hvørjum øðrum) góvu løgreglufólkum ymiskar upplýsingar, sum í samanhanginum tykjast krevja (implisera), at Preben Ziska var úti á gøtuni í Havn í øllum førum 20 minuttir longri (til klokkan 00.43) enn onnur vitni – mamma (Anna Ziska) og beiggi (Johan Ziska) Preben Ziska – hildu uppá, at hann var komin heim í Sverrisgøtu (klokkan 00.20). Í keldukritiskum høpi stendur tann seinna tíðarfestingin (klokkan 00.43) sostatt rættiliga sterk í hesum samanhanginum.

Tað er eitt sindur undranarvert, at tað er ein nærum reglubundin seinking uppá umleið 20 minuttir millum bæði fráveruprógvini hjá Preben Ziska. Tað er eisini tann munur, at einans tað fyrra/veikara fráveruprógvið hjá Onnu Ziska og Johan Ziska útihýsir, at Preben Ziska kann hava verið við løgtingið og sprongt bumbuna klokkan 00.55, – Anna Ziska upplýsti, at Preben Ziska var saman við henni heima við hús frá klokkan 00.20 til 01.00 – meðan tað hjá Tórolvi Samuelsen og Kirstin Hansen ger tað ósannlíkt, at hann kann hava gjørt tað. Eitt langt fjús kann hinvegin skapa fleiri møguleikar, men her halda vit okkum til seinna fráveruprógvið.

Við góðum vilja ber til at ímynda sær, at Preben Ziska, sum einar 12 minuttir áðrenn ein bumba sprongdist við løgtingið (00.55) prátaði við Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu, kann hava havt stundir til 1) at fáa hendur á spreingievni, perlum og fjúsi, sum í so fall má hava verið

fjalt onkustaðni í ella við húsið hjá Ziska familjuni, 2) at fara oman til løgtingshúsið við umleið trimum kilo av spreingievni, perlum og fjúsi, 3) at seta upp eina spreingiløðing, 4) at seta eld á fjúsið, sum óivað skuldi brenna í nakrar minuttir, og 5) at sleppa sær burtur uppá tilsamans 12 minuttir – íroknað tíðina, sum tað tók fjúsinum at brenna. Trekkja vit ta tíðina frá, sum tað tók fjúsinum at brenna, – kanska 2-4 minuttir – so hevur Preben Ziska havt minni enn 10 minuttir til at ganga oman í løgtingið fyri at gera alt klárt og seta eld á. Tíðin hevur verið ógvuliga knøpp, helst ov knøpp, serliga hjá ungum manni, sum valla var serkønur í nýtslu av spreingievnum. Í øllum førum eru ongar tøkar kelduupplýsingar, sum benda á, at Preben Ziska var serkønur í spreinging. Ferðamynstrið hjá Preben Ziska í Havnini hetta kvøldið – áðrenn og eftir spreingingina – bendir heldur ikki á, at hann hevði nakað í hyggju, og sambært vitnum var einki óvanligt við honum ella hansara atferð hetta kvøldið. Heldur ikki tykist hann hava havt góðar umstøður at fyrireika nakað frammanundan – í øllum førum frá klokkan 22.45 til 00.43 var hann sambært vitnisfrágreiðingunum stórt sæð út í eitt sæddur saman við fleiri øðrum fólkum. Leggja vit okkum einans eftir seinasta tímanum, áðrenn bumban sprongdist við løgtingshúsið, so upplýsa keldurnar m.a., 1) at Preben Ziska í fylgi við tveimum øðrum fór til gongu niðan eftir Áarvegnum um midnáttina, 2) at hann fáar minuttir seinni varð sæddur saman við fleiri øðrum í samrøðu á Káta Horninum, 3) at hann síðani gekk einsamallur niðan móti handilinum hjá Arthuri Brend, har hann nakað eftir midnáttina hitti fleiri onnur fólk, sum hann prátaði við í eina løtu, 4) at hann við húsið hjá Magnusi Skæling umleið klokkan 00.20 hitti Kirstin Hansen, sum hann síðan fylgdi heim og tosaði við í umleið 10 minuttir, 5) at hann haðani fór heim, har hann hitti Tórolv Samuelsen umleið klokkan 00.40, 6) at hann síðani tosaði við Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu í einar fimm minuttir afturat til klokkan 00.45. Í hasum tíðarskeiðinum, eftir øllum at døma nakað væl aftaná midnátt, høvdu løgreglumenninir, sum fóru út av løgreglustøðini í Bringsnagøtu klokkan 23.55, sæð Preben Ziska koma

frá „Fish and Chips“ niðan eftir Tróndargøtu. Preben Ziska var ikki bert sæddur á nevndu støðum til nevndu tíðir, hann var í flestu førum sæddur á nevndu støðum saman við fleiri øðrum fólkum. Harafturat kemur, at sambært Prebeni Ziska og familju síni, Johan Ziska, Marius Ziska og Onnu Ziska, var Preben Ziska heima í húsinum hjá Ziska í Sverrisgøtu, tá ið spreingingin hoyrdist við løgtingshúsið klokkan 00.55, og hann hevði tá sambært Johan Ziska og serliga Onnu Ziska verið heima við hús í rúma tíð. Tað er ikki so lætt at fáa søguna um Preben Ziska sum bumbumannin við løgtingið at hanga saman, og tað ber einans til, um Preben Ziska var kønur í spreinging, og Johan Ziska, Marius Ziska og Anna Ziska eisini siga skeivt frá øllum hesum.

Heilt ókunnugur við at handfara spreingievni man Preben Ziska tó ikki hava verið, tí sambært einari keldu plagdi hann onkuntíð undir krígnum at hjálpa svágrinum at taka spreingievni burtur úr minum. Annars hevði Preben Ziska einki við spreinging at gera. Tað var heldur ikki lætt hjá ókunnugum í loyndum at fáa hendur á spreingievni, tí øll søla varð skrásett. Sambært Bjarna Wilhelm, sonur løgreglumannin Thomas Wilhelm, sum hitti Preben Ziska stutt áðrenn bumbuspreingingina, so vóru hann og onnur løgreglufólk sannførd um, at Preben Ziska ikki var tann seki (Wilhelm 2022). Teir vistu, hvar Preben Ziska hevði verið hetta avgerandi kvøldið.

Heldur ikki tykist tað sannlíkt, at Preben Ziska hevði verið við løgtingshúsið og lagt bumbuna, áðrenn hann hitti Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu. Tað hevði hann neyvan havt stundir til í tí stutta tíðarbilinum frá tí, at hann fór frá Kirsten Hansen í Tróndargøtu, til hann hitti Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu – t.e. umleið fimm minuttir. Harafturat kemur, at skuldi hann havt lagt eina bumbu við útnyrðingshornið á løgtingshúsinum, so hevði tað verið ein umvegur – í mun til at farið beina leið heim í Sverrisgøtu – at farið frá løgtingshúsinum oman í Niels Finsens gøtu (oman á Vaglið) og gingið harfrá yvir á Káta Hornið og haðani gingið niðan móti ovara enda á Sverrisgøtu við Tinghúsvegin, har hann møtti og prátaði við Tórolv Samuelsen í umleið fimm minuttir. Her skal havast í huga,

at Havnará var opin í 1945, og Preben Ziska hevði tí verið noyddur til at farið frá útnyrðingshorninum á løgtingshúsinum og heilt oman á Vaglið ella kanska tvørtur um byrgingina við kommunuskúlan, áðrenn hann kundi havt lagt leiðina ímóti Káta Horninum. Eisini mugu vit ganga út frá, at hann fyrst hevur verið noyddur at fara onkrastaðni eftir spreingievni, perlum og fjúsi, áðrenn hann fór til løgtingshúsið fyri at gera alt klárt, tí hann kann valla havt tað uppá sær, meðan hann saman við fleiri øðrum reikaði runt í Havnini. Hesin møguleikin tykist útihýstur.

Um Preben Ziska framdi bumbuatsóknina við løgtingshúsið, so má hann tí hava framt atsóknina í teimum 10 minuttunum frá tí, at hann skiltist frá Tórolvi Samuelsen í Sverrisgøtu, til bumban brast klokkan umleið 00.55 – í einum tíðarskeiði, tá ið hann sambært Onnu Ziska, mammu sínu, var heima við hús hjá henni. Úr einum objektivum sjónarhorni (t.e. var tað møguligt at fremja atsóknina innanfyri tær givnu fyritreytirnar og tann givna tíðarkarmin) tykist tað ósannlíkt, at Preben Ziska bæði kann hava lagt til rættis og síðani framt eina bumbuatsókn innanfyri ein so trongan tíðarkarm. Preben Ziska var mest sannlíkt uttan fyri húsið hjá familju síni í Sverrisgøtu – ikki inni – klokkan 00.45, men kom hann seinni enn hetta heim og inn í húsið hesa heystnáttina í 1945, so fæst als einki í hansara frásøgn at samsvara við frágreiðingina hjá Onnu Ziska. Anna Ziska upplýsti, at hon hvørki hevði sæð ella hoyrt nakran koma frá løgtinginum ella framvið húsinum í Sverrisgøtu beint frammanundan ella beint aftaná bumbubrestin, og Preben Ziska upplýsti júst tað sama fyri løgregluni.

Heldur ikki úr einum subjektivum sjónarhorni tykist tað sannlíkt, at Preben Ziska, einans nakrar fáar minuttir eftir, at hann hevði tosað við Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu (t.e. einans nakrar fáar minuttir eftir, at hann *varð sæddur* tætt við løgtingið), lat eina bumbu bresta tætt við Sverrisgøtu, har teir høvdu tosað saman. Í hesi støðuni hevði tað úr einum subjektivum sjónarhorni verið skilabetri av Preben Ziska at brúkt longri fjús, soleiðis at tíðarbilið frá tí, at hann varð sæddur tætt við løgtingið og til bumban brast við løgtingið var nakað

Havnará, sum lá opin til einaferð í 1950-unum, er her sædd úr Sverrisgøtu oman móti Vaglinum. Havnará sneiðir seg oman millum kommunuskúlan høgrumegin og løgtingið vinstrumegin. Bumban sprongdist við útnyrðingshornið á tinghúsinum – móti Sverrisgøtu – við langsíðuna móti Havnará og Niels Finsens gøtu.

longri enn bert 10 minuttir. Hetta stutta tíðarbilið og tann stutta fjarstøðan millum 1) samrøðuna við Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu og 2) spreingingina við løgtingið, kundi illa annað enn akkurát kasta illgruna á Preben Ziska, og tað gjørdi tað jú eisini. Tað er sjálvandi objektivt sæð trupult at vita nakað við vissu um, hvussu Preben Ziska ella nakar annar kann hava hugsað í eini tílíkari støðu, men subjektivt sæð tykist tað ósannlíkt, at hann *sjálvur* kann hava lagt eina atsókn so illa til rættis í mun til sítt egna fráveruprógv. Her skulu vit hava í

huga, at Preben Ziska sambært keldum illa kann hava lagt atsóknina til rættis fyrr enn *eftir*, at hann hevði tosað við Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu. Støða hansara hevði sjálvandi verið heilt øðrvísi og meira tyngjandi fyri hann, um hann objektivt sæð kundi havt verið við løgtingið og lagt bumbuna og fest eld í fjúsið *áðrenn* hann – uttan at vilja tað – var so óheppin, at hitta Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu. Men einki í tí objektiva samanhanginum bendir á, at tíðarfylgjan kann hava verið hendan. Heldur tvørturímóti, so tykist tað objektivt sæð rættiliga ósannlíkt, fyri ikki at siga ómøguligt, at Preben Ziska kann hava verið við løgtingið *áðrenn* hann hitti Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu. Í so fall er tað bæði objektivt og subjektivt sera ósannlíkt, at Preben Ziska kann hava skipað fyri øllum við løgtingi *aftaná*, at hann hitti Tórolv Samuelsen í Sverrisgøtu.

Úr einum yvirskipaðum sjónarhorni ber eisini til at halda, at tað er ósannlíkt, at bumbumaðurin eins og m.a. Preben Ziska hevur ferðast runt í Havnini hetta kvøldið, og tí er komin at seta seg í óhepnar støður og stød, har fólk hava lagt merki til hann. Tað tykist meira sannlíkt, at bumbumaðurin hetta kvøldið hevur hildið seg burtur frá almenna pallinum í Havn, og heldur hevur lagt eina ætlan fyri, hvussu hann ósæddur kundi sníkja seg framat løgtingshúsinum við bumbuni, uttan at nakar legði merki til, at hann hevði verið úti. Tað seinna tykist sannlíkari, men bumbumaðurin hevur sjálvandi verið í vanda fyri at verða avdúkaður á skeivum stað.

Áðrenn vit heilt sleppa fráveruprióvnum hjá Preben Ziska, skulu onkrar av omanfyri nevndu tíðarfestingum, sum úr einum reint keldukritiskum samanhangi ikki eru viðgjørdar heilt neyvt, umrøðast eitt sindur neyvari.

PREBEN, PALLI OG OKKURT IVAMÁL

Tað eru eisini aðrar løgreglufrágreiðingar, sum benda á eitt líknandi ósamsvar í sambandi við, nær Preben Ziska hitti Kirsten Hansen – á midnátt (00.00), sum Preben Ziska tykist halda uppá, og nakað eftir klokkan 00.15, sum Kirsten Hansen heldur uppá. Preben Ziska tíðarfesti sum nevnt hendingina við, at gøtuljósini sløknaðu tá, meðan Kirstin Hansen upplýsti fyri løgregluni, at hon hevði hugt eftir klokkuni, tá ið hon fór frá Arthur Brend keypmanni. Í frágreiðingini hjá Preben Ziska fyri løgregluni 18. september er henda hending skjalfest soleiðis: „Derefter gik vi ud paa Gaden og traf sammen med Johannes Johannesen min Broder Palle og en Søn af Vágslíð. Kort efter forlod jeg disse og gik alene op mod Brends Forretning. Her traf jeg sammen med Andrew Nielsen og en Søn af Chr. Rubeksen. Efter at have vekslet et Par Ord med disse, og lige da Gadelygterne slukkedes, kom en Pige forbi, som jeg gav mig i Følge med og gik med hende til Jens Poulsen, hvor hun bor. Herefter gik jeg hjem og

var klokken da 20 Minutter over Midnat.“ Hetta kann illa hava verið nøkur onnur genta enn Kirstin Hansen. Frágreiðingin hjá Kirsten Hansen fyri løgregluni av, nær hon fór frá Arthur Brend og síðan hitti Preben Ziska á veg heim er harafturímóti eitt sindur øðrvísi: „Jeg gik hjemmefra Kl. 22.30 for at besøge min Søster, der er Tjenestepige hos Købmand Brend. … Jeg opholdt mig nu hos hende til Kl. 00.15. Hun er sikker paa dette Klokkeslet, idet hun saa paa Vækkeuret hos Søsteren i dennes Køkken. Da jeg paa Vejen havde passeret Magnus Skællings Forretning blev jeg indhentet af Preben Ziska, som fulgte mig til min Bopæl, hvor vi stod og snakkede i ca. 10 Minutter, hvorefter jeg gik op til mig selv og forlod Preben Ziska.“ Tað er ikki so lætt at fáa hesar báðar frágreiðingarnar at samsvara (neyvt) við hvørja aðra, tað ber illa til, men spurningurin er, hvør av teimum báðum frágreiðingunum man vera tann neyvara.

Hertil er lítið nýtt í mun til tað, sum fyrr er viðgjørt, men ein annar spurningur er, um tað eru aðrar keldur, sum kunnu staðfesta tíðarfestingina, tá ið Preben Ziska var á Káta Horninum og fór niðan til Arthur Brend.

Tá løgreglan dagin eftir skuldi kanna frágreiðingina hjá Preben Ziska, setti fútin seg í samband við Villy Juul, pentara í H. N. Jacobsens Bókahandli. Villy Juul greiddi í hesum sambandi setta fútanum frá, at kona hansara og Oddvald Ørvarodd hetta kvøldið 17. september „havde hilst paa een af Ziskabrødrene Kl. ca. 12 ved Ebeneszerhjørnet. Den paagældende Ziskabroder stod sammen med flere andre ved Restaurationen,“ – Stjørnan – „men det foreligger ikke klart oplyst, hvem af Brødrene, det var. Da Preben er den af Brødrene, der er mest villig til at hilse, vil Cpt. mene, at det maa have været ham, der har hilst. At Klokken var 12, da Ziska og Cpt.´s Kone hilste paa hinanden, mener Cpt. at være beviseligt derved, at Lygterne paa Gaden blev slukket i det samme.“ Hendan frágreiðingin hjá Villy Juul varð eisini óheft váttað av Tove Clementsen, sum upplýsti, at hon „var en Tur paa Kajen, kom hjem Kl. ca. 12. Da stod ved det Glade Hjørne Preben Ziska og Palle Ziska samt Jens Askildsen“.

Tað avgerandi í hesum sambandi er, sum víst á fyrr, at Preben Ziska í síni frágreiðing upplýsti, – uttan tíðarfesting, men sambært høpinum nakað fyri midnátt – at hann hitti beiggja sín, Palla Ziska, og ein annan. Sambært tveimum vitnum vóru annar ella báðir á Káta Horninum á midnátt.

Hetta samsvarar eisini væl við tað, sum Johan Pauli Andrias Henriksen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin og borgarstjóri í Havn, upplýsti, at tá hann, Petur Mohr Dam og Magnus Tórsheim vóru á veg úr løgtinginum og gingu haðani oman móti Vágsbotni, hittu teir umleið á midnátt, klokkan 00.00, Preben Ziska, Palla Ziska og ein triðja persón (kanska Palla Justinussen) við Hotel Djurhuus. Teir tríggir vóru, – mugu vit loyva okkum at ganga út frá – á veg niðan móti Káta Horninum, har vit frá keldunum vita, at teir vóru fáar minuttir seinni.

Preben Ziska hevur hinvegin valla staðið leingi á Káta Horninum og tosað við Palla Ziska ella onnur, tí Ejler Rubeksen og Andrew Nielsen søgdu seg hava tosað við Preben Ziska uttanfyri hjá Arthur Brend eitt sindur longri uppi í Niels Finsens gøtu (Kongagøtu), tá ið gøtuljósini slóknaðu um midnáttina ella helst nakað seinni.

Hetta verður eisini stuðlað av Palla Ziska, sum upplýsti, at hann fór á Stjørnuna tætt við Káta Hornið klokkan 00.05. Sambært starvsfólki á Stjørnuni var Palli Ziska har frá klokkan 00.20 til klokkan 01.20, meðan eingin nevnir, at Preben Ziska nakrantíð var har. Heldur ikki vóru – sambært fráveruprógvunum og frágreiðingum – nakrir aðrir av Ziska brøðrunum enn Preben Ziska og Palli Ziska í býnum um midnáttina. Preben Ziska kann við øðrum orðum neyvan hava sipað til annað enn hetta prátið millum hann og Palla Ziska. Tá Preben Ziska upplýsti, at tað var eftir hetta prátið við Palla Ziska og hinar báðar, – sambært (tveimum) øðrum vitnum á Káta Horninum umleið á midnátt – at hann gekk einsamallur niðan móti handlinum hjá Arthur Brend, har hann fyrst prátaði við tvey mannfólk, sum hann hitti har (Andrew Nielsen og Ejler Rubeksen), áðrenn hann síðani kom í ferðalag við Kirsten Hansen, so kann Preben Ziska sambært hesum valla vera komin í fylgi við Kirsten Hansen har á

leiðini so tíðliga sum á midnátt – „lige da Gadelygterne slukkedes“ – (t.e. meðan hann sambært tveimum vitnum framvegis prátaði við m.a. Palla Ziska niðri á Káta Horninum, og framvegis ikki var farin niðan til Arthur Brend), sum hann upplýsti fyri løgregluni. Uppaftur minni kann Preben Ziska, uppaftur seinni í mun til útgangsstøðið á Káta Horninum nakað eftir midnátt, hava hitt Kirstin Hansen á midnátt niðri við handilin hjá Magnusi Skæling – har Kirsten Hansen upplýsti, at tey bæði hittust og fylgdust heim til Jens Poulsen. Tað kann Preben Ziska illa hava gjørt fyrr enn nakað væl aftaná klokkan 00.15, sum Kirsten Hansen greitt vildi vera við. Preben Ziska var sambært síni egni frásøgn heldur ikki á veg *oman* móti handlinum hjá Magnusi Skæling, har hann hitti Kirsten Hansen, tá ið hann nakað eftir midnátt fór frá Palla Ziska á Káta Horninum, men hann var á veg *niðan* móti handlinum hjá Arthur Brend. Sambært Preben Ziska hitti hann Kirsten Hansen longu við handilin hjá Arthur Brend, ikki niðri við handilin hjá Magnusi Skæling, sum Kirsten Hansen vildi vera við, men tað kann so í øllum førum ikki hava verið fyrr enn nakað væl aftaná midnátt, og tey bæði mugu í so fall hava gingið saman frá Arthur Brend og oman til Magnus Skæling, og haðani heim til Jens Poulsen, har Kirsten Hansen búði. Tað broytir kortini einki uppá tíðarfestingarnar, tí tað tykist greitt, at Kirstin Hansen fór *ikki* frá Arthur Brend fyrr enn klokkan var 00.15, og Preben Ziska hann tí valla vera farin frá Kirsten Hansen hjá Jens Poulsen fyrr enn klokkan var 00.30. Leggja vit aftur at tíðina, sum tað tók Preben Ziska at ganga heim í Sverrisgøtu, har hann tosaði við Tórolv Samuelsen í fimm minuttir, so koma vit aftur til teir umleið 10 minuttirnar frá tí, at teir báðir skiltust í Sverrisgøtu, til bumban brast, sum einasta møguleika (tíðarskeið), har Preben Ziska kann hava skipað fyri og framt spreingingina við løgtingshúsið klokkan 00.55.

Hetta leiðir sostatt eisini til áðurnevndu niðurstøðu, sum hellur til tíðarfestingar hjá Tórolvi Samuelsen og Kirsten Hansen, sum eru væl grundaðar í samtíðarkeldunum og harumframt tykjast innanhýsis óheftar av hvørjari aðrari: t.e. at Preben Ziska valla kann vera komin heim í húsið í Sverrisgøtu fyrr enn umleið klokkan 00.45. Tíðarfestingin hjá Preben Hansen av, nær hann kom heim í húsið í Sverrisgøtu (00.20) tykist sostatt av onkrari grund ikki vera heilt neyv, men hóast fráveruprógv hansara sostatt valla útihýsir, at hann kann hava lagt bumbuna við løgtingið, so tykist tað framvegis vera rættiliga ósannlíkt. Tað ber illa til at finna bæði rúm og tíð í hansara gongd í Havnargøtum hetta kvøldið, til at hann eisini skuldi havt skipað fyri og sprongt eina bumbu við løgtingshúsið klokkan 00.55. Tá Preben Ziska dagin eftir atsóknina fastsetti tíðarfestingina av, nær hann kom heim í Sverrisgøtu hetta kvøldið, til klokkan 00.20, og ikki til klokkan 00.40, sum hevði verið rættari, so var grundin valla tann, at hann vildi fjala, at hann hevði lagt bumbuna. Sannlíkari var ein grund, at hann ynskti at forða fyri, at hann, sum varð sæddur tætt við løgtingið stutt áðrenn spreingingina, skuldi koma undir illgruna fyri at vera bumbumaðurin. Um so er, at tað var ætlanin, so gjørdist úrslitið tað øvuta. Í veruleikanum hevði hann havt betri stundir og møguleikar fyri at lagt bumbuna, um hann kom í Sverrisgøtu longu um 00.20.

Ósamsvar millum frágreiðingar var eisini í øðrum frágreiðingum, eisini størri ósamsvar enn hjá Preben Ziska.

ÓSAMSVAR Í FRÁGREIÐINGUM

Onnur vóru eisini avhoyrd meira enn eina ferð. Tveir av fleiri ungum monnum, sum fylgdust á gøtuni í Havn nakað áðrenn spreingingina og søgdu seg vera farnar til songar, tá ið spreingingin hoyrdist, høvdu rættiliga ymiskar tíðarfestingar av teimum somu hendingunum. T.d. segði annar av teimum, Nikkels Adrian Poulsen, fyri løgregluni, at teir í Niels Finsens gøtu steðgaðu eitt bil hjá Eyvindi Mohr (1926-2005) og „snakkede et lille Øjeblik med denne og gik saa ned ad Vejen igen“, meðan ein annar, Dánial Fríðrikkur á Krákusteini, um júst somu hending upplýsti fyri løgregluni, at „Vi blev der i ca. 1 Time.“ Her kann viðmerkjast, at tann føroyska orðingin „eina lítla løtu“, sum helst hevur verið brúkt í samrøðuni, ikki er heilt so trong sum tann danska „et lille Øjeblik“, men ein løta verður ikki brúkt í týdninginum ein tíma. Tveir av teimum fýra ungu monnunum, t.e. Dánjal á Krákusteini, Nikkels Adrian Poulsen, Poul Thomsen (1914-2000) og Óli Mortensen (1915-2001), sum fylgdust í gøtunum, vórðu kortini ongantíð avhoyrdir, hóast allir fýra vórðu sæddir fylgjast í økinum við løgtingið, stutt áðrenn bumban brast. Kristian Djurhuus

gjørdi mótvegis fútanum vart við, at Óli Mortensen og Poul Thomsen áttu eisini at verið avhoyrdir, men eingin frágreiðing frá teimum er at finna í tilfarinum.

Dánjal á Krákusteini og Nikkels Adrian Poulsen, sum fylgdust við hinum báðum og vórðu sæddir í økinum, stutt áðrenn bumban brast, vórðu hinvegin avhoyrdir. Teir upplýstu báðir, at teir høvdu verið saman við Poul Thomsen og Óla Mortensen á matstovuni hjá Restorff. Tá matstovan lat aftur – sambært Dánjali á Krákusteini klokkan 23.15 – fóru teir ein túr oman eftir Niels Finsens gøtu. Tá teir komu oman til húsið hjá Einari Mohr (1892-1971) við Pisuvarða, sóu teir Eyvind Mohr inni í garaguni, har hann arbeiddi uppá eina motorsúkklu. Teir steðgaðu á, og vóru so saman við Eyvindi Mohr í ein hálvan til ein tíma, – til klokkan 00.15 sambært Dánjali á Krákusteini – áðrenn teir fóru víðari til gongu oman eftir Niels Finsens gøtu. Eyvindur Mohr upplýsti fyri løgregluni, at hann var í garaguni til klokkan 00.30, táið hann fór í song – hann vaknaði ikki av spreingingini. Tá Dánjal á Krákusteini og hinir komu oman til Hjalmar Jacobsens Bókahandil, sóu teir tvey løgreglufólk og bilføraran Ernst Joensen, sum tosaði við Johan Ziska. Tá var klokkan sambært tí fyrstu frágreiðingini hjá Dánjal á Krákusteini „lidt over tolv", men sambært eini nýggjari frágreiðing dagin eftir – 19. september – hevur tað verið nakað aftaná klokkan 00.15. Teir fóru so til gongu oman á Kongabrúnna, har teir hittu Sigurd Johannes Danielsen (1917-2002) og Jens Askildsen. Teir prátaðu har í eina løtu og fóru síðani allir heim. Dánjal á Krákusteini upplýsti fyri løgregluni, at hann kom heim klokkan 00.45. Hann var komin í songina, táið hann hoyrdi spreingingina, sum hann – eins og so nógv onnur – helt mundi stava frá eini minu. Nikkels Adrian Poulsen upplýsti tað sama sum Dánjal á Krákusteini. Teir fóru tí heldur ikki út aftur í býin fyri at fregnast eftir, hvat mundi vera hent. Í eini aðrari frágreiðing til løgregluna er Dánjal á Krákusteini endurgivin fyri – eitt sindur øðrvísi – at hava upplýst, at hann var heima við hús og drakk ein temunn, táið hann hoyrdi spreingingina. Jens Askildsen upplýsti, at hann var komin heim og var akkurát farin til songar, táið hann hoyrdi spreingingina. Tað sama upplýst Sigurd Johannes Danielsen í síni frágreiðing fyri løgregluni.

Eitt áhugavert í hesum sambandi er, at teir báðir løgreglumenninir, sum Dánjal á Krákusteini 18. september segði seg hava sæð í Niels Finsens gøtu klokkan „lidt over tolv" ella – dagin eftir – nakað eftir klokkan 00.15, vóru uttan iva somu løgreglumenninir, sum nakað eftir hetta sóu Preben Ziska koma gangandi niðaneftir Tróndargøtu. Ilt er at siga, hví Dánial á Krákusteini dagin eftir flutti hesa tíðarfestingina nakað, samstundis sum hann eisini longdi tíðarskeiðið, har teir vóru hjá Eyvindi Mohr og prátaðu, úr einum hálvum tíma til ein heilan tíma, meðan Nikkels Adrian Poulsen einans nevndi hetta tíðarskeðið fyri „et lille Øjeblik". Men tað er sannlíkt, at hann harvið eisini flutti tíðarfestingina, táið teir møttu løgreglumonnunum í Niels Finsens gøtu, og helst eisini tíðarfestingina, táið løgreglumenninir – sambært Dánjali á Krákusteini – hitti Preben Ziska, sum kom niðaneftir Tróndargøtu. Tað er eisini vert at leggja merki til, at meðan Dánjal á Krákusteini í fyrru frágreiðing síni frá 18. september váttaði frásøgnina hjá Johan Ziska um, at „Ernst Joensen … stod og talte med Johan Ziska", so upplýsti hann tað øvuta í seinnu frágreiðing síni frá 19. september, at „Johan Ziska lagde jeg ikke Mærke til." Johan Ziska hevði upplýst fyri løgregluni, at hann kom heim hetta mánakvøldið klokkan 23.55. Hevði Dánjal á Krákusteini, eftir at hann í seinnu frágreiðing síni helt uppá, at hann hevði sæð løgreglumenninar og Ernst Joensen nakað aftaná 00.15, eins og í fyrru frágreiðingini hildið fast við, at hann eisini sá Johan Ziska, so hevði Johan Ziska fingið onkrar avbjóðingar við sínum fráveruprógvi. Tað kann vera ein grund til, at Dánjal á Krákusteini – um hann síðan fyrru frágreiðing hevði samskift við Johan Ziska – broytti hetta í seinnu frágreiðingini, men Johan Ziska fekk helst kortini ein avbjóðing við fráveruprównum.

Metti løgreglan, at seinna tíðarfestingin hjá Dánjal á Krákusteini var neyvari, so høvdu teir framvegis havt grundir til at ivast í, at Dánjal á Krákusteini *ikki* hevði sæð Johan Ziska tosað við Ernst

Joensen nakað aftaná 00.15, tí Dánjal á Krákusteini hevði neyvan í fyrru frágreiðing síni upplýst, at hann beint eftir midnátt hevði sað Johan Ziska tosað við Ernst Joensen, um hann ikki veruliga hevði sað tað. Í hesum førinum ganga vit út frá, at tann fyrra frágreiðingin keldukritiskt sað stendur sterkari. Tað framgongur harumframt heilt týðiligt av frágreiðingunum hjá teimum báðum løgreglumonnunum, – Jacob Andrias Arge og Thomas Wilhelm – at „ved Gærdet ind til til Johan Ziskas Værksted stod Chauffør Ernst Joensen i Samtale med Johan Ziska". Eisini Nikkels Adrian Poulsen, sum fylgdist við Dánjali á Krákusteini og hinum báðum mannfólkunum, upplýsti, at „en Person, der lignede Johan Ziska stod ved Laagen lige overfor" Hjalmar Jacobsens Bókahandil, har bilurin hjá Ernst Joensen stóð. Sambært Nikkels Adrian Poulsen var klokkan umleið 10 minuttir yvir midnátt. Tað sæst, at sýslumaðurin kundi hugsað sær, at fráveruprógvið hjá Johan Ziska varð kannað eitt sindur neyvari.

Hesar rættiliga ymisku og skiftandi tíðarfestingar hjá Dánjali á Krákusteini og Nikkels Adrian Poulsen hava hinvegin við sær, at tað illa ber til at staðfesta nakað endaligt um, at Preben Ziska, tá ið hann møtti teimum báðum løgreglumonnunum í Tróndargøtu, var á veg niðan móti Niels Finsens gøtu og Káta Horninum, og haðani um midnáttina (klokkan umleið 00.00) til handilin hjá Arthur Brend, ella um hetta var nakað seinni út á náttina, tá ið hann var á veg móti Káta Horninum, har hann í Sverrisgøtu hitti Tórolv Samuelsen (klokkan 00.38), men alt bendir á, at hetta var seinni út á náttina og at Preben Ziska var á veg heim í Sverrisgøtu. Er hald í tí, sum Dánjal á Krákusteini seinnu ferðina upplýsti, at løgreglumenninir vóru við Hjalmar Jacobsens Bókahandil nakað eftir klokkan 00.15, og tí mugu hava møtt Preben Ziska í Tróndargøtu uppaftur seinni, so er hetta harumframt alt ov seint til, at Preben Ziska kann hava verið á veg niðan til handilin hjá Arthur Brend – sambært øðrum keldum, eygnavitnum, fór hann hagar av Káta Horninum, – har hann var staddur á midnátt, tá ið gøtuljósini sløknaðu – klokkan umleið 00.00. Tað tykist sannlíkari, at Preben Ziska onkursvegna,

Niels Finsens gøta.

hóast hann gekk gjøgnum Tróndargøtu og sostatt ikki hevur gingið stytstu leið heim, sum var beinleiðis gjøgnum Sverrisgøtu, hevur verið á veg ímóti Káta Horninum seinnu ferðina, – t.e. aftaná at hann hevði fylgt Kirsten Hansen heim til Jens Poulsen – har hann í Sverrisgøtu umleið klokkan 00.35 – 00.40 kom at práta við Tórolv Samuelsen, sum kom frá Abbatrød og gekk framvið klubbanum og telefonstøðini. Hetta verður stuðlað av, at fyrru ferðina (um midnáttina), tá ið Preben Ziska fór av Káta Horninum niðan til Arthur Brend, kom hann sambært eini aðrari frágreiðing niðan eftir Niels Finsens gøtu frá Áarvegnum (við Hotel Djurhuus) saman við Palla Ziska og einum øðrum, t.e. ikki einsamallur frá Tróndargøtu,

meðan hann ta seinnu ferðina helst gekk oman eftir Niels Finsens gøtu – t.e. í mun til Sverrisgøtu, har hann búði – eisini øvugtu megin løgtingshúsið.

Hetta er enn ein ábending um, at Preben Ziska ikki kom frá løgtinginum, tá hann umleið 10 minuttir áðrenn bumban brast við útnyrðingshornið á tinghúsinum, hitti og prátaði við Tórolv Samuelsen uppi í Sverrisgøtu.

Hesir fýra unglingarnir, Dánjal á Krákusteini, Nikkels Adrian Poulsen, Óli Mortensen og Poul Thomsen, vóru óivað teir ofta ónavngivnu unglingarnir, sum onnur vitni fyri løgregluni søgdu seg hava sæð, men sambært vitnisfrágreiðingunum vóru teir allir heima, tá ið spreingingin hendi. Tann seinasti persónurin av teimum fimm, sum løgreglumenninir høvdu sæð í økinum stutt áðrenn spreingingina, Ernst Joensen, sum prátaði við Johan Ziska, sæst sum tann einasti av teimum seks als ikki at hava verið avhoyrdur av løgregluni. Her síggja vit burtur frá tí sætta ókenda manninum, sum eisini varð sæddur í økinum, men ongantíð varð avhoyrdur.

Løgreglufrágreiðingin nevndi eisini, at Thomas Nygaard og Christian Haraldsen vóru sæddir. Teir upplýstu fyri løgregluni, at teir høvdu gingið ein túr saman eftir „Strandvejen“. Thomas Nygaard hevði ikki lagt merki til nakað fólk á vegnum, meðan Christian Haraldsen upplýsti, at teir høvdu møtt einum fólki, men tað var so myrkt, at tað var ómøguligt at síggja, hvør tað var. Thomas Nygaard upplýsti, at hann kom heim klokkan 00.00. Eitt annað vitni, Jacob Mouritsen (1874-1966), upplýsti í síni vitnisfrágreiðing fyri løgregluni við Poul Karbech Mouritsen sum keldu, at Poul Karbech Mouritsen hevði lagt merki til, at teir báðir menninir stóðu við húsið hjá Thomas Nygaard í Nólsoyar Páls gøtu klokkan 23.55, tá ið hann kom heim úr løgtinginum.

Tveir aðrir menn vóru avhoyrdir av løgregluni hendan dagin, teir vóru Richard Næs (1913-1995) og Niels Juel Joensen, seinni Háberg (1912-1994). Teir høvdu verið til arbeiðis í eini nýggjari prentsmiðju í einum bygningi við havnina. Teir fóru heim klokkan umleið 00.35-00.40. Leiðin gekk fram við Kongabrúnni og eftir Áarvegnum. Við hornið á handlinum hjá Jacob Johansen gingu teir fram við 4-5 ungum mannfólkum – óivað teir omanfyri nevndu. Teir kendu bert ein av teimum, hann var sonur ein norðmann, Jens Askildsen. Richard Næs og Niels Juel Joensen fóru síðan beina leið heim, uttan at hitta nøkur onnur fólk. Umleið 5-10 minuttir eftir, at teir vóru komnir heim, hoyrdu teir eina ógvusliga spreinging, sum teir hildu stavaði frá eini minu.

At enda skal nevnast, at Ingerslev telegrafstjóri var farin av apotekinum og heim, stutt áðrenn spreingingina. Á vegnum hevði hann einans sæð nakrar gentur, sum hann ikki kundi geva nakra lýsing av.

Umframt tey nevndu fimm fólkini, sum bæði løgreglufólkini á vakt hetta kvøldið høvdu møtt í miðbýnum í Havn, vóru 52 avhoyringar gjørdar av løgregluni í døgunum 18. og 19. september, t.e. 57 forhoyr til samans.

Løgreglan heintaði eisini upplýsingar frá gistingarhúsunum um gestirnar, sum komu ella fóru í viðkomandi tíðarskeiði, frá hýruvognum um leigutúrar og gestir, og frá havnini um skip, sum lógu við bryggjuna í Havn. Harumframt vóru serfrøðingar av ymiskum slagi bidnir um at gera ymiskar fakligar frágreiðingar til málið.

Í sjálvum sær avdúkar keldutilfarið ikki tann ella tey seku, men fleiri fólk, sum vóru undir illgruna, kunnu helst reinsast, meðan kanningararbeiðið hjá løgregluni eisini avdúkar ósvaraðar ella óloystar spurningar.

BUMBAN VIÐ LØGTINGIÐ

Eitt er, at illgrunaverd fólk høvdu fráveruprógv í sambandi við bumbuatsóknina, nakað annað er, hvørjar møguleikar fólk høvdu haft fyri at spreingja bumbur uttan at vera á sjálvum staðnum, tá ið bumban brast. Rannsóknirnar hjá løgregluni snúðu seg eisini um at kanna, hvørji sløg av spreingievni fólk í Føroyum høvdu atgongd til í sambandi við møguliga gerð av bumbum, hvaðani illgrunasom fólk kundu havt fingið hendur á spreingievni, og at kanna, hvørja tøkni fólk høvdu atgongd til í sambandi við at spreingja tílíkar bumbur.

Kanningararbeiðið kom skjótt til ta ábending, at bumbufólkið ella -fólkini illa kundu havt fingið spreingievni frá góðkendum goymslum og sølum, har øll goymsla og søla var skrásett. Eitt yvirlit varð eisini fingið til vega yvir alla sølu av spreingievni, perlum o.ø. í tíðarskeiðinum frá 2. juli til bumban brast 18. september, men har var einki illgrunavert ella óvanligt at finna. Ei heldur var nakað spreingievni blivið burtur ella stolið í teimum góðkendu sølunum og goymslunum. Frá góðkendum sølufólki fekk løgreglan eisini kunnleika um, at fólk á bygd høvdu spreingievni, sum tey tóku burtur úr minum, ið vóru riknar á land krígsárini – í Havn var einki tílíkt spreingievni.

Í sambandi við spurningin um, hvar bumbumaðurin hevði fingið spreingievni, setti løgreglan seg í samband við Páll Patursson, bónda í Kirkjubø, sum løgreglan hevði fingið upplýst hevði tikið og brúkt spreingievni úr minum. Tað var Magnus Samuelsen (1886-1965), formaðurin fyri vegarbeiðinum á Glasheyggi, sum hevði upplýst fyri løgregluni, „at han som Rygter har hørt at Pall Patursson fra Kirkubø skal være i besiddelse af Sprængstof fra Miner, Cpt. kan dog ikke huske fra hvem han har hørt dette“. Páll Patursson upplýsti, at hann í Kirkjubø hevði atgongd til minur frá krígnum við spreingievni, sum hann mest brúkti til egið endamál í sambandi við ymiskt arbeiði. Hann hevði onkuntíð selt tílíkt spreingievni til onnur, men tað vóru eini 2-3 ár síðan seinast, og tá spreingievnið varð tikið úr hylstrinum í minuni, so kundi tað heldur ikki goymast leingi. Sjálvur hevði hann ikki verið í Havn teir seinastu 8-10 dagarnar (hann varð avhoyrdur 19. september). Páll Patursson kendi einki til bumbuspreingingina við tinghúsið, men hann var sannførdur um, at hendingin ikki var nøkur tilrættaløgd atsókn móti tinghúsi ella løgtingsumboðum. Hann kendi í øllum førum einki til nakra tílíka ætlan, og hann helt, at atsóknin móti tinghúsinum mátti vera framd av „uansvarlige unge Mennesker“. Sjálvur var Páll Patursson miðaldrandi maður í 1945, hann var føddur i Kirkjubø í 1894 og doyði í 1967. Páll var elsti sonur Guðny Eiriksdóttir (1872-1950) og Jóannes Patursson, formann Fólkafloksins í 1938-1946.

Hans Ejrnæs og K. Jensen vórðu bidnir um at gera eina lýsing av ástaðnum og løgtingshúsinum. Teir skrivaðu frágreiðing longu 18. september. Hans Ejrnæs og K. Jensen upplýstu, at við útnyrðingshornið á tinghúsinum var eitt hálvsirkulskapt hol, sum var 130 sentimetur í tvørmát og umleið 35 sentimetrar djúpt. Spreingievnið varð óivað lagt á grasvøllin tætt við tinghúsið, og steingrundin varð trýst inn av spreingingini. Teir mettu, at skaðarnir bendu á, at talan var um eitt „ret bristent Sprængstof (Dynamit, Gelignite o. lgn.).“ Fyri at hava volt skaðar (serliga á vindeyguni), sum sóust langt frá løgtingshúsinum, mettu teir, at talan var um eini 2-3 kilo av spreingievni. Løgreglan


Nr. 10. 45. årg. TINGAKROSSUR 7. mars 1945

Stydið teyið lýsa í Tingakrossi.

TINGAKROSSUR verður lisin av øllum, og er ti sera gott lýsingarblað. Tlf. 374 tekur móti lýsingum.

TH. ASKHAMS'S SNR. SMIÐJA & MASKINVERKSTAÐUR TELF. 371–120. TORSHAVN

Nic. Joensens Eftf. SKÓTOY – TRIKOTAGA

KNÚT PETERSENS SKÓSØLA Tlf. 265 TÓRSHAVN Tlf. 265

VERKTØJ, BESLØG, POSTALIN, STEINTOY. P.F. LUDVIG POULSEN. TLF. 13 TÓRSHAVN TLF. 13

Eddikasýra (klár sum vatn). Malurt at geva neytum fyri gallsótt. SÝRAN. telf. 58 Tórshavn.

Pláss til lygara lýsing

Lýsi vælsmakkandi í SÝRUNI

C. C. WAKEFIELD & CO. Ltd. London.

Tær heimsgitnu smyrjuoljurnar frá hesum firma eru at fáa hjá okkum í hesum slegum.

Gløðihøvdmotorar:
Victrol No. 17 (tunn)
Victrol No. 175 (miðal)
Victrol No. 18 (sver)
í tunnum og 4 gallon dunkum.

Dieselmotorar:
Deusol GS (miðal)
Deusol PT (sver)
í tunnum.

Bilar og bátamotorar [bensinmotorar]:
Patent Castrol AA
Patent Castrol XL
Patent Castrol C
í 4 gallon dunkum.

Gear- og differentialoljur:
Castrol D [sver]
Castrol SWANSHOT [tunn]
Castrol HYPOY (til hypoiddifferential].

POUL HANSEN HEILSØLA – TÓRSHAVN Telef. 61 & 255.

Dynamit
Gelignite í ymiskum tjúkdum.
Spreingikrút.
Perlur nr. 6 og 8.
Elektriskar perlur.
Leidning til elektr. spreinging.
Fjás av vanligum slag og
Fjás til størri spreingingar t. d. bærnadygging.
C. C. Johansen Telf. 30.

Færøsk Margarine VITA № 1 Vitaminiseret Færøsk Produkt. Fini Produkt.

AKTIESELSKABET FØROYA BANKI HOVEDKONTOR THORSHAVN Stiftet 1906 AFDELING: TRANGISVAAG
Aktiekapital og Reserver Kr. 1.250.000
Bankforretninger af enhver Art udføres.
Kontortid Kl. 11 – 3. Lørdag 11 – 2.

Føroya Sjóvátrygging
Skip - motorbátar útróðrarbátar - vørur verða tryggjað
Tlf. 372

Blanka er besta blankingarevni.

Í „Sýruni“ fáa lygum: Colgate, Pepsodent, Kolynos, Odol, Nicota, Gibbs S. R. tannpasta. Kent, Halex, Spa tannbustir. Kambar. Tlf. 58. Tlf. 58.

Øll eiga at brúka Føroyska hondsápu frá fabrik OKKARA

Matvørur og aðrar húsarhaldsvørur hjá Karl K. Mouritsen. Tlf. 497. Tórshavn. Tlf. 497.

Trætjøra (arkangelsk og amerik.). Blacwarnish. Veðska (at impr. timbur). Tjørukustar, Penslar og Kálkakustar. Tlf. 58. Poul Isaksen.

Tey, sum seldu spreingievni, lýstu ofta í føroysku bløðunum. Í hesi lýsingini í Tingakrossi 7. mars 1945 sæst úrvalið av lutun í samband við spreinging, sum áhugaði kundu keypa í handlunum. Spreingiblýantar síggjast ikki millum vørurnar, sum kundu keypast. Tað, sum varð keypt í sambandi við spreinging, bleiv alt skrásett soleiðis, at yvirlit var tøkt yvir øll fólk, sum keyptu, og alt tilfar, sum varð keypt.

hevði savnað nakað av pappíri á grasvøllinum, men eftir øllum at døma einki av tí slagnum, sum „har Lighed med den parafinnerede Indpakning om Dynamit (som Handelsvare). Efter en Sprængning foretaget i fri Luft med Dynamit, finder man normalt smaa Stumper Indpakning af Størrelse 10-20 mm². Fraværet af saadanne Stumper Pappir kunde tyde paa, at det anvendte Sprængstof har været T. N. T. stammende fra en demonteret Sømine, eller at den originale Indpakning om Dynamitten paa Forhånd er blevet fjernet.“ Hetta var óivað ein grund til, at løgreglufólkini eisini vendu sær til fólk, sum tey høvdu fingið upplýst høvdu atgongd til spreingievni úr minum frá krígnum. Thomas Pauli Christensen (1916-1986), sum seldi dynamit og tilfar til ymiskt spreingiarbeiði, upplýsti uppá fyrispurning frá løgregluni, at hann ikki kendi nakran í Havn, sum brúkti spreingievni úr minum, men hann hevði hoyrt, at tað var vanligt úti á bygdunum.

Hans Ejrnæs varð biðin um at kanna, hvussu bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum kundi verið fyriskipað tøkniliga. Hann kom eftir, at talan kundi vera um tríggjar tøkniligar loysnir, sum kundu havt verið brúktar av bumbufólkinum ella bumbufólkunum – t.e. „Nærtænding“, „Fjerntænding“ ella „Tidsindstillet Tænding“.

„Nærtænding:

Bumbumaðurin – eingin kvinna tykist hava verið undir illgruna – kundi sambært Hans Ejrnæs havt valt at festa í bumbuna við beinleiðis at seta eld í eitt seint brennandi fjús, sum var fest í eina perlu inni í spreingievninum, sum var lagt tætt við løgtingshúsið. Fyri at spreingja tílíkt spreingievni (dynamit, TNT og líknandi) var neyðugt at brúka eina perlu. Eldur kundi setast í fjúsið við einum svávulpinni ella við eini sigarett. Fjúsið, sum kundi keypast í handlinum, brendi við eini ferð uppá tvær føtur um minuttin. Tá eldurin í fjúsinum aftaná eina ávísa tíð fekk perluna at bresta, sprongdist eisini krútið, sum hon var í. Perlan, sum var eitt metalhylstur við „knaldkviksølv“ í, sprongdist vanliga í smá petti, sum kundu vera sera trupul at finna aftur, men vanliga sóust onkrar leivdir av fjúsinum á staðnum, har spreingingin hevði verið. Í øðrum løgreglufrágreiðingum verður upplýst, at pappírsleivdir vóru funnar á staðnum, men leivdir av fjúsi vórðu ikki beinleiðis nevndar í frágreiðingunum. Hans Ejrnæs og K. Jensen upplýstu eisini í frágreiðingini, at onkuntíð kundi fjúsið verða tveitt einar 20-30 metrar burtur frá spreingistaðnum av spreingingini. Tað er tí ein møguleiki, at fjúsið varð tveitt frá løgtingshúsinum og oman í Havnará, har tað síðan varð tikið við vatninum í ánni oman á sjógv. Tað tykist vera ein sannlík frágreiðing uppá, at løgreglufólkini, sum eisini leitaðu í ánni, einki fjús funnuð.

„Fjerntænding“:

Hans Ejrnæs nevndi eisini møguleikan, at fest varð í spreingievnið við fjarstýring og nevndi tveir møguleikar.

Talan kundi havt verið um „Elektrisk Tænding“, sum tó kravdi eitt serligt slag av perlum, „hvor Tændsatsen findes indstøbt i en Glødetraad“. El-perlan í spreingievninum varð sprongd við battaríum – „Tørelementer“ – ella við eini serligari „Tænddynamo“. Hetta kundi gerast í tryggari frástøðu umvegis ein leidning, sum varð festur í eina el-perlu í spreingievninum. Hans Ejrnæs upplýsti, at tílíkar el-perlur kundu keypast í handlunum í Føroyum, men so vítt hann visti var bert ein „Tænddynamo“ í Føroyum. Løgtingið hevði átt hana, men hon varð seld á uppboðssølu í august 1945, og tað var óvist, hvør hevði keypt hana. Tað mesta av leidninginum kundi bjargast aftaná spreingingina, men serliga tætt við el-perluna var vanligt, at leidningurin slitnaði frá og fór í fleiri stór petti. Hans Ejrnæs metti ikki, at tað var sannlíkt, at „Elektrisk Tænding“ varð brúkt til at spreingja bumbuna við. Heldur ikki tykist tað sannlíkt, at bumbumaðurin var á staðnum, tá ið bumban brast.

Ein annar møguleiki var, at bumbumaðurin brúkti „Detonerende Fængtraad“, sum hevði í sær ein tunnan tráð av háeksplosivum tilfari (PETN) „omsluttet af et Imprægneret Hylster af Bomuld og Lærredsstrimler“. Spreingingin í fjúsinum flutti seg við eini ferð uppá 6000 metrar um sekundið, – hetta er tað, sum stendur í frágreiðingini hjá

Hans Ejrnæs verkfrøðingi um hendan spreingiháttin – og spreingingin var nóg sterk til at fáa spreingievnið at spreingjast uttan at brúka eina perlu. Hinvegin kravdi hesin spreingiháttur eina perlu fyri at seta eld á sjálvt fjúsið. Hans Ejrnæs helt, at varð hesin spreingiháttur brúktur, so var spreingingin í fjúsinum so mikið ógvuslig, at hon mest sannlíkt hevði sett spor eftir seg á grasvøllinum. Eingin frágreiðing nevnir nakað um tílík spor á grasvøllinum, tvørturímóti, so hetta er valla tann sannlíkasta frágreiðingin.

„Tidsindstillet Tænding“:
At enda nevndi Hans Ejrnæs, at „det formentlig ikke er helt udelukket“, at bumbumaðurin hevði brúkt eina tíðarinnstillaða perlu – ein sokallaðan „Sprængblyant“ – til at spreingja krútið við. Einki verður upplýst um, at tíðarinnstillaðar perlur kundu keypast í handlinum í Føroyum, og Hans Ejrnæs tykist heldur ikki hava havt beinleiðis kunnleika til hetta. Tá hann greiddi frá hesum hátti at spreingja uppá, brúkti hann orðingar sum „Efter hvad jeg erfarer“. Spreingiblýanturin innihelt sambært Hans Ejrnæs eitt lukkað ílat við sýru, sum við eini serstakari gerð kundi fáast at brotna, soleiðis at sýran rann út á ein útstrektan tráð í sjálvari perluni. Tá sýran eftir eina ávísa tíð hevði etið tráin av, fór ein mekanisma í gongd, sum fekk perluna – og harvið eisini spreingievnið – til at spreingjast. Helst er hesin hátturin heldur ikki tann sannlíkasta frágreiðingin uppá bumbuna við løgtingið.

Niðurstøðan má vera, at við tí spreingitøkni, sum fólk hava havt atgongd til í 1945, so hevur tað borið til at spreingja bumbuna í tryggari frástøðu uttan seinking, sum tykist ósannlíkt, meðan tað eisini hevur borið til at spreingja bumbuna við seinking í nakrar minuttir – treytað av longdini á fjúsinum, sum hevur verið brúkt til at seta eld á krútið. Hevur fjúsið verið fýra metrar (12 fót), so hevur tað tikið seks minuttir frá eldáseting á fjúsið til spreingingina. Í fyrra førinum hevur tað av góðum grundum ikki borið til hjá bumbumanninum

Løgtingshúsið prýtt við ljósi og prýði á bygninginum í 1937 í sambandi við, at Christian X hevði verið kongur í 25 ár. Politisku rembingarnar í Føroyum eftir kríggið høvdu við sær, at viðurskiftini við ríkið broyttust nógv við heimastýrislógini í apríl 1948, men ein bringumynd av Christian X stóð órørd á eini hyll í tingsalinum eftir spreingingina í september 1945. Hóast viðurskiftini millum Føroyar og Danmark broyttust við heimastýrislógini í 1948, so var kongssambandið framvegis óbroytt og óskalað.

at rudda leidningin burtur og sleppa sær avstað, áðrenn bumban sprongdist, – tað kundi maðurin ikki gera, fyrr enn bumban varð sprongd og fólk longu høvdu varnast spreingingina – meðan tað í seinna førinum hevur verið møguligt at rýma nakað áðrenn spreingingina. Ein spreinging við seinking tykist sannlíkari í eini støðu, har tað má hava verið umráðandi hjá bumbumanninum at sleppa sær burtur frá bumbustaðnum, áðrenn fólk varnaðust nakað. Tá einki verður upplýst í frágreiðingunum um, at leivdir av fjúsi vórðu funnar, so kundi tað bent á, at fjúsið hevur verið stutt, ligið tætt við spreingievnið og í heilum líki er tveitt oman í Havnará av spreingingini. Tað er kanska mest sannlíka frágreiðingin uppá leivdirnar, t.e. mangulin uppá eitt brent fjús.

Tað hevur eisini borið til at fest eld í eitt rættiliga langt fjús, sum hevði tørv á drúgvari tíð fyri at seta eld á krútið. Í so fall kann tað hugsast, at ætlanin hjá bumbumanninum var, at hann skuldi fáa stundir til at sleppa sær so langt burtur frá bumbuni, – kanska heim í song – áðrenn hon brast, at hann ikki kom undir illgruna. Tað merkir eisini, at fólk, sum høvdu eitt haldgott fráveruprógv stutt áðrenn klokkan 00.55, tá bumban sprongdist við løgtingið 18. september 1945, kunnu koma undir illgruna, um tey ikki høvdu eitt líknandi fráveruprógv fyri tíðina nakað væl áðrenn - kanska ein tíma - bumban brast. Men eingin frágreiðing upplýsir, at leivdir av einum longum fjúsi vóru at finna á grasvøllinum við løgtingið.

Hin avgerandi spurningurin var, hvaðani bumbumaðurin hevði fingið hendur á sjálvum spreingievninum, um tað var soleiðis, at tað ikki varð lógliga keypt spreingievni í handlinum ella stolið úr goymslum ella handlum.

Tann 26. september sendi C. A. Vagn-Hansen, setti fútin, bræv til sýslumannin í Suðuroy, har hann heitti á hann um at kanna, um kommunurnar í Suðuroy ella privat høvdu atgongd til spreingievni úr minum, og um nakað av tí í so fall varð selt ella stolið. Kristian Djurhuus, sýslumaður, sendi síðani skriv til kommunustýrini í Suðuroynni, harav summi váttaðu, at tey høvdu havt tílíkt spreingievni, men at einki varð selt ella stolið úr teirra goymslum. Í savninum hjá fútanum sæst, at líknandi boð vórðu eisini send til allar sýslumenn í Føroyum, uttan at nakað kom burturúr, sum gav nýggjar upplýsingar um bumbumálið.

NAKRIR ÓSVARAÐIR SPURNINGAR

Í byrjanini varð nevnt, at løgreglufólk tað kvøldið, tá ið bumban brast, sóu fimm navngivin fólk, umframt „en dem ubekendt person". Eitt líknandi ókent fólk kemur fyri í seinni vitnisfrágreiðingum, sum eru gjørdar 21. september. Sofus Dal Christiansen (1888-1969) upplýsti fyri løgreglufólkunum, at dóttur hansara, Helena Dal Christiansen (seinni Poulsen) (1922-), vaknaði av spreingingini, fór upp og hugdi út gjøgnum vindeygað, har hon einki óvanligt sá. Hon fór aftur í song, men stutt aftaná „hørte hun en person komme gaaende hurtigt op ad Gaden mellem Centrum og Tubbak," – ein kiosk og ein tubbakshandil við Áarvegin, beint niðanfyri har, sum Hotel Hafnia (1951) er – „ind mod Haven hos Christian Restorff." Jona Henriksen (1924-2006), sum búði hjá ommu síni, Angeliku Henriksen, greiddi í síni vitnisfrágreiðing til løgregluna frá, at tá hon hoyrdi ta ógvusligu spreingingina, rann hon beinanvegin „op mod Tinghuset for at træffe sin Fader J. P. Henriksen, der er Lagtingsmand.

Áarvegurin liggur framvið Havnará høgrumegin og niðan á Vaglið, har løgtingshúsið sæst. Í lága hvíta húsinum vinstrumegin bilin var kioskin „Centrum" í 1945, meðan tubbakshandilin „Tubbak" var í niðastu hæddini á høgu húsinum við kvisti longur uppi á Áarvegnum. Millum bæði húsini var ein gøta inn í havan hjá Restorff. Tað var við hesa gøtuna, at Jona Henriksen stutt eftir spreingingina við løgtingshúsið tosaði við ein mann, sum hon ikki kendi. Ein onnur ung genta hevði um somu tíð hoyrt onkran skunda sær niðan eftir hesi somu gøtuni ímóti garðinum hjá Restorff. Løgreglan leitaði eftir manninum, men einki hoyrdist frá honum.

Mellem „Centrum" og „Tubbak" stod en Mand, som hun spurgte, hvad det var, som eksploderede, hvortil han svarede, det ved jeg ikke. Hun kendte ikke Manden, han var lille og spinkel, iført mørk Jakkesæt og en stribet Trøje." Løgtingsmaðurin Johan Pauli Andrias Henriksen, pápi Jonu Henriksen, sum eisini var borgarstjóri í Havn, var eins og hini trý javnaðartingfólkini sum kunnugt ikki longur inni í løgtinginum og arbeiddi, men Jona Henriksen fann hann úti á Reyni, har hann helt til. Pápi hennera helt, at talan mundi vera um eina

minu, sum var sprongd, og Jona Henriksen fór síðani heim aftur til ommu sína.

Tað er vert at leggja merki til, at meðan Preben Ziska, tá ið hann hoyrdi spreingingina, var sannførdur um, at talan mundi vera um eina minu í Vágsbotni, sum sprongdist – tí legði hann leiðina tann vegin alt fyri eitt – so legði Jona Henriksen leiðina beinleiðis niðan í løgtingið, tá ið hon hoyrdi spreingingina. Tað er tó ikki vist, at hetta hevur nakað at siga – tað kann einans hava verið ein ótti fyri pápanum, sum fekk Jonu Henriksen at renna niðan móti løgtinginum. Í øllum førum upplýstu nærum øll tey avhoyrdu, at tey hildu, at talan mundi vera um minuspreinging í Vágsbotni. Tað bendir á, at Jona Henriksen fór beina leið niðan móti løgtinginum, tí hon helt, at pápi hennara kanska var har, ikki endiliga tí, at hon helt, at spreingingin endiliga var akkurát har. Jona Henriksen tykist vera undantakið frá hesi regluni, og ikki Preben Ziska. Ótti fyri pápanum fekk hana at fara móti løgtinginum og síðan út á Reyn, tí hon – eins og pápin – tykist als ikki hava grunað, at talan var um eina spreinging við løgtingshúsið.

Løgreglan tóktist kortini ikki heilt sannførd um frágreiðingina hjá Preben Ziska – kanska hevði hon illgruna um, at hann bara vildi geva øðrum ta fatan, at hann einki visti um, hvar spreingingin hendi. Fyri løgregluni viðurkendi Preben Ziska, at hann beint eftir spreingingina hevði sagt í práti, at hann „blev varm i Hovedet" av spreingingini, men tað fekk hann kortini ikki til at koma til ta niðurstøðu, at spreingingin mátti vera tætt við har, sum hann var í Sverrisgøtu. Tað hoyrir við til hesa søguna, at tað ikki einans var Preben Ziska, sum hevði orðað seg soleiðis. Eisini onnur, sum høvdu upplivað spreingingina úr sama sjónarhorni sum Preben Ziska, lýstu hana á líknandi hátt. Um Preben Ziska við at fara oman í Vágsbotn at leita eftir eini minu ynskti at *dylja*, at hann visti, hvar spreingingin hendi, sum er ein treyt, um hann var tann seki, so tykist tað løgið, at „Preben og en anden af Ziskas Sønner", á Káta Horninum, beint eftir spreingingina, „talte noget om, at de havde mærket Varmen fra

Eksplosionen“, sum Tórarin Evensen upplýsti. Tað framgongur ikki, hvør hin Ziska bróðurin var, – Marius Ziska ella Johan Ziska – sum segði tað sama sum Preben Ziska, men hetta tykist bert geva meining fyri Preben Ziska ella hin, um teir *ikki* høvdu nakað at dylja. *Hevði* Preben Ziska lagt bumbuna við løgtingið og framvegis var tætt við løgtingið, tá ið bumban brast, og fyri at flyta illgrunan burtur frá sær legði leiðina oman í Vágsbotn at leita eftir eini minu, so hevði tað verið løgið, um hann við sínum útsøgnum á Káta Horninum beint eftir spreingingina orðaði seg soleiðis og so lítið umhugsað, at onnur fólk skiltu tað soleiðis, at spreingingin var heilt tætt við har, sum hann var, tá ið bumban brast. Tað er trupult at skilja tað.

Heldur ikki hetta var nakað helt serstakt at uppliva í hesi støðuni. Ein løgreglumaður, sum stóð í hurðini á løgreglustøðini við Bringsnagøtu, lýsti tað soleiðis: „Eksplosionen var meget voldsom, jeg følte et stærkt Lufttryk, jeg mente, at det var en Drivmine, der eksploderede et eller andet Sted ved Havnen, men ved nærmere Eftertanke kunde det ikke være her i nærheden, idet det var næsten stille, en lille Luftning fra N.N.O.“ Tað sær út til, at nógv, uttan at hugsa seg um, hava gingið út frá, at ein mina sprongdist í havnini.

Í døgunum 20. og 21. september gingu løgreglufólkini hús úr húsi í Havn og spurdu heilt nógv fólk og húski í økinum kring løgtingshúsið eftir upplýsingum, sum kundu hjálpa teimum við at uppklára hetta málið. Umleið 70 avhoyringar vóru gjørdar hesar báðar dagarnar, bæði av einstaklingum og ikki minst av nógvum húskjum. Kortini kom einki veruliga nýtt fram, sum kundi upplýsa nakað avgerandi nýtt um bumbumálið. Hóast ein stór upphædd – 5.000 krónur – bíðaði eftir honum ella henni, sum kundi geva løgregluni upplýsingar, sum kundu føra til, at málið varð uppklárað, so kom einki grundleggjandi nýtt fram í stóra kanningararbeiðinum.

Í sínum endurminningum skrivar Kristian Djurhuus, at tann einasti, sum vendi seg til løgregluna, var Arthur Juul Rasmussen. Arthur Juul Rasmussen vendi sær til Kristian Djurhuus hetta kvøldið (18. september) við upplýsingum, sum hann segði avdúkaðu, hvør var tann seki, men sambært Kristiani Djurhuus var lítið skil á upplýsingunum, og hann kundi heldur ikki upplýsa annað enn tað, sum løgreglan longu visti (Djurhuus 1962-1966, 867). Tann rættiliga stóra upphæddin leiddi sostatt ikki til, at nakar gav løgregluni nakrar avgerandi upplýsingar, sum kundu havt við sær, at málið um bumbuatsóknina við løgtingshúsið varð loyst.

Í tilfarinum hjá løgregluni sæst, at ongar avhoyringar vóru gjørdar í døgunum 22. og 23. september, men 24.-28 september gjørdi fútin sjálvur – t.e. C. A. Vagn-Hansen – fleiri nýggjar avhoyringar í málinum. Einki nýtt kom fram í hesum samrøðum, og síðani sæst eingin frágreiðing frá nakrari avhoyring í tilfarinum.

Áðrenn løgreglukanningarnar endaðu, vístu fútin og sýslumaðurin í Suðuroy á nakrar ósvaraðar spurningar:

- Hvør var tann ókendi maðurin, sum Jona Henriksen hevði tosað við beint eftir spreingingina?
- Hvør hevði í august 1945 keypt løgtingsins „Tænddynamo“, sum kundi verið nýtt til spreingingina?
- Hvør var tann einsamalla kvinnan, sum Carl Poulsen hevði sað við klubban 10 minuttir fyri spreingingina?
- Hvør av Ziska brøðrunum hevði fáar dagar áðrenn bumbuspreingingina fylgt aftaná Peturi Mohr Dam?

Tann 13. oktober 1945 almannakunngjørdi fútin eina eftirlýsing eftir manninum, sum Jona Henriksen hevði tosað við millum „Centrum“ og „Tubbak“, men eingin tykist í hesum sambandi hava vent sær til løgregluna. Í øllum førum sæst eingin nýggj frágreiðing í savninum hjá fútanum ella sýslumanninum hesum viðvíkjandi.

Eitt av vitnunum, Arthur Juul Rasmussen, bóndi í Havn, sum hevði fingist við spreinging, var vísur í, at einki spreingievni var komið í hendurnar á óviðkomandi. Arthur Juul Rasmussen metti hinvegin, at við tinghúsið hevði verið talan um spreingievni úr minum, og at „Antændningen er sket ad elektrisk Vej.“ Tað framgongur ikki av

frágreiðingini, hví hann helt, at bumban var sprongd á hendan hátt. Tað varð gjørd ein roynd at finna ´Tænddynamoina´, men tað eydnaðist ikki at finna hana ella mannin, sum hevði keypt hana í august 1945.

Løgreglan vendi sær eisini til Petur Mohr Dam fyri m.a. at fregnast eftir søguni um Ziska bróðurin, ið hevði fylgt aftaná honum. Petur Mohr Dam váttaði søguna, men hann upplýsti einki um, hvør Ziska bróðurin var.

Eisini helt C. A. Vagn-Hansen, at Andreas Djurhuus (1906-1984), løgtingsmaðurin úr Vági, sum var á veg heim gjøgnum Havnina náttina til 18. september 1945 klokkan 00.35, átti at verið avhoyrdur av løgregluni. Heldur ikki her sæst ein vitnisfrágreiðing, men Kristian Djurhuus, sýslumaður, upplýsti seinni í skrivi til C. A. Vagn-Hansen, fúta, at hann hevði tosað í telefon við Andreas Djurhuus, sum ongan hevði sæð á veg heim.

Hóast fráveruprógvið hjá Preben Ziska sambært frágreiðingunum ikki tykist vera uttan ósamsvar, so nevndi hvørgin av teimum tað. Men sýslumaðurin helt, at fráveruprógvið hjá Johan Ziska átti at verið kannað betri, óivað tí, at Dánjal á Krákusteini í síni seinni frágreiðing hevði órógvað fráveruprógvið hjá Johan Ziska nakað. Í øllum førum kom Johan Ziska – eins og Preben Ziska – heldur seinni heim í Sverrisgøtu enn hann sjálvur hevði upplýst fyri løgregluni (klokkan 23.55), um hald er í tí seinnu frágreiðingini hjá Dánjali á Krákusteini. Í brævinum frá sýslumanninum til fútan, har hann leggur upp til, at nøkur onnur eisini áttu at verið avhoyrd til „konstateren“ av fráveruprógvnum hjá Johan Ziska, hevur onkur – møguliga fútin – viðmerkt við hond „er konstateret“. Tað sæst ikki av tilfarinum, hvussu løgreglan tá hevði váttað fráveruprógvið hjá Johan Ziska, men ongar nýggjar avhoyringar eru at finna hesum viðvíkjandi í skjalatilfarinum hjá fútanum. Hetta kunnu vit kanska tulka sum eitt tekin um, at bæði sýslumaðurin og fútin góðtóku fráveruprógvið hjá Preben Ziska, og at í øllum førum onkur hjá løgregluni – fútin – helt, at fráveruprógvið hjá Johan Ziska var „konstateret“.


ger
VIGGO E. ANDREASSEN
TELF. 571
Stats aut.
VEA
Elektro inst.
Tórshavn
TELF. 571

Motorskibet
,Dronning Alexandrine
ankommer til Thorshavn ca. 10 November og fortsætter til Reykjavik.
Fra Thorshavn til København antagelig ca. 18. November.
Passagerer til Danmark anmodes om paany at indtegne sig skriftligt — evt. telegrafisk — og bindende senest den 20. Oktober til I., II. eller III. Klasse. — Paa nærværende Tidspunkt kan intet siges om, hvor mange Pladser er disponible, hvorfor Ekspeditionen i Øjeblikket er ude af Stand til at garantere indtegnede Passagerer Plads. Nærmere Meddelelse vil saa snart det er muligt tilgaa de Rejsende.
Det forenede Dampskibsselskabs Ekspedition i Thorshavn.

Efterlysning.
Den Person, der ganske kort efter Eksplosionen Natten mellem den 17. og 18. September stod mellem „Centrum“ og „Tubbak“, og til hvem en ung Dame henvendte sig med Spørgsmaal om, hvad det var som eksploderede, bedes henvende sig paa Politikontoret. Den paagældende er lille og spinkel og var iført mørkt Jakkesæt og en stribet Trøje.
Thorshavn, den 12. Oktober 1945.
LANDFOGEDEN

Lyset driver Værket
Derfor en
PHILIPS
en gros
en detail
FRITHIOF WELLEJUS
Thorshavn
Tlf. 154

BRÚKIÐ FØROYSKT MARGARIN

Hesa lýsingina lat fútin prenta í Dimmalætting 13. oktober 1945. Í skjølunum sæst einki til, at nakar vendi sær til løgregluna við upplýsingum um, at viðkomandi var tann ókendi maðurin við „Centrum“ og „Tubbak“.

Meðan fráveruprógvini hjá Johan Ziska, Palla Ziska og serliga tað hjá Preben Ziska vórðu heilt væl kannaði av løgregluni, so sæst lítið til, at løgreglan nakrantíð kannaði fráveruprógvini hjá Christoffer Ziska og Mariusi Ziska – hóast Marius Ziska í „spøg“ varð settur í samband við bumbuspreingingina. Ein orsøk til, at løgreglan ikki hevur tikið hetta – „spøg“ og „drilleri“ – fyri annað enn „spøg“ og „drilleri“ er óivað tann, at Karl Johan Poulsen og Elsa Hansen einans tykjast hava sagt hetta við Marius Ziska sjálvan. Var nakað annað enn skemt í hesum skemtinum, so høvdu tey valla bert fortalt tað fyri Mariusi Ziska sjálvum – helst bert fyri øðrum fólki. Ein onnur orsøk til, at løgreglan hevur góðtikið fráveruprógvini hjá Mariusi Ziska og Christoffer Ziska hevur óivað verið, at einki vitni segði seg hava sað nakran av teimum í býnum hetta kvøldið. Í endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus tykist tað eisini framganga, at summi hava verið avhoyrd á løgreglustøðini við støði í frágreiðingunum, uttan at nýggj frágreiðing varð skrivað. Í so fall eru óivað onkur ivamál avgreidd óformliga. Fráveruprógvið hjá Johan Ziska kann vera blivið „konstateret“ við tílíkum óformligum samrøðum við fólk.

Hesir rættiliga avgerandi spurningar vóru sambært tilfarinum frá tí rættiliga drúgva kanningararbeiðinum, sum er varðveitt á Tjóðskjalasavninum í Havn, ongantíð svaraðir. Tað hevði eisini við sær, at fútin ongantíð skuldsetti nakran fyri at hava framt atsókn móti tinghúsinum 18. september 1945. Tað eydnaðist ongantíð løgregluni at finna próvtilfar, sum fútin metti kundi halda í einum rættarmáli. Okkurt ósamsvar var millum onkrar frágreiðingar, men einki ósamsvar var so avgerandi, at nakar illtonktur kundi skuldsetast fyri at hava verið við løgtingshúsið um 1 tíðina 18. septembur 1945, tá ið ein ógvuslig spreinging var við løgtingshúsið.

Í óprentaðu endurminningum sínum, sum eru festar á blað í 1960-unum og í 1970-unum, upplýsti Kristian Djurhuus, at hann hevði illgruna til nøkur fólk: „Efterhånden kom politibetjentene tilbage til politistationen med de indsamlede oplysninger. Desværre var disse faktisk værdiløse, dog havde pb. Clementsen udvist flid og interesse.

De andre virkede sløve og modvillige, hvilket medførte, at jeg følte mig provokeret til at give dem en opsang. Men efterhånden, som aftenen skred frem,“ – t.e. longu 18. september 1945 – „havde jeg afhørt en del personer, som jeg mente, man kunne rette mistanke imod, blandt disse var A. Ziska og Thom Nicolajsen. Efterhånden som afhøringerne skred frem, fremkom der modsigelser, der yderligere bestyrkede min mistanke, og havde jeg antydet, at der nu kunne blive tale om anholdelse, men da Henry Djurhuus mærkede, at sagen nu fik en alvorlig drejning, blev han bange og smittede dette af på de øvrige betjente. Det arbejdet, som jeg for at sikre mig yderligere beviser skulle have og som jeg sendte betjentene i byen efter at søge fremskaffet, fik jeg ikke – jeg mener som følge af betjentenes negative indstilling – dog Clementsen undtagen“ (Djurhuus 1962-1966, 867). Tá tað sostatt ikki eydnaðist løgreglumonnunum at fáa tey neyðugu prógvini til vega, soleiðis at hann kundi loysa málið, fór Kristian Djurhuus til amtmannin og segði við hann, at hann ikki ynskti at halda á við kanningararbeiðinum. Hóast stórt kanningararbeiði varð gjørt, eftir at Kristian Djurhuus hevði lagt frá sær, so eydnaðist tað heldur ikki fútanum at finna nøkur prógv.

Kristian Djurhuus er ikki mjúkur við løgreglufólkini, men tað er vert at leggja merki til, at bæði Andrias Ziska og Thomas Nicolajsen høvdu sambært sínum frágreiðingum fyri løgregluni síni egnu fráveruprógv – t.e. teir vóru í songini heima við hús og svóvu, tá ið bumban brast við løgtingið. Teir vórðu báðir avhoyrdir eina ferð, 18. september, og tað finst eingin onnur frágreiðing frá teimum, har spurt verður nærri inn til fráveruprógv teirra. Heldur ikki í brævasamskiftinum millum Kristian Djurhuus og C. A. Vagn-Hansen, dagfest 26. og 27. september, har báðir nevna onnur, sum áttu at verið avhoyrd, – aftur ella fyrstu ferð – nevndi nakar av teimum, at Andrias Ziska ella Thomas Nicolajsen áttu at verið avhoyrdir eina ferð afturat. Tað samsvarar illa við upplýsingar í endurminningunum hjá Kristiani Djurhuus, sum sipaðu til kanningararbeiðið hjá løgregluni meðan Kristian Djurhuus framvegis var í Havn – og sum

vóru festar á blað umleið 20 ár seinni. Um Kristian Djurhuus longu 18. september hevði illgruna til Andrias Ziska og Thomas Nicolajsen, so átti løgreglan, um ikki annað fútin C. A. Vagn-Hansen, sum longu 19. september sjálvur avhoyrdi vitnir, uttan mun til, um teir báðir sótu avbyrgdir ella gingu leysir, at kanna fráveruprógvini hjá teimum neyvari. Tað sæst ikki vera gjørt, fráveruprógvini hjá teimum báðum blivu ikki kannaði, og hvørki Kristian Djurhuus ella C. A. Vagn-Hansen nevndi hetta nærum eina viku seinni, tá ið teir í brævasamskifti sínámillum umrøddu, hvørji fráveruprógv áttu at verið kannað nærri. Tað kann illa skiljast á annan hátt enn, at antin vóru Andrias Ziska og Thomas Nikolajsen ikki longur (26. september 1945) undir illgruna av sýslumanninum ella eisini pyntaði Kristian Djurhuus nakað uppá hetta málið, sum hann sjálvur hevði ábyrgdina av, í sínum endurminningum frá 1960-unum.

PETUR MOHR DAM OG BUMBUMAÐURIN

Frammanfyri er skilt millum objektiv og subjektiv viðurskifti, har tey fyrru sipa til viðurskifti, sum eru óheft av tí, sum viðkomandi fólk halda, meðan tey seinnu eru heft at eini meting av, hvat viðkomandi fólk kunnu hava hildið, hugsað ella gjørt í eini ávísari støðu. Knappliga 25 ár aftaná bumbuspreingingina við løgtingið komu nakrar upplýsingar fram, sum – um tær eru eftirfarandi – kunnu brúkast til reint objektivt at útihýsa ávís fólk frá illgruna um at hava staðið aftanfyri bumbuspreingingina við løgtingið. Ein granskari kann hava góðar subjektivar grundir til at halda, at eitt ávíst fólk illa kann hava framt eina ávísa gerð, m.a. vitan um førleikarnar hjá hesum ávísa fólkinum, men fær granskarin prógv fyri, at nevnda fólk ikki var har, sum tað skuldi havt framt nevndu gerð, tá ið nevnda gerðin varð framd, so hevur granskarin fingið eitt objektivt prógv fyri, at viðkomandi fólk ikki kann hava framt nevndu gerð. Viðkomandi kann sjálvandi á annan hátt hava verið partur av gerðini, men viðkomandi

kann ikki sjálv/ur hava framt gerðina. Tað eru hetta seinna slagið av upplýsingum, sum komu undan kavi eftir spreingingina við løgtingið, ið vit nú skulu kanna nærri.

Rigmor Dam (1971-), abbadóttir Petur Mohr Dam, hevur í eini røðu upplýst (Dam 2019), at tá ið Petur Mohr Dam gjørdist løgmaður, vórðu boð send eftir honum frá einum manni, sum lá til at doyggja. Hesin maðurin hevði sent boð eftir Peturi Mohr Dam fyri at vátta illgerð sína í 1945 fyri løgmanni, og fyri at biðja løgmann um fyrigeving. Sambært Rigmor Dam fekk hesin maðurin játtað sína umbøn frá løgmanni, men Petur Mohr Dam helt hesa søgu fyri seg sjálvan og tók loyndarmálið um bumbumannin við í grøvina. Samanhangurin tykist benda á, at bumbumaðurin ikki hevði fortalt nøkrum øðrum fólki sítt loyndarmál. Eingin veit sostatt sambært hesi frásøgnini longur nakað um, hvør maðurin var, men um so er, at hald er í søguni, – sambært Rigmor Dam er talan um eina almenna søgu í Dam familjuni – so tykist tað trupult at ímynda sær, at Ziska brøðurnir, sum sambært onkrum keldum vóru undir illgruna, hava verið illgerðarmenninir, tí teir allir vóru ungir í 1945, og – uppaftur meira umráðandi í hesum høpi – allir yvirlivdu Petur Mohr Dam við fleiri árum.

Tann avgerandi spurningurin er, um hald er í hesi seinnu frásøgnini hjá Rigmor Dam.

Frásøgnin eigur – sjálvandi við neyðugum keldukritiskum fyrivarni í sambandi við munnligar keldur – at takast í álvara. Bergur P. Dam, pápi Rigmor Dam og sonur Petur Mohr Dam, hevur fingið søguna frá pápa sínum, Peturi Mohr Dam, í 1967 ella 1968, tá ið hann var Føroya løgmaður seinnu ferð (Dam 2021A og Dam 2021B). Tann angrandi bumbumaðurin lá á sjúkrahúsinum í Havn, tá ið hann sendi boð eftir Peturi Mohr Dam. Bergur P. Dam er hinvegin ikki so vísur í, at hesin maðurin hevði sent boð eftir Peturi Mohr Dam *meðan* hann var løgmaður, – fyrru ferð í 1959-1963, seinnu ferð 1967-1968 – men einans, at tann ónevndi maðurin *hevði* vent sær til Petur Mohr Dam í 1967-1968, tá ið Petur Mohr Dam lat søguna víðari til Berg P. Dam. Bergur P. Dam hevði í fyrstuni hildið, at maðurin hevði vent sær til Petur Mohr Dam *í* 1967-1968, men hann heldur nú, at hann møguliga misskilti hetta, tí *hann* hevði hoyrt søguna í 1967-1968. Bergur P. Dam var ikki heilt vísur í, at ónevndi maðurin hevði vent sær til Petur Mohr Dam í 1967-1968, men einans, at maðurin hevði gjørt tað onkuntíð *ímillum* 18. september 1945 og 8. november 1968. Petur Mohr Dam hevði eisini fortalt honum, at maðurin segði seg hava lagt bumbuna við løgtingshúsið, og at bumban var ætlað Peturi Mohr Dam. Bumbumaðurin hevði heitt á Petur Mohr Dam um at halda loyndarmálið fyri seg sjálvan, og ikki avdúka hann fyri nøkrum. Tað lyftið gav Petur Mohr Dam manninum, og hann tók sostatt loyndarmálið um tann fyrsta (føroyska) bumbumannin við sær í grøvina, tá ið hann doyði í november 1968.

Petur Mohr Dam hevði eisini fortalt honum, at maðurin, sum var deyðasjúkur, doyði heilt stutt eftir, at hann hevði vent sær til hansara, t.e. í seinasta lagi 8. november 1968, tá ið Petur Mohr Dam sjálvur doyði. Um hald er í hesi søgu, so tykist hon í fyrra lagi útihýsa, at bumbumaðurin bert tók ábyrgdina av bumbuspreingingini á seg fyri at reinsa onkran annan, t.d. fyri at reinsa síni børn, sum antin vóru sek í illgerðini ella einans vóru undir illgruna. Nakað tílíkt hevði lítla ella onga meining havt fyri mannin, uttan so, at „loynidómurin“ eisini gjørdist almennur – og ikki varð verandi loyniligur. Frásøgnin tykist benda á, at talan var um eina roynd hjá manninum at reinsa sína heilt persónligu skuldarkenslu mótvegis Peturi Mohr Dam. Hendan frásøgnin kundi harumframt bent á, at bumbumaðurin hevði okkurt annað at verja, sítt umdømi, eina familju ella okkurt meira umráðandi enn einans seg sjálvan, sum gjørdi, at navn hansara ikki mátti avdúkast og alment setast í samband við atsóknina móti løgtingshúsinum. Í seinna lagi tykist henda frásøgnin, um hon er sonn, útihýsa, at Preben Ziska, sum doyði í 2001, ella nakar annar av Ziska brødrunum, sum allir yvirlivdu Petur Mohr Dam við fleiri árum, kunnu hava lagt og síðan sprongt bumbuna við tinghúsið heystnáttina 18. september 1945. Í veruleikanum kann eingin, sum doyði aftaná

november 1968, vera maðurin, sum vendi sær til Petur Mohr Dam. Hetta tykist vera ein objektiv fylgja av søguni hjá Peturi Mohr Dam um tann angrandi bumbumannin.

Hendan frásøgnin um bumbumannin og Petur Mohr Dam eigur sjálvandi at lesast og skiljast við tí neyðuga fyrivarni, at vit hvørki hava orðini hjá frásøgumanninum, sum seinni – helst nógv ár seinni – setti orð á sínar upprunaligu gerðir og ætlanir við bumbuspreingingini í 1945 ella orðini hjá Peturi Mohr Dam, sum fekk hesa frásøgn frá frásøgumanninum – vit hava einans varðveitt eina útgávu av hesi frásøgnini, soleiðis sum Bergur P. Dam minnist seg hava fingið hana frá Petur Mohr Dam einaferð í 1967-1968. Í veruleikanum hava vit bert eina útgávu av søguni, sum *eg* havi skrivað niður eftir tvær samrøður við Bergur P. Dam í november í 2021.

Her er neyðugt við varsemi og neyvum keldukritikki í sambandi við nýtsluna av hesi seinni varðveittu søgu.

Tað eru fleiri varðveitingarlið í søguni, sum kunnu gera, at feilir eru komnir inn í søguna. Tað ber enntá til at ivast í, um frásøgumaðurin sjálvur, sum kanska ikki segði frá søguni fyrr enn meira enn 20 ár seinni, mintist ella ætlaði at siga frá øllum heilt rætt. Tað er eisini okkurt í hesi frásøgn, sum hon er varðveitt, ið tað ber til at seta spurnatekin við – tað koma vit aftur til. Tað tykist hinvegin trupult at seta spurnatekin við, at Petur Mohr Dam gav Bergur P. Dam álítandi upplýsing um, at frásøgumaðurin *var deyður*, tá ið Petur Mohr Dam segði honum frá søguni *í 1967-1968* – uttan so, at Petur Mohr Dam *við vilja* gav honum skeivar upplýsingar.

Tann møguleikin tykist ósannlíkur, men hann kann neyvan heldur fullkomiliga útihýsast. Akkurát hetta, at bumbumaðurin var deyður, kann sjálvandi ikki vera ein meira ella minni álítandi upplýsing, sum Petur Mohr Dam hevði fingið *frá* bumbumanninum, men hetta má vera nakað, sum Petur Mohr Dam *sjálvur* má hava upplivað ella fingið váttað frá onkrum øðrum enn bumbumanninum. Um eingin annar enn Petur Mohr Dam visti, hvør „tann angrandi bumbumaðurin“ var, so kann upplýsingin um, at hann var deyður, neyvan heldur stava frá nøkrum øðrum enn frá Peturi Mohr Dam. Tað er á sama hátt torført at ímynda sær, at Bergur P. Dam kann hava misskilt akkurát hesa upplýsingina, – at frásøgumaðurin var deyður – og hann kann valla hava fingið hesa upplýsingina um tann ónevnda – anonyma – bumbumannin frá nøkrum øðrum enn *Peturi Mohr Dam*, sum var tann einasti, sum kendi mannin og kundi vita og fortelja nøkrum øðrum, at hann var deyður (í november 1968). Keldukritiskt sæð ber illa til at ivast í *hesum* partinum av tí varðveittu frásøgnini, uttan so, at Petur Mohr Dam av onkrari grund ikki hevur givið Bergi P. Dam heilt rætta upplýsing um hetta.

Hetta seinasta skulu vit koma aftur til um eina løtu.

Aðrar upplýsingar um søguna, sum Petur Mohr Dam hevði fingið *frá* frásøgumanninum, kunnu í ringasta føri vera íspunnar av tí deyðasjúka frásøgumanninum, sum kortini tykist vera ósannlíkt, men vit noyðast at vera meira kritisk mótvegis upplýsingum, sum hava verið gjøgnum fleiri varðveitingarlið, áðrenn tær eru komnar okkum í hendi. Tað er ósannlíkt, at ein maður, sum lá til at doyggja, skal hava funnið uppá alla søguna, men tess longri tíð gongur frá hendingini, til hon verður fortald og niðurskrivað, tess fleiri varðveitingarliðini eru í eini munnliga varðveittari frásøgn, tess størri er vandan fyri, at feilir eru í tí endaliga varðveittu frásøgnini. Í veruleikanum kunnu vit ikki við vissu vita, um tann deyðasjúki maðurin, sum í tíðarbilinum 1945-1968 vendi sær til Petur Mohr Dam, var bumbumaðurin, men omanfyri er grundgivið fyri, at samanhangurin í frásøgnini tykist benda á, at tann deyðasjúki maðurin mest sannlíkt mundi vera bumbumaðurin. Um frásøgumaðurin ikki var bumbumaðurin, men einans fann uppá søguna, so er tað trupult at skilja, at hann ikki vildi hava, at søgan skuldi gerast almenn, tí endamálið við tí íspunnu søguni hevði verið eitt sindur trupul at fingið eyga á. Tá fólk taka ábyrgd av illgerðum, sum tey í veruleikanum ikki hava ábyrgdina av, so er endamálið ofta júst at koma í miðdepilin fyri nakað, sum onnur hava gjørt. Hví taka ábyrgdina av eini illgerð, sum onkur annar ella onnur hava framt, og samstundis ynskja at halda tað loyniligt fyri øllum øðrum? Tað er ikki so lætt at skilja. Hetta kundi bent á, at eisini hendan upplýsingin í søguni, at frásøgumaðurin var bumbumaðurin, er sannlík.

Fólk, sum objektivt sæð ikki kunnu útihýsast sambært Petur Mohr Dam metingarstøðinum

Verður frásøgnin hjá Peturi Mohr Dam (Bergi P. Dam) um, at bumbumaðurin varð deyður, áðrenn Petur Mohr Dam doyði í november 1968, brúkt til at útihýsa møguligum bumbumonnum, so verða hesi níggju fólkini eftir millum tey, sum vórðu avhoyrd av løgregluni í sambandi við kanningarnar í 1945 (tá eru fólk, sum einans vóru nevnd í frágreiðingunum, tí tey m.a. áttu eini hús, sum vóru viðkomandi fyri eina ávísa staðfesting, t.d. Arthur Brend og Jens Poulsen, løgreglufólk og onkur fólk, sum tað ikki hevur borið til at eyðmerkja ella staðfesta føði- og serliga deyðadag hjá, tikin burturúr), ið *kunnu* hava framt atsóknina:

Thomas Nicolajsen (1877-1950).
Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim (1881-1954).
Anton á Krákusteini (1892-1958).
Andrias Ziska (1883-1960).
Arthur Juul Rasmussen (1904-1963).
Johan Johannesen (1906-1965).
Magnus Andreas Samuelsen (1886-1965).
Páll Patursson (1894-1967).
Johan Hendrik Danbjørg (1896-1968).

Tað merkir sjálvandi ikki, at bumbumaðurin skal finnast millum hesar menn. Tað merkir bert, at við støði í akkurát *hesum* objektiva (í týdninginum óheft váttað, ikki endiliga staðfest) metingarstøði (deyðir áðrenn Petur Mohr Dam í november 1968) ber ikki til at útihýsa hesar. Bumbumaðurin kann hava verið ein, sum ongantíð var millum tey, ið løgreglan tosaði við. Hesi níggju fólkini kunnu møguliga útihýsast av *øðrum* grundum, eisini av grundum, sum vit einki kenna til. Her eru nøkur kend dømi. Felags fyri øll, uttan Johan Hendrik Danbjørg og Artur Juul Rasmussen er, at tey stuðlaðu andstøðuna ímóti løgtingsmeirilutanum á løgtingi.

Harumframt er mær fortalt, at Magnus Andreas Samuelsen varð hildin at vera sambandsmaður.

Johan Hendrik Danbjørg var beinleiðis millum tey 13 løgtingsumboðini, sum sótu eftir í løgtinginum, har teir m.a. samtyktu krónumálið, til 15. september, tá ið løgtingið fór heim. Johan Hendrik Danbjørg hevur sostatt einki motiv. Í øllum førum ikki nakað motiv, sum vit vita nakað um. Harafturat kemur, at Johan Hendrik Danbjørg doyði í Porkeri – ikki á sjúkrahúsinum í Havn – 23. juli 1968. Johan Hendrik Danbjørg tykist sostatt útihýstur av øðrum kendum grundum – kanska objektivum. Arthur Juul Rasmussen tyktist hinvegin sambært keldunum meira vera ímóti Fólkaflokkinum enn fyri løgtingsmeirilutanum, og hann passar tí illa inn í myndina av, at tað var andstøðan, sum stóð aftanfyri atsóknina móti løgtingshúsinum. Heldur ikki er hann nakrastaðni nevndur ella í keldunum nakrantíð settur í samband við bumbuatsóknina.

Hinir hoyrdu teir flestu til politisku andstøðuna móti teimum 13 í løgtingsmeirilutanum. Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim og Andrias Ziska høvdu báðir í august 1945 verið í løgtinginum og mótmælt, at løgtingið viðgjørdi tað føroyska krónuvirðið, eftir at Fólkaflokkurin varð rýmdur úr løgtinginum. Thomas Nicolajsen hevði hinvegin upplýst, at hann skilti bumbuatsóknina móti løgtingshúsinum, men hann tók kortini ikki undir við bumbuatsóknini, og segði seg vera heima í songini og sova, tá ið bumban brast. Andrias Ziska doyði sambært minningarorðum av elli, – valla á sjúkrahúsinum – meðan Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim sambært minningarorðum hevði verið sjúkur leingi, áðrenn hann doyði í 1954. Báðir søgdu teir seg vera heima, tá ið bumban brast, og eingi vitni høvdu sæð teir úti um tað mundið, tá ið bumban brast. Anton á Krákusteini, sum hjálpti Andriasi Ziska við at geva út blaðið *Fríu Føroyar*, hevði stórt sæð ongan leiklut í kanningararbeiðinum, og varð ikki undir illgruna. Anton á Krákusteini hevði verið hjá Andriasi Ziska um kvøldið tann 17. september, var farin heim um 23-tíðina, og kundi bert upplýsa, at hann á veg heim hevði sæð tveir løgreglumenn við bókahandilin,

tá hann fór framvið har. Arthur Juul Rasmussen segði seg einki vita um atsóknina, men helt, at Fólkaflokkurin stóð aftanfyri. Arthur Juul Rasmussen tykist sostatt ikki hava stuðlað andstøðuni í løgtinginum, heldur tvørturímóti. Arthur Juul Rasmussen hevði handan dagin verið til arbeiðis hjá John Johansen (1897-1970) til klokkan 22.00, tá ið hann fór heim at eta. Hann fór síðani ein túr „Oman í Bakka" og gekk eftir Kongabrúnni, har hann sá tvey løgreglufólk – helst Thomas Wilhelm og Jacob Andreas Arge – við Sjóvinnubankan. Hann fór heim umleið klokkan 00.30 og sá ongan annan enn teir báðar løgreglumenninar. Johan Johannesen var sambært Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim eisini í løgtinginum og mótmælti, at løgtingið viðgjørdi krónumálið í august 1945, men hann var ongantíð avhoyrdur í sambandi við bumbumálið, og hann var einans nevndur í frágreiðingina hjá Niclas Vilhelm Jacob Tórsheim í sambandi við mótmælið ímóti, at løgtingið viðgjørdi krónumálið í august 1945. Magnus Andreas Samuelsen varð ongantíð avhoyrdur fyri annað enn tøknilig viðurskifti í sambandi við spreinging, sum hann var kønur í, men løgreglufólk høvdu eftir øllum at døma illgruna til hann, tó við einum heilt øðrum motivi enn, at hann var loysingarmaður – sí seinni. Páll Patursson – ein kendur sjálvstýrismaður – doyði eftir drúgva sjúkalegu á sjúkrahúsinum í Havn í 1967, men hann segði seg ikki hava verið úr Kirkjubø í umleið eina viku, áðrenn bumban brast við løgtingið, og eingi av vitnunum søgdu seg heldur hava sæð hann í Havn um tað mundið ella við løgtingið stutt áðrenn ella stutt eftir, at bumban brast 18. september 1945.

Hesi dømi vísa, at tað einasta, sum nevnda Petur Mohr Dam metingarstøðið í sjálvum sær kann brúkast til, er at útihýsa møguleikar, meðan tað í sjálvum sær ikki kann brúkast til at prógva – verifisera – nakað við. Hesi níggju fólkini kunnu tey flestu útihýsast av øðrum grundum, onkur passar betri til tann profilin, sum lagt verður upp til, men eingin verður sekur einans av tí grund, at hann var deyðasjúkur og doyði áðrenn november 1968. Eisini mugu vit hava í huga, at vit ikki hava nakað staðfest motiv, sum knýtir bumbumannin at nøkrum serligum politiskum sjónarmiðum. Vit hava bert ein samanhang, sum kundi bent á, at bumbuatsóknin hevði eitthvørt við krónustríðið og sjálvstýris-/loysingarspurningin at gera. Tað útihýsir ikki, at motivið aftanfyri bumbuatsóknina kann hava verið okkurt annað enn andstøðusjónarmið.

Eitt motiv, sum ikki er staðfest, kann í sjálvum sær valla brúkast til nógv annað enn at reisa (ógrundaðan) illgruna móti ávísum fólkum, sum hava ávís sjónarmið, men saman við prógvum móti ítøkiligum fólki/um eru staðfest motiv góð. Meðan prógv knýta seg at ítøkiligum fólki/um, so eru motiv í sjálvum sær einans knýtt at sjónarmiðum, sum rættiliga nógv fólk ofta kunnu hava í felag. Tað ber sostatt illa til at skuldseta m.a. loysingarfólk fyri at hava lagt bumbuna við løgtingið einans tí tey vóru loysingarfólk, men finna vit prógv fyri, at eitt ávíst fólk var við løgtingið beint áðrenn bumban brast, og hetta fólkið var loysingarfólk, so hava vit møguleika fyri at stuðla prógvunum móti hesum fólkinum við einum ávísum motivi. Er hetta fólkið hinvegin sambandsfólk, so er neyðugt at finna eitt heilt annað motiv fyri at hava lagt bumbuna.

Vit hava eingi prógv, sum kunnu stuðlast við ávísum motivum – m.a. sambands- ella loysingarsjónarmið.

Um so er, at Petur Mohr Dam, áðrenn hann doyði í november 1968, gav Bergi P. Dam rætta upplýsing um, at frásøgumaðurin *var* deyður, og frásøgumaðurin *var* bumbumaðurin, so ber til at koma til ta niðurstøðu, at eingin av teimum avhoyrdu ella mistonktu, sum vóru á lívi í november 1968, kann hava verið hann/hon, sum – einsamallur/einsamøll ella fyri onkran annan – legði bumbuna við løgtingshúsið 18. september 1945.

Nærri eini niðurstøðu ber helst illa til at koma við støði í hesi nógv seinni frásøgnini hjá Peturi Mohr Dam.

Marius Ziska doyði í 1971 sum tann fyrsti av Ziska brødrunum eftir eina drúgva sjúkalegu og herviliga sjúku. Marius Ziska hevði í 1969

fingið stóra skurðviðgerð á ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn fyri krabbamein, men krabbasjúkan hevði longu tá gjørt so nógv um seg, at læknarnir einki kundu gera fyri at lekja sjúkuna.

Frásøgnin, sum Bergur P. Dam fekk fortalda frá Peturi Mohr Dam í 1967-1968, tykist sostatt objektivt sæð útihýsa Ziska brødurnar frá at hava lagt/sprongt bumbuna við tinghúsið týsnáttina 18. september 1945. Tað kann hinvegin valla útihýsast, at „tann angrandi bumbumaðurin" vardi møgulig samsek við einki at upplýsa.

Tá Marius Ziska var rættiliga sjúkur stutt eftir, at Petur Mohr Dam doyði og eisini sum tann einasti av Ziska brødrunum doyði stutt eftir, at Petur Mohr Dam doyði, skulu vit kortini hyggja eitt sindur nærri eftir hesum.

Ein spurningur er, um Petur Mohr Dam kann hava vart bumbumannin við at hava givið Bergi P. Dam óneyvar upplýsingar í 1967-1968. Ziska brødurnir gjørdust rættiliga gamlir menn og doyðu millum 1998 og 2004, t.e. nógv ár aftaná, at Petur Mohr Dam doyði 8. november í 1968. Teir kunnu sostatt valla hava verið deyðasjúkir í 1968. Einasta undantakið kann vera Marius Ziska, sum var rættiliga sjúkur í 1969, men hann er sambært frásøgnini hjá Bergi P. Dam eisini útihýstur. Tað ber einans til at sleppa undan mótsøgnini, – útihýsingini av Mariusi Ziska – um so er, at gingið verður út frá, 1) at Marius Ziska var deyðasjúkur longu í november 1968, óivað væl fyrr, 2) at Marius Ziska lá á sjúkrahúsinum í Havn í seinasta lagi í november í 1968, óivað væl fyrr, 3) at fráveruprógv hansara, at hann bumbukvøldið í 1945 var heima frá klokkan 23.00 til 00.55, ikki heldur og 4) at Petur Mohr Dam í seinasta lagi 8. november í 1968, óivað nakað fyrr, upplýsti fyri Bergi P. Dam, at bumbumaðurin longu var deyður, hóast hann ikki doyði fyrr enn knappliga trý ár eftir (t.e. 14. juni 1971), at Petur Mohr Dam doyði. Harumframt mugu vit ganga út frá, at bumbumaðurin setti seg í samband við Petur Mohr Dam rættiliga seint í lívi hansara, nakað, sum Bergur P. Dam als ikki var vísur í – tað kundi havt verið longu í oktober 1945. Fellur bara ein av hesum fyritreytunum, so er Marius Ziska útihýstur. Ikki minst fjórða punktið, sum er í stríð við frásøgnina hjá

Bergi P. Dam, tykist ósannlíkt. Men leita vit eftir eini grundgeving fyri, at Petur Mohr Dam skuldi havt givið Bergi P. Dam skeivar upplýsingar, so kundi ein orsøk verið, at hann vildi verja deyðasjúka mannin. Hevði Petur Mohr Dam upplýst, at bumbumaðurin enn var á lívi 8. november 1968, – ella tá hann í 1967 ella 1968 fortaldi søguna fyri Bergi P. Dam – so kundi tað styrkt um forvitnið hjá áhoyrarunum, meðan ein upplýsing um, at hann var deyður, kundi minkað um áhugan hjá áhoyrarunum fyri bumbumanninum. Tað hevði kanska verið ein lættur háttur at lagt lok á hendingina, um bumbumaðurin var deyður. At Petur Mohr Dam vardi bumbumannin sæst m.a. av, at hann ikki vildi upplýsa navnið á manninum fyri Bergi P. Dam. Bumbumaðurin skuldi ikki avdúkast fyri nøkrum. Eisini vita vit frá frásøgnini um, at ein av Ziska brødrunum í september 1945 fylgdi aftaná Petur Mohr Dam, at Petur Mohr Dam vardi Ziska bróðurin ímóti løgregluni, tá hann ikki vildi upplýsa ella avdúka navnið á manninum fyri løgregluni. Kanska er tað ikki heilt óhugsandi, at Petur Mohr Dam hevur upplýst fyri Bergi P. Dam, at maðurin var deyður, hóast hann einans var sjúkur. Í so fall fríkendi Petur Mohr Dam ein bumbumann, sum hann visti var sekur.

Her skulu vit kortini hava í huga, at vit hava onga ábending um, at Petur Mohr Dam her hevur givið Bergi P. Dam skeiva upplýsing. At halda eina upplýsing *aftur* (navn) kann heldur ikki samanberast við at geva *skeiva* upplýsing (deyður). Heldur ikki hava vit nakrar upplýsingar um, at Marius Ziska var við løgtingið um kvøldið ella náttina, tá bumban brast 18. september 1945. Ei heldur hava vit millum tey nógvu vitnini nakra/n, sum upplýsir, at Marius Ziska var í býnum hetta kvøldið. Einastu upplýsingar, sum vit hava, eru, at Marius Ziska kom heim umleið klokkan 23.00, fekk sær at eta saman við konuni, – mamman var eisini har og Johan Ziska kom nakað seinni – og so fóru hjúnini umleið klokkan 00.15 í song, har tey lógu og tosaðu til klokkan 00.55, tá bumban brast við tingið 18. september 1945. Kanska lá teirra fyrst fødda barn, sum tey høvdu fingið 8. januar 1945, eisini í kamarinum og svav. Tá spreingingin hendi fór Marius Ziska út saman við Johan Ziska og Preben Ziska. Løgreglan tykist heldur ikki

hava havt illgruna til Marius Ziska, hóast onkur – sum fyrr vísst á – í spølni settu hann í samband við bumbuatsóknina. Marius Ziska varð avhoyrdur 18. september 1945 og varð ikki aftur avhoyrdur. Tað kann valla skiljast øðrvísi enn, at løgreglan hevur góðtikið frágreiðing og fráveruprógv hjá Mariusi Ziska. Heldur ikki er nakað í tí seinni søguni hjá Peturi Pohr Dam, sum bendir á, at *nakar* av Ziska brøðrunum var bumbumaðurin. Tvørturímóti, so útihýsir søgan hjá Peturi Mohr Dam *allar* Ziska brøðurnar. Tað tykist heldur ikki sannlíkt, – skilvíst – at Petur Mohr Dam mótvegis soninum, sum hann valdi at fortelja søguna, skal hava havt nakra orsøk til at royna at leggja lok á hendininga – í veruleikanum fríkenna ein bumbumann, sum hann visti var sekur – við at geva honum skeivar upplýsingar um hendingina.

Eftir at hava umrøtt henda møguleika er niðurstøðan, at tað illa ber til at verja ein frammanundan ivasaman illgruna móti einum manni, sum harumframt hevur eitt sannførandi (eingin setti nakað spurnatekin við tað) fráveruprógv, við eisini at ganga út frá, at ein munnlig kelda hevur givið skeivar upplýsingar um hann. Tað er ikki sannførandi. Niðurstøðan er tí tann sama, hóast okkurt samanfall – og mótstríð – er millum lagnuna hjá Mariusi Ziska og frásøgnina hjá Peturi Mohr Dam, at søgan hjá Peturi Mohr Dam útihýsir *allar* Ziska brøður.

Tað fylgir av granskingartilgongdini í hesi bókini, – at útihýsa heldur enn at prógva – at fyri at sleppa undan at seta ógrundaðar illgrunar fram móti nøkrum, verður ikki leitað eftir fólkum, sum doyðu orsakað av sjúku í tíðarskeiðunum 1945-1968. Tað eru uttan iva so nógv fólk, – nevnd eins og ónevnd í keldutilfarinum – sum doyðu – í Havn ella Føroyum – orsakað av sjúku í hesum langa tíðarskeiðinum, at ein tílík tilgongd bert kann brúkast til at vekja ógrundaðar illgrunar móti ávísum fólki. Her hevur tilgongdin verið tann øvuta, at útihýsa ógrundaðar illgrunar, sum av onkrari grund hava verið reistir móti ávísum fólkum í sambandi við atsóknina.

Tað slepst tó ikki undan, at onkur av teimum rættiliga nógvu avhoyrdu, doyðu av sjúku fyri november 1968, men tilfarið hevur eingi prógv fyri, at nøkur av hesum stóðu aftanfyri atsóknina, fleiri eru hinvegin útihýst.

BUMBUATSÓKNIN OG PETUR MOHR DAM

Eitt er, at tað er sannlíkt, at bumbumaðurin sjálvur setti seg í samband við Petur Mohr Dam, nakað annað er, um alt tað, sum hann sambært varðveittu frásøgnini upplýsti fyri Petur Mohr Dam, samsvarar við keldur. Frásagnir, sum í sjálvum sær kunnu tykjast sannlíkar, kunnu gerast ósannlíkar, um tær ikki samsvara við tær avgerandi samtíðarkeldurnar. Í søgu mugu sannlíkindi altíð metast við støði í avgerandi samtíðarkeldunum. Her er tað serliga sjónarmiðið, at bumban var ætlað Peturi Mohr Dam, sum skal lýsast og viðgerast neyvari.

Tað, sum samtíðarkeldur vita at siga frá, er, at tvey fólkavald javnaðartingfólk og tvey onnur javnaðarfólk vóru í løgtinginum og fundaðust á loftinum í nakrar tímar hetta heystkvøldið í september 1945 – og tey vóru øll fýra har til umleið klokkan 23.55. Tey fýra høvdu sitið uppi á loftinum í løgtingshúsinum frá í øllum førum klokkan 20.30 til klokkan 23.55. Keldurnar vita eisini at siga frá, at ljós var í bygninginum, í øllum førum á loftinum, og at javnaðarfólkini sløktu

Eingin rútur var heilur í Tinghúsinum.

Foto: Eli Mortensen

Tá bumban brast í løgtinginum 1945

Hesar myndir vísa nakað av tí skaðanum, sum hendi av eini dynamittbumbu, ið brast undir útnyrðingshornínum av løgtingshúsinum í september 1945. Tann ella teir, sum høvdu lagt bumbuna vórðu ikki funnir, hóast politiið lovaði 5.000 kr. til hansara sum kundi geva upplýsingar, ið fórdu við sær, at henda brotsgerð varð uppklárað.

Bumban brast um eitt tíðina týsmorgunin 18. september. Bresturin var so hvøllur, at ein stórur partur av Havnarfólki støkk upp úr seingini. Hol varð sprongt á grundina undir tinghúsinum og nakað av klædninginum skrædnaði. Allir rútarnir brotnaðu og gipsmyndirnar av Fríðrikki 7. og 8. eins og gipsmyndin av Kristiani 9. brotnaðu, meðan myndin av Kristiani 10. varð standandi óskadd.

Rútarnir fóru í kommunuskúlanum, telefonstøðini, í fleiri handlum í Niels Finsensgøtu og niðri í Vágsbotni.

Ikki uppklárað

Gitingarnar vóru nógvar, um hvør mundi hava framt brotsverkið, og tíðindi uttanlands, eitt nú úr Svøríki søgdu beinleiðis, at tað vóru misnøgdir persónar úr sjálvstýrisrørsluni, sum stóðu aftanfyri spreingingina. Politiken skrivaði, at tað kundi eingin ivi vera um, at motivini vóru politisk. Okkara egnu bløð skrivaðu dúgliga um málið, men hóast tað ongantíð var lovaður so nógvur peningur fyrr í Føroyum til menniskjajakt, so varð hin seki ikki funnin. 5.000 krónur tá munnu svara til einar 50.000 krónur í dag.

Tað vóru harðar politiskar rembingar í Føroyum júst hesa tíðina. Tað var framtíðar politiska skipan Føroya, sum stóð ovast á breddanum, og tingið góðtók við 13 atkvøðum niðurskurðin av pundinum úr 22,40 í 19,34, meðan fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin sum mótmæli rýmdu av tingi. Føroyingar áttu tá 3 mill. pund sterling í Onglandi, sum ágóða fyri ferskan fisk, ið varð seldur har øll kríggsárini. — Løgtingsval varð útskrivað 17. september at vera 5. november.

Hjá Thomasi Dam vóru bert tveir rútar heilir.

Jógvan Næssaa, Davis Didriksen og Thomas Dam uttanfyri handilin hjá Tummasi í Niels Finsensgøtu, har fleiri rútar fóru av spreingingini.

Ævintýrarar?

Fólkaflokksmenn og sjálvstýrismenn ferðaðust dúgliga kring landið, og hildu politiskar fundir, sum av mótstøðuni vóru skýrdir øsingarfundir. Hinir 13 sótu eftir á tingi. Alt hetta varð vavt saman í eitt, tá ið bumban var brostin, og veldi til stóra illstøðu.

Nú eini tríati ár seinni síggja menn, at tað kann hava verið talan um ævintýrkendan ungdóm, sum ikki visti, hvussu nógv eini 3—5 kg av dynamitti kunnu gera um seg.

Maður kagar inn ígjøgnum holið í grundini undir Tinghúsinum.

Í 1974 vóru hendan greinin og myndirnar prentaðar í myndablaðnum Eygað. Myndirnar eigur Eli Mortensen, meðan eitt av blaðfólkunum hjá Eygað – kanska Niels Juel Arge – hevur skrivað tekstin. Myndirnar vísa, at flest allir rútarnir í tingsalinum á síðuni á tinghúsinum, sum vendi móti Niels Finsens gøtu, eru knústir. Eisini longur niðri, enntá í Vágsbotni, knústust rútar. Á tí eini myndini sæst, at ein maður hyggur gjøgnum eitt hol í grundini, sum var har bumban sprongdist. Blaðfólkið setur hendingina í samband við krónustríðið og spentu politisku støðuna í Føroyum beint eftir kríggið, men greinskrivarin heldur seg frá at nevna ella gita, hvørji serlig motiv mundu liggja aftanfyri atsóknina. Greinskrivarin upplýsir, sum rætt er, at svensk bløð bóru tíðindi um, at misnøgd føroysk sjálvstýrisfólk stóðu aftanfyri spreingingina, og at sambært Politikken kundi eingin ivi vera um, at motivini vóru politisk. Einki verður nevnt um, at bumbumaðurin hevði havt í hyggju at raka nakran ella nøkur við bumbuni. Greinskrivarin rør sjálvur fram undir, at nú – í 1974 – síggja fólk, at talan kann hava verið um ævintýrkendan ungdóm, sum ikki visti, hvussu stóran skaða 3-5 kilo av dynamitti kundu gera. Í mai 1999 endurgav Eirikur Lindenskov sakliga hesa greinina og myndirnar í Sosialinum. Árið eftir – í 2000 – er ein grein í føroysku bløðunum í september um bumbuatsóknina, har sjálvstýrisfólk fáa ábyrgdina av at hava lagt bumbuna og – sum nakað nýtt – at ætlanin hevði verið at raka formann Javnaðarfloksins, Petur Mohr Dam. Síðani hava líknandi politiskar greinar og politiskt kjak verið í føroysku bløðunum ella á sosialu miðlunum stórt sað á hvørjum árið í sambandi við ársdagin fyri bumbuspreingingini í 1945. Tað er áhugavert, at hesin nýggi og øðrvísi áhugin fyri bumbuatsóknini í september 1945 kann setast í samband við fullveldissamráðingarnar, sum byrjaðu í 2000.

ljósini og stongdu dyrnar, tá ið tey fóru út úr løgtingshúsinum, og síðan fóru ein túr í Havnini, har fleiri fólk eiga at hava sæð tey. „Der blev slukket over det hele, og yderdørene aflaaset“, upplýsti Poul Karbech Mouritsen fyri løgregluni. Bygningurin tykist so statt hava verið lutvíst upplýstur til klokkan 23.55, tá ið ljósini vórðu sløkt og úthurðin læst. Løgreglufrágreiðingarnar upplýstu, at javnaðarfólkini høvdu fundast í løgtinginum, og at tey um midnáttina vóru farin úr løgtingshúsinum. Jona Henriksen upplýsti „at hun saa ikke noget Lys i Lagtingshuset og gik derefter til sin Fader, der bor úti á Reyni“. Jona Henriksen legði sostatt uttan fyri løgtingshúsið um 01.00 tíðina merki til, at myrkt var inni í løgtinginum, og at eingin var inni í løgtinginum.

Tað er sannlíkt, at bumbumaðurin eisini má hava lagt merki til, at einki ljós var inni í løgtingshúsinum aftaná klokkan 23.55 hesa myrku heystnáttina 18. september í 1945. Og at eingin tískil var inni í løgtingshúsinum. Preben Ziska og Palli Ziska, sum á vegnum niðan eftir Áarvegnum, um midnáttina við Hotel Djurhuus, møttu Johan Paula Andrias Henriksen, Petur Mohr Dam og Magnus Tórsheim, sum komu úr løgtinginum og gingu oman eftir Áarvegnum, mugu hava vitað, at javnaðarmenninir ikki vóru í – ella vóru farnir úr – løgtinginum. Heldur ikki tykist tað sannlíkt, at bumbumaðurin skuldi havt roknað við, at nakar var inni í løgtingshúsinum hesa myrku náttina. Tann politiskt virkni – mugu vit ganga út frá – bumbumaðurin visti mest sannlíkt eisini, at løgtingssetan varð liðug 15. september 1945, og at tað politiska arbeiðið í løgtinginum tí varð niðurlagt hesa vanligu ólavsøkutingsetuna. Heldur ikki gjørdu bløðini nakað burturúr, at ætlanin hevði verið annað enn at gera seg inn á løgtingshúsið. Sambandsblaðið *Føroyatíðindi* skrivaði, at „Disse Mænd, der gjorde et mislykked Forsøg paa at sprænge et tomt Hus i Luften, var feje Mænd med Voldsmænds-Mentalitet.“ Og so legði blaðfólkið afturat: „Sikkert har de længe spekuleret i at foretage sig noget Voldsomt, men først da Huset Var tomt og Natten var tilstrækkelig mørk og stille, har de – rystende i Bukserne – lagt Sprængstoffet og tændt Fængtrauden. – En Gadedrenge-Streg i Kæmpeformat og intet andet.“ (*Føringatíðindi* 22.9.1945).

Løgtingshúsið fremst á myndini upplýst eitt myrkt heyst- ella vetrarkvøld eins og 18. september 1945. Beint omanfyri – á myndini til vinstru fyri tinghúsið – við Tinghúsvegin sæst telefonstøðin og uppaftur longur uppi við Tinghúsvegin, uppi við Sverrisgøtu, sæst eitt ljós í einum vindeyga í húsinum hjá Andriasi og Onnu Ziska. Helst er okkurt serligt á vási hetta kvøldið, tinghúsið er serliga væl upplýst við tónleiki uttanfyri, men tað ber illa til at ímynda sær, at bumbumaðurin ikki visti, at eingin var í løgtinginum, um hann var har eftir midnátt 18. september 1945. Ljósið í tí eina vindeyganum í húsinum hjá Andriasi og Onnu Ziska sæst týðiligt, hóast alt ljósið rundanum. Klokkan 00.55 eina myrka heystnátt í 1945, tá ið alt var myrkt, hevur tað borið illa til hjá einum, sum ætlaði at skaða fólk inni í løgtinginum, ikki at leggja merki til, at einki ljós var í nøkrum vindeyga í løgtingshúsinum. Heldur ikki hevur tað verið heilt lætt hjá bumbumanninum ósæddur og við eini bumbu at snýkja seg tætt fram at vestursíðuni (langsíðuni móti Havnará) á løgtingshúsinum at leggja eina bumbu nakað áðrenn midnátt 17. september 1945, tá ljós enn var inni í løgtinginum og gøtuljósið á Vaglinum enn lýsti økið upp. Sambært Tingakrossi gjørdi hetta gøtuljósið "vestaru síðu á tinghúsinum ljósa" (Tingakrossur 19. september 1945). Tað hevur verið lættari eftir midnátt, tá gøtuljósini í Havn (sambært vitnisfrágreiðingunum) vórðu sløkt, fólk flest vóru farin heim og myrkt harumframt var inni í løgtinginum. Serliga um bumban ikki skuldi bresta fyrr enn ein tíma eftir midnátt.

Løgtingshúsið í 1945

Hesar myndirnar av løgtingshúsinum tók Eli Mortensen eftir bumbuspreingingina 18. september 1945. Á hesum forkunnugu myndunum, sum ikki fyrr hava verið almennar í fullari stødd, sæst, at flest allir rútar í norðara enda á vestursíðuni, har løgtingsalurin var, eru brotnaðir – ikki "[a]llir rútarnir á vestaru síðu" (sí *Tingakrossur* 19. september 1945) ella "hvør einasti rútur á facaduni … [vestantil]" (sí *Føroyatíðindi* 22. september 1945), sum bløð vildu vera við. Í sunnara (høgra) enda og uppi á loftinum síggjast bert nakrir einstakir brotnir rútar á vestursíðuni, og stórt sæð eingin skaði var inni í húsinum aðrastaðni enn í løgtingssalinum. Bumban lá við útnyrðingshornið tætt at kjallaragrundini undir løgtingssalinum, har ein maður sæst granska holið í grundini.

Løgtingshúsið varð bygt í 1856, men ikki fyrr enn við útbyggingini í 1906/07 fingu tey tað skap og stødd, sum tey enn hava. Tá varð bygt uppí húsið í báðum endum og ein kvistur varð gjørdur á loftinum vestantil. Tingsalurin varð longdur norðureftir og tvey nýggj høli til sorinskrivaran at brúka vórðu gjørd afturat í sunnara enda. Uppi á loftinum varð nýggi kvisturin móti Niels Finsens gøtu innrættaður til eitt stórt høli, og tvey onnur høli vórðu eisini gjørd og innrættaði í norðara og sunnara enda á loftinum. Sorinskrivarin helt til í sínum hølum í løgtingshúsinum til stovnurin flutti í egin høli í 1948.

Umframt løgtingið og sorinskrivarin høvdu politisku flokkarnir eisini egin flokshøli í løgtinginum til 1978, tá løgtingshúsið varð umbygt innan, og flokkarnir fluttu úr løgtinginum oman á Gamla Apotekið við Áarvegin, har teir fingu nýggj flokshøli. Tað er ikki heilt greitt akkurát nær allir flokkar fingu tey flokshøli, sum vit vita, at teir høvdu fingið tíðliga í heimastýristíðini. Tá helt Sambandsflokkurin til í sunnara enda í neðra í løgtingshúsinum, meðan allir hinir flokkarnir høvdu flokshøli uppi á loftinum. Tjóðveldisflokkurin í norðara enda, "Norðpólurin" kallað, Javnaðarflokkurin í sunnara enda, "Suðurpólurin", og Fólkaflokkurin á kvistinum, meðan teir smærru flokkarnir, Sjálvstýrisflokkurin og Framburðsflokkurin fingu tvey smærri høli millum kvistin og hini bæði loftshølini. Meðan Tjóðveldisflokkurin sjálvandi ikki fekk síni høli fyrr enn í 1950, tá hann fyrstu ferð fekk løgtingsumboðan, so bendir nógv á, at Fólkaflokkurin fekk kvistin, tað størsta hølið, í 1943, tá Sjálvstýrisflokkurin misti alla

sína umboðan í løgtinginum, meðan Javnaðarflokkurin fekk flokshøli í suðurendanum (*Tíðindablaðið* 13. desember 1974, Andreasen 2002). Tað er í øllum førum vist, at Javnaðarflokkurin hevði "Suðurpólin" og Fólkaflokkurin "Kvistin" sum flokshøli áðrenn heimastýrislógin kom í 1948 (Rein 2022). Sambært *Sosialinum* høvdu javnaðarfólkini, sum fundaðust uppi á loftinum í løgtinginum til ein tíma áðrenn bumban brast 18. september 1945, verið "á floksins stovu" (*Sosialurin* 22. september 1945), sum má sipa til "Suðurpólin".

Helst hevur tað eftir at vaskikonan fór klokkan 21.30 til klokkan 23.55 einans verið ljós at sæð í vindeygunum í javnaðrarhølinum í suðurendanum, kanska eisini við inngongdina og trappuuppgongdina á eystursíðuni, neyvan í tí stóra og tóma løgtingssalinum á vestursíðuni og heldur ikki í fólkaflokshølinum á kvistinum á vestursíðuni, men ein tíma áðrenn bumban brast var allur bygningurin við vissu myrkur og tómur.

Tað áhugaverda í hesum sambandi er, at tað einans vildi havt verið vandamikið at verið inni í sjálvum løgtingssalinum, tá bumban brast 18. september 1945, men har var einki virksemi, tí tingsetan varð slitin 15. september. Fólk, sum kundu havt verið inni í sorinskrivara-ella fólkaflokshølinum, har einans nakrir einstakir rútar brotnaðu, høvdu hinvegin ikki havt verið í nøkrum stórvegis vanda fyri at komið til skaða. Fólk, sum kundu havt verið inni í øðrum flokshølum, m.a. í javnaðarhølinum, har eingin skaði hendi orsakað av spreingingini, høvdu hinvegin havt verið uttanfyri allan vanda.

Ein atsókn móti einum parlamentsbygningi hjá einum fólkavaldum parlamenti er í sjálvum sær ein álvarsom atsókn, men spurningurin er, um ætlanin við atsóknini var at gera seg inn á nakran, m.a. at skaða ósek fólk.

Tað er møguligt, men tað vita vit í veruleikanum ikki fyri vist.

Tað seinni framsetta sjónarmiðið, sum hvørki er at finna í samtíðarkeldunum ella í sjálvum revsimálinum, at ætlanin var at raka Petur Mohr Dam, byggir m.a. á ta skeivu upplýsingina, at Petur Mohr Dam „einsamallur hevði sitið og arbeitt í Tinghúsinum tað kvøldið," soleiðis sum ein kjakari orðaði seg í *Dimmalætting* í januar í 2010 (*Dimmalætting* 26.01.2010). Petur Mohr Dam sat ikki einsamallur inni í løgtinginum og arbeiddi hetta kvøldið, so tað kann í sær sjálvum valla vera prógv fyri, at bumban „varð ætlað P. M. Dam". Fýra menn sótu uppi á loftinum í løgtingshúsinum og fundaðust hetta heystkvøldið 17. september, og teir vóru allir farnir úr løgtingshúsinum umleið ein tíma frammanundan, at bumban sprongdist uttanfyri – og ikki sum Johan Ziska upplýsti, einans nakrar heilt fáar minuttir áðrenn bumban sprongdist við løgtingshúsið. Samtíðarkeldurnar siga yvirhøvur frá eini nakað øðrvísi søgu enn tann seinni politiski viðmerkjarin festir á blað í *Dimmalætting*.

Einasta ábendingin í samtíðarkeldunum um, at bumbumaðurin skuldi havt ætlað at raka javnaðarmenninar í løgtinginum, – ikki einans Petur Mohr Dam, men allar fýra – er nevnda upplýsing, sum Johan Ziska longu 18. september 1945 gav løgregluni, men í hesum førinum vita vit (sum víst er á fyrr), at hendan upplýsingin er skeiv. Harafturat kemur, at upplýsingin í somu fráboðan hjá Johan Ziska til løgregluna um, at Poul Karbech Mouritsen skuldi havt sett eitt rykti í umfar, at Ziska brøðurnir skuldu havt staðið aftanfyri bumbuatsóknina (Poul Karbech Mouritsen sýtti annars fyri tí), einans snýr seg um atsóknina móti løgtingshúsinum og einki nevnir um Petur Mohr Dam. Hendan í sjálvum sær sera ivasama upplýsingin um, at Ziska brøðurnir stóðu aftanfyri atsóknina móti løgtingshúsinum, kann sostatt einki siga okkum um, at nakar í samtíðini helt, at bumbumaðurin ætlaði at raka Petur Mohr Dam. Fráboðanin hjá Johan Ziska snúði seg als ikki um hetta.

Rigmor Dam upplýsir, at Petur Mohr Dam plagdi at arbeiða í løgtingshúsinum „út á næturnar", men hann „var farin tíðliga heim" akkurát hendan dagin, „tí dóttirin, Bjarma, hevði føðingardag" (Dam 2019) – *dagin eftir* má tað væl vera. Kanska skuldi hann við skipi til Suðuroyar tíðliga morgunin eftir, men tað vita vit ikki. Spurningurin er harumframt um hann fór serliga tíðliga – klokkan 23.55 – heim

17. september 1945. Talan var um eitt mánakvøld, og ólavsøkutingsetan varð eisini slitin nakrar dagar frammanundan (leygardagin 15. september 1945). Hesin spurningur er ikki so lættur at svara. Í síni løgreglufrágreiðing í 1945 nevnir Petur Mohr Dam einki um, at hann fór tíðliga heim hetta kvøldið. Heldur ikki fór hann heim í song alt fyri eitt. Og morgunin eftir fór hann heldur ikki til Suðuroyar, men sambært frágreiðing síni við skipi vestur í Vágarnar.

Sambært ferðaætlan hjá *A.S. Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik*, galdandi frá 31. mars 1945 „indtil videre", – næsta ferðaætlan varð lýst at galda frá 8. oktober 1945 – fór *Streymur* av Havnini týsdagar klokkan 07.00 til Miðvágs og Vestmanna, og hann sigldi so sama dag aftur til Havnar (*Dagblaðið* 27.03.1945 og *Dagblaðið* 5.10.1945). Petur Mohr Dam er sambært hesum farin tíðliga vestur í Vágarnar, men tá einki ferðasamband var frá Vágunum til Suðuroyar – *Smiril* sigldi úr Havn og umvegis Sandoynna til Suðuroyar – so má hann hava havt onkran annan sjóvegis fart úr Miðvági til Suðuroyar, um hann skuldi í føðingardag har. Tað er møguligt, at hann skuldi í føðingardag hjá dóttrini, men hann nevnir einki um tað í frágreiðingini. Petur Mohr Dam hevði eisini eina systir í Sandavági, so hann kann vera farin at vitja hana hendan morgunin.

Ein annar viðmerkjari – Virgar Dalsgaard – sigur frá eini aðrari frásøgn, sum hann sigur seg hava frá sjálvum Peturi Mohr Dam. Hann vil vera við, at Petur Mohr Dam, sum hevði sitið í løgtinginum og arbeitt, varð blivin so troyttur um midnáttarleitið, at hann fekk sær ein stuttan steðg frá arbeiðinum í løgtinginum og fór niðan í Nýggju Snikkarastovu, beint yvir av løgtinginum, fyri at fáa sær ein kaffimunn og eitt prát við partafólk. Tá hann ein hálvan tíma seinni hevði sett seg niður har, sprongdist bumban, og hvør einasti kaffikoppur bleiv sorlaður av borðinum (Dalsgaard 2013). Eitt er, at tað tykist ósannlíkt, at Petur Mohr Dam fór at vitja fólk fyri at tosa um politikk so seint hetta mánakvøldið, men hetta samsvarar heldur ikki væl við frásøgnina hjá abbadóttrini Rigmor Dam um, at Petur Mohr Dam fór tíðliga heim hetta kvøldið. Tað er ikki vist, at frásøgnin hjá Rigmor Dam er heilt trygg, men í hesum førinum samsvarar hon betri við samtíðarkeldur, sum eru endurgivnar fyrr í bókini. Meira avgerandi er, at tá Petur Mohr Dam og hinir ein tíma áðrenn spreingingina fóru úr løgtinginum, gekk hann saman við tveimum partamonnum runt í Havnini. Tann fjórði, Poul Karbech Mouritsen, fór einsamallur heim (í Snikkarastovu), har hann búði, meðan hinir tríggir fóru oman í býin. Fyrst fóru teir oman í Vágsbotn, haðani tveir av teimum – Petur Mohr Dam og Magnus Tórsheim – gingu víðari eftir Skansavegnum til prentsmiðjuna hjá Arnold Øster í Jónas Broncks gøtu eftir bløðum. Haðani fóru teir oman á bryggjuna, har Petur Mohr Dam fór umborð á eitt skip við bløðunum, sum skuldu til Íslands. Síðani fóru teir heim. Hetta er tað, sum m.a. Poul Karbech Mouritsen og Magnus Tórsheim upplýstu fyri løgregluni í september 1945, men tað, sum Virgar Dalsgaard sigur frá samsvarar heldur ikki við tað, sum Petur Mohr Dam sjálvur upplýsti fyri løgregluni longu í september 1945. Petur Mohr Dam var eisini sambært síni egnu samtíðarfrágreiðing fyri løgregluni farin heim til svágin í Dr. Jakobsens gøtu, har hann búði, tá ið hann var í Havn, og hann var á veg í song, tá ið hann hoyrdi eina spreinging, sum svágurin helt mundi stava frá eini minu. Sambært løgreglufrágreiðingini var tað ikki fyrr enn morgunin eftir, at Petur Mohr Dam fekk at vita, at talan var um eina bumbu, ið var sprongd við løgtingshúsið. Tá var hann staddur í Vágsbotni á veg vestur í Vágar. Heldur ikki tá trúði hann hesum, men helt, at fólk skemtaðu, „noget Folk sagde i Spøg", men tað var rætt.

Um bumbumaðurin ætlaði at raka Petur Mohr Dam, so hevði hann sjálvur ongan illgruna um tað í september 1945.

Heldur ikki vita vit, um bumbumaðurin sprongdi bumbuna klokkan 00.55 út á náttina fyri at tryggja sær, at eingin var inni í løgtinginum ella økinum rundanum, tá ið bumban brast, ella um orsøkin til, at eingin var við løgtinghúsið, tá ið bumban brast, var, at tá bar til hjá honum ósæddur at leggja og spreingja bumbuna. Tað tykist í øllum førum sannlíkt, at kom onkur framvið løgtingshúsinum á vestur-



Genpart.

FÆRØERNES POLITIKREDS
Thorshavn Politi

RAPPORT.

Ved personligt Møde paa Politikontoret forklarer Lagtingsmand Peter M. Dam følgende vedrørende Bombeattentatet:

Jeg havde om Aftenen d. 17. været til Møde i Lagtinget sammen med Magnus Tórsheim, Lagtingsmand Henriksen samt Poul Karbæk Mouritsen. Vi gik fra Mødet Kl. ca. 12. Magnus Tórsheim, Lagtingsmand Henriksen og jeg gik ud ad Skansevejen til Arnold Østers Trykkeri for at hente en Pakke socialdemokratiske Aviser, som jeg derefter bragte om Bord paa et Skib, der laa ved Kajen og som skulde til Island. Straks derefter gik vi tilbage. Ved Kongebroen ved C.C.Johansens Forretning tog Lagtingsmand Henriksen Afsked, og Magnus Tórsheim og jeg gik op til det glade Hjørne og derfra ud til min Bopæl, hvor Magnus Tórsheim forlod mig. Jeg var endnu ikke kommet i Seng, da jeg hørte Eksplosionen, og min Svoger bemærkede straks, at det maatte være en Mine, der eksploderede.

Morgenen derefter rejste jeg med Skib til Vaagø. Da jeg kom ned om Morgenen til Vágsbotn, erfarede jeg, at Lagtinget var sprængt, men jeg troede i første Omgang, at det var noget Folk sagde i Spøg, men jeg blev hurtigt klar over, at det var en Realitet.

Adspurgt om, hvad der ligger til Grund for de til Rapport fremsatte Oplysninger om, at Komparenten skal være blevet skygget af en af Ziskasønnerne paa Strækningen Lagtinget, Kajen og tilbage igen til hans Bopæl, udtaler Komparenten følgende: Nogen Tid efter Dommen over Andreas Ziska blev jeg en Aften, da jeg forlod Lagtinget, fulgt i en vis Afstand af en af Ziskasønnerne. Da jeg mærkede, at den paagældende standsede, saasnart jeg standsede, blev jeg mistænksom og bestemte mig til at bede Lærer Hjalmar Joensen og Frue, som jeg mødte paa Kajen, om at ledsage mig. Efter at jeg havde været et Ærinde i Havnekontoret og gik hjemad sammen med nævnte Lærer

Í frágreiðingini hjá Peturi Mohr Dam fyri løgregluni frá september 1945 sæst einki til, at hann hevði nakran illgruna um, at bumbuatsóknin varð ætlað honum. Petur Mohr Dam var á veg í song hjá svágrinum í Dr. Jakobsens gøtu, tá spreingingin, ið svágurin helt stava frá eini minu, sprongdist við løgtingið. Ikki fyrr enn dagin eftir fekk hann at vita, at ein bumba varð brostin við løgtingið. Heldur ikki sæst nakað til, at hann ætlaði sær aftur í løgtingið at arbeiða eftir at allir teir fýra javnaðarmennirnir vóru farnir úr løgtinginum 17. september klokkan 23.55. Tvørturímóti, so var ætlanin neyvan nakrantíð nøkur onnur enn at fara eini ørindi í Jónas Broncks gøtu eftir nøkrum bløðum og so heim í song. Omanfyri sæst ein partur av samtíðar frágreiðingini hjá Peturi Mohr Dam.

síðuni, tá ið bumban brast, so høvdu tey neyvan komið óskalað frá atsóknini. Tað tykist hinvegin lítið sannlíkt, at bumbumaðurin beinleiðis hevur viljað rakt nakran ávísan, tá ið hann legði og sprongdi bumbuna so mikið seint um náttina, uttan mun til orsøkina til, at hann sprongdi bumbuna so mikið seint, at eingin var uttanfyri ella inni í løgtingshúsinum.

Søgan um ein av Ziska brøðrunum, sum skuldi havt fylgt aftaná Peturi Mohr Dam, varð ikki eftirkannað fyrr enn aftaná, at C.A. Vagn-Hansen 26. september 1945 hevði heitt á Kristian Djurhuus um at avhoyra Petur Mohr Dam. Í sjálvum sær sigur henda søga heldur einki um, at ein Ziska bróður stóð aftanfyri bumbuna við løgtingshúsið. Poul Karbech Mouritsen, sum skuldi havt verið upphavsmaður til søguna, avsannaði móti løgregluni aðrar frásagnir um Ziska brøðurnar, sum hann sambært øðrum skuldi havt verið upphavsmaður til, m.a. frásøgnina um, at Ziska brøðurnir stóðu aftanfyri bumbuatsóknina ímóti løgtingshúsinum. Petur Mohr Dam váttaði hinvegin í síni frágreiðing fyri løgregluni, sum varð gjørd seint í september, at stutt aftaná dómin hjá Andriasi Ziska 12. september í 1945, sum hann fekk fyri m.a. at hava rópt „quislingar“ í tinginum, hevði ein av Ziska brøðrunum fylgt aftaná honum. Hann upplýsti kortini einki um, hvønn Ziska bróður talan var um. Petur Mohr Dam tykist heldur ikki sjálvur seta hesa hending í samband við bumbuatsóknina ímóti løgtingshúsinum – heldur er samanhangurin dómurin hjá Andriasi Ziska. Hetta kann sjálvandi eisini vera ein upplýsing, sum Petur Mohr Dam brúkti til at tíðarfesta hendingina við (ein kronologiskur markørur), men talan er týðiliga eisini um ein samanhang millum tvey mál – dómin hjá Andriasi Ziska og ein Ziska bróður, sum gekk aftaná honum í Havnini. Hví tann ónevndi Ziska bróðurin gekk aftaná akkurát Peturi Mohr Dam verður ikki upplýst, men hendan søgan kann hava skapt illgrunan um, at onkur av Ziska brøðrunum var úti eftir Peturi Mohr Dam, og illgruna um, at onkur av teimum møguliga eisini stóðu aftan fyri bumbuatsóknina við løgtingshúsið. Tað seinasta er valla rætt, í øllum førum ikki, um

vit taka ta seinnu frásøgnina hjá Peturi Mohr Dam í álvara, tí hon útihýsir hesum. Einki í løgreglufrágreiðingini hjá Peturi Mohr Dam bendir heldur á, at hann hevði nakran illgruna um, at nakar hevði lagt bumbuna við løgtingið fyri at raka hann persónliga.

Tann seinni varðveitta frásøgnin um „tann angrandi bumbumannin“ og Petur Mohr Dam bendir hinvegin á, at Petur Mohr Dam var málið hjá bumbumanninum. Men hesin bumbumaðurin kundi í so fall tað sama rakt onkran annan ella onkur onnur enn Petur Mohr Dam, sum kundu havt verið inni í løgtingshúsinum klokkan 00.55. Petur Mohr Dam var sum nevnt í løgtinginum saman við trimum øðrum monnum. Teir fýra javnaðarmenninir vóru hinvegin einans í løgtinginum til klokkan 23.55, og teir sótu uppi á loftinum, í flokshølum javnaðarfloksins í sunnara enda, har heldur eingin skaði hendi ein tíma seinni, tá bumban brast við kjallaragrundina í hinum endanum á bygninginum. Tað talar ikki fyri, at bumban varð ætlað Peturi Mohr Dam. Ímóti søguni um, at bumban „varð ætlað“ Peturi Mohr Dam, talar eisini, 1) at tann vanliga løgtingsetan varð slitin 15. september 1945, og einki alment politiskt virksemi var tí longur í løgtinginum, og 2) at bumbumaðurin aftaná midnátt 18. september neyvan kann hava verið óvitandi um, at eingin longur var inni í bølamyrka løgtingshúsinum. Um bumbumaðurin við bumbuni við løgtingshúsið ætlaði at raka Petur Mohr Dam, so kunnu vit eisini ganga út frá, at hann hetta myrka heystkvøldið hevur hildið eyga við, hvør ella hvørji fólk fóru inn í løgtingið. Spurningurin er eisini, hví nakar skuldi havt roknað við, at nakar fór inn í løgtingið, tá løgtingssetan varð slitin. Tað er sjálvandi trupult, eftir at frásøgnin hevur verið borðin á mannamunni í so nógv ár (t.e. síðan 1945-1968), at vita nágreiniliga, hvussu bumbumaðurin man hava orðað seg mótvegis Peturi Mohr Dam, men ein møguleiki kundi verið, at bumbumaðurin við hesi orðingini, at bumban „varð ætlað“ Peturi Mohr Dam, sum tann varðveita frásøgnin hevur, hugsaði meira um at raka formann Javnaðarfloksins politiskt og møguliga ikki beinleiðis um at skaða hann likamliga. Ímóti hesi tulking talar, at tað tykist

ósannlíkt, at bumbumaðurin seinni vendi sær til *Petur Mohr Dam* fyri at fáa eina umbering, um hann ikki tá metti, at hann serliga hevði ætlað *honum* bumbuna í 1945. Tað var megingrundin til, at hann vendi sær til Petur Mohr Dam. Tað er eisini lítið at ivast í, at tann varðveitta frásøgnin tulkar ætlanina hjá bumbumanninum uppá tann seinna mátan, t.e. at bumban „varð ætlað“ Peturi Mohr Dam. Henda seinni íkomna tulkingin fæst bara ikki so lættliga at samsvara við tað, sum varðveittar samtíðarkeldur og samanhangurin tykist krevja, t.e. 1) at Petur Mohr Dam ikki var einsamallur inni í løgtinginum hetta kvøldið í 1945, hann var saman við trimum øðrum monnum, sum hann kom og fór saman við, 2) at allir fýra fóru samstundis úr tinghúsinum, umleið ein tíma áðrenn bumban sprongdist, og 3) at bumbumaðurin, um hann var við løgtingshúsið í myrkrinum og setti eld á fjúsið/tendraði bumbuna, stutt áðrenn hon brast, má hava vitað, at neyvan var nakar inni í løgtinginum, tá ið hann festið í fjúsið/tendraði bumbuna. Í øllum førum tykist tað rættast at brúka eina orðing sum „bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í 1945“ um bumbuatsóknina, sum eisini er heitið á revsimálinum, sum ongantíð varð reist í rættarskipanini.

Hendan søgan hjá Peturi Mohr Dam tykist hinvegin útihýsa, at Preben Ziska ella Palli Ziska, sum báðir eiga at hava vitað, at Petur Mohr Dam *ikki* var í løgtinginum um midnáttarleitið, ella nakar annar av Ziska brøðrunum, ætlaðu at gera seg inn á nakran. Sambært høvuðsvitnisburðinum í hesi frásøgn, at bumbumaðurin var deyður í november 1968, tykjast teir allir útihýstir. Ein møguleiki at fáa ta seinni varðveittu søguna hjá Peturi Mohr Dam um, at ætlanin hjá bumbumanninum var at raka hann persónliga, – men ikki einans hann – at vera gjørliga, kundi hinvegin verið at gingið út frá, at fjúsið var so langt, at bumbumaðurin kundi havt sett eld á minst ein tíma áðrenn bumban brast, t.e. meðan teir fýra javnaðarmenninir enn vóru inni í løgtinginum. Í so fall er punkt trý (at eingin var inni í løgtinginum klokkan 00.55, tá bumban brast) ikki ein forðing, meðan punkt tvey (at fýra menn vóru inni í løgtinginum, tá bumbumaðurin

áðrenn klokkan 23.55 setti eld á fjúsið) kann tulkast breiðari enn, at bumbumaðurin *einans* var úti eftir at raka Petur Mohr Dam. Men tað hevði kravt eitt fjús, sum sambært upplýsingunum hjá Hans Ejrnæs var minst 40 metrar til longdar, og sum í heilum líki varð tveitt oman í Havnará og haðani rak oman á sjógv. Løgreglufólkini leitaðu í Havnará, men tey funnu einki.

Síggja vit burtur frá størstu avbjóðingini við søguni um, at bumbumaðurin ætlaði at raka Petur Mohr Dam, – at tinghúsið hevði verið manntómt og bølamyrkt í ein tíma, tá ið bumban brast – so er ein annar ósvaraður spurningurin, hví bumbumaðurin eftir øllum at døma seinni *bert* vendi sær til Petur Mohr Dam. Tá teir fýra javnaðarmennirnir komu í løgtingið til tann sama fundin, og eisini fóru samstundis av fundinum, so mugu vit ganga út frá, at bumbumaðurin, um hann ætlaði at raka Petur Mohr Dam, eisini má hava vitað, at aðrir enn Petur Mohr Dam vóru inni í løgtinginum frá klokkan umleið 20.30 til 23.55. Tá hann sambært frásøgnini hjá Peturi Mohr Dam seinni, á deyðastrá, setti seg í samband við Petur Mohr Dam, má hann harumframt hava fingið upplýsingar um hetta aðrastaðni frá. Men hvørki samanhangurin í tí varðveittu frásøgnini hjá Peturi Mohr Dam (t.e. at bumban var ætlað Peturi Mohr Dam, sum heldur ikki skuldi avdúka bumbumannin fyri nøkrum øðrum) ella nakrar aðrar kendar keldur, benda á, at hann eisini vendi sær til Johan Paula Andrias Henriksen, Poul Karbech Mouritsen og/ella Magnus Tórsheim. Heldur ikki geva tær nógv meira avgerandi samtíðarkeldurnar nakra ábending um, hví bumbumaðurin skuldi havt vent sær til *nakran* av teimum fýra.

Tað ber valla til at svara hesum spurninginum, men møguligt er at seta fram nakrar hugsandi frágreiðingar.

Kanska gav støðan hjá Peturi Mohr Dam sum floksformaður honum eina serliga støðu hjá bumbumanninum, men onkur av hinum var eisini í eini serligari støðu. Johan Pauli Andrias Henriksen var bæði løgtingsmaður og borgarstjóri í Havn í 1945. Hetta gevur okkum tí onga frágreiðing uppá, hví tað *bert* var Petur Mohr Dam, sum skuldi fyrigeva manninum. Ein annar møguleiki er, at tað var sjálvan *løgmann*, sum bumbumaðurin – í so fall aftaná 1958 – vildi fáa eina fyrigeving frá. Tað er ikki ósannlíkt, og onkur útgáva av søguni sigur eisini, at tann deyðasjúki bumbumaðurin setti seg í samband við Petur Mohr Dam nógv ár seinni, eftir at hann var blivin Føroya løgmaður. Í so fall hava viðurskifti frá eini nógv seinni tíð, aftaná 1958, tá ið Petur Mohr Dam var vorðin løgmaður, ávirkað tað helst enn seinni *frágreiðingina* hjá frásøgumanninum fyri Petur Mohr Dam um tað, sum hann í *veruleikanum* hevði hildið og gjørt í september 1945. Hetta kann møguliga greiða frá, at bumbumaðurin ikki vendi sær til Johan Paula Andrias Henriksen, sum bæði var løgtingsmaður í 1939-1948 og í 1950-1954 og borgarstjóri í Havn í 1944-1948 og í 1952-1957, men „einans" býráðslimur í 1957-1968. Aftaná 1958 var tað *bert* Petur Mohr Dam, sum av teimum fýra javnaðarmonnunum hevði eina heilt serliga støðu í føroyska samfelagnum, meðan Johan Pauli Andrias Henriksen í 1945, tá ið hann var løgtingsmaður og borgarstjóri, hevði eina líknandi støðu í føroyska samfelagnum, ikki minst í Havn, sum Petur Mohr Dam. Um bumbumaðurin, sum lá til at doyggja, vendi sær til Petur Mohr Dam aftaná, at hann gjørdist løgmaður (t.e. aftaná 1958), so kann tað, at Petur Mohr Dam tá varð vorðin nógv tann navnframasti av teimum fýra, kanska vera við til at greiða frá, at bumbumaðurin einans vendi sær til Petur Mohr Dam, t.e. løgmann. Tað er kanska ikki heilt sannlíkt, men tað kann neyvan útihýsast, at bumbumaðurin, nógv ár seinni, tilvitað ella ótilvitað, hevur „dagført" sína frásøgn nakað til heiðurs fyri løgmann, sum í 1945, langt áðrenn hann gjørdist løgmaður, hevði verið inni í løgtinginum ein tíma áðrenn bumban brast, meðan hinir tríggir javnaðarmenninir, sum eisini vóru í løgtinginum, tá vóru farnir eitt sindur í bakgrundina.

Ongar leivdir av einum longum fjúsi vórðu funnar á grasvøllinum, har bumban brast, so gangast má út frá, at myrkt var í løgtingshúsinum, tá ið bumbumaðurin setti eld á fjúsið/sprongdi bumbuna, men

seinni – helst nógv ár seinni – hevur hann upplýst fyri Peturi Mohr Dam, at bumban varð ætlað honum.

Men kanska er tað ein lítil møguleiki fyri at bjarga tí seinni frásøgnini hjá Bergi P. Dam um, at bumban veruliga varð ætlað Peturi Mohr Dam, hóast samtíðarkeldurnar heilt greitt staðfesta, at eingin hevði verið inni í løgtinginum í ein tíma, tá bumban brast. Tað er kanska ikki heilt óhugsandi, at bumbumaðurin brúkti ein "sprængblyant", sum seinkaði sjálva spreingingina við í minsta lagi einum tíma. Tað kundi verið frágreiðingin uppá, at ljós - og harvið eisini fólk - var inni í løgtinginum, tá bumbumaðurin skipaði fyri og útloysti spreingingina nakað fyri midnátt, meðan tað var myrkt og eingin sostatt var inni í løgtinginum, tá sjálv spreingingin hendi knappan tíma eftir midnátt. Og at ongar leivdir av brendum fjúsi vórðu funnar. Ein spreingiblýantur við hálvum tíma seinking varð brúktur 20. juli í 1944, tá nakrir týskir herovastar, m.a. Claus von Stauffenberg, framdu eina miseydnaða morðroynd móti Adolfi Hitler. Bumban, ein spreingiblýantur í einum kilo av dynamitti, sprongdist sum ætlað undir einum borði tætt við har, sum Adolf Hitler stóð, men Adolf Hitler kom frá hesi morðroyndini við smærri snuddum. Tað eru hinvegin fleiri ivamál við eini líknandi spreingiblýant hypotesu í sambandi við bumbuatsóknina við løgtingið í 1945. Tað sær sambært lýsingum í føroysku bløðunum ikki út til, at spreingiblýantar yvirhøvur vórðu seldir í Føroyum í 1945. Tað tykist eisini rættiliga ósannlíkt, tí spreingiblýantar vórðu ikki mentir, framleiddir og brúktir fyrr enn undir seinna heimsbardaga, og tá vórðu teir brúktir í sjálvari krígsførsluni av heilt serligum herdeildum og mótstøðurørslum undir krígnum. Spreingiblýantar vórðu neyvan brúktir til vanligt spreingiarbeiði og valla heldur til nøkur krígsendamál í Føroyum. Í áðurnevnda yvirliti yvir alla sølu av spreingievni, perlum, fjúsi og øðrum tilfari í sambandi við spreinging í viðkomandi tíðarskeiði, sum øll varð skrásett og sum løgreglan tí fekk eitt fullfíggjað yvirlit yvir í sambandi við kanningararbeiðið í 1945, er heldur eingin spreingiblýantur skrásettur. Í yvirlitinum verða einans heitini "Perlur" ella "el. Perlur" brúkt, harav tey flestu heitini bert eru "Perlur". Tað hava tí neyvan verið – nógvir um nakrir – spreingiblýantar í Føroyum, har heldur eingir bardagar vóru millum teir stríðandi partarnar í krígnum. Hesi viðurskifti vóru óivað eisini ein orsøk til, at Hans Ejrnæs ikki hevði nakran serligan kunnleika til teir – "Efter hvad jeg erfarer" – og harumframt var rættiliga ivasamur og brúkti orðingina, "at det formentlig ikke er helt udelukket" um sannlíkindini fyri, at bumbumaðurin kundi havt brúkt spreingiblýantar. Harafturat kemur, at skuldi okkara bumbumaður onkursvegna kortini havt fingið hendur á og brúkt spreingiblýantar, so hevði tað framvegis ikki givið okkum eina nøktandi frágreiðing uppá, at bumban varð ætlað Peturi Mohr Dam, sum til ein tíma áðrenn bumban sprongdist uttanfyri løgtingið hevði verið uppi á loftinum í løgtinginum og fundast saman við trimum øðrum kendum javnaðarmonnum. Teir høvdu allir - um teir framvegis vóru har klokkan 00.55 - verið í neyvt sama vanda fyri at verið raktir av spreingingini. Heldur ikki tykist tað heilt sannlíkt, at ein tílík bumba á grasvøllinum uttanfyri løgtingið kundi havt verið ætlað at gera av við fólk, sum sótu uppi á loftinum í løgtinginum, eins og tað tykist ivasamt, at bumbumaðurin kundi havt hildið, at fólk enn fóru at vera inni í løgtinginum og arbeiða klokkan 01 mánanáttina 18. september 1945, enntá eftir at tingsetan varð slitin. Ein bumba við útnyrðingshornið við tingsalin, sum var myrkur og tómur kundi illa skaða fólk, sum sótu í sunnaraða enda uppi á loftinum. At enda kann nevnast, at tað eisini tykist ósannlíkt, at bumbumaðurin legði eina bumbu tætt við løgtingið nakað fyri midnátt, tá vit kunnu ganga út frá, at hann eins og onnur fólk í Havn visti, at gøtuljósini - eisini gøtuljósið á Vaglinum - lýstu og settu hann í stóran vanda fyri at vera avdúkaðan til á midnátt, tá gøtuljósini í Havn vórðu sløkt. Løgreglufrágreiðingar vísa, at hetta var vanlig vitan millum tey avhoyrdu. Tað tykist tí meira sannlíkt, at bumbumaðurin, um hann eisini visti hetta, bíðaði við at fara framat vestursíðuni á løgtinginum til nakað eftir midnátt, tá gøtuljósini vórðu sløkt, men tá var eisini vorðið myrkt og manntómt inni í løgtinginum. Hetta er eisini enn ein grundgeving, sum talar ímóti áðurnevnda ivasama ástøði um, at bumbumaðurin, um hann ætlaði at raka Petur Mohr Dam,

brúkti so langt fjús (minst 40 metrar), at tað tók í minsta lagi ein tíma at brenna og festa í krútið. Í hvørgum førum hevði hann – um hann visti, at gøtuljósini sløknaðu á midnátt – nakra subjektiva grund til at seta seg í so stóran og óneyðugan vanda fyri at vera avdúkaðan, um bumban kortini ikki skuldi bresta fyrr enn ein tíma seinni, tá tað var vorðið myrkt í øllum økinum rundanum løgtingið og í øllum býnum.

Tað er vert at umhugsa ta hypotesu, at tað hjá bumbumanninum er farin fram ein minnisbroyting frá 1945, tá ið bumbumálið hjá fútanum varð skilmarkað sum „Bombeattentatet mod Tinghuset“, og til 1959-1968, tá ið bumbumálið í tí varðveittu frásøgnini hjá bumbumanninum tykist verða blivið til eina atsókn móti løgmanni. Tað er eitt kent fyribrigdi, at fólk „dagføra“ eldri minni um hendingar við støði í upplivingum seinni í lívinum.

Eg sigi ikki, at tað er hent í hesum førinum, men tað er ein hypotesa, sum kann greiða frá muninum millum tær eldru samtíðarkeldurnar í 1945 og seinnu frásøgnina hjá bumbumanninum frá – kanska – 1960-unum. Her mugu vit í øllum førum sum søgufrøðingar finna frágreiðingar, sum samsvara við samtíðarkeldurnar. Størsta avbjóðingin við hesi hypotesuni er, hví bumbumaðurin yvirhøvur setti seg í samband við nakran av teimum fýra, tá eingin av teimum var inni í løgtinginum – teir vóru allir fýra heima við hús, á veg í song – tá bumban brast. Kanska hevði bumbumaðurin ongantíð ætlað sær nakað annað við bumbuna enn at vísa sína stóru misnøgd við løgtingið, *stovnin*, eina misnøgd, sum vit bara kunnu gita um, meðan hann seinni gjørdist varugur við, at hann kundi havt verið so óheppin, at verandi løgmaður var í løgtinginum, tá bumban brast. Men tað er helst lættast at greiða frá hesi hypotesuni, um motivið hjá bumbumanninum var at mótmæla tí, sum løgtings*meirilutin* hevði samtykt, og at tað tí var ein av hesum floksleiðarunum, ið hann seinni vendi sær til.

Tað tykist í øllum førum vera eitt ósamsvar millum samtíðarkeldurnar, sum einans nevna og leggja upp til eina atsókn móti løgtingshúsinum, og reseptiónssøguna – t.e. hvussu hendan søgan seinni er borin fram og síðani móttikin av seinni ættarliðum og lesarum sum ein atsókn móti javnaðarformanninum Peturi Mohr Dam.

BUMBUSPREINGINGIN Í POLITISKU SØGU FØROYA

Í politiskum kjaki hevur verið sagt, at bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum nærum hevur verið tagd burtur í føroyskari søgu (sí m.a. Dimmalætting 26.01.2010 og Dalsgaard 2017). Undirliggjandi illgrunin tykist vera, at sterkar politiskar kreftir í Føroyum vilja hava, at atsóknin móti løgtingshúsinum verður gloymd. Tað er møguligt, at lítið hevur verið granskað í hendingini, men tað er valla heilt rætt, at hon er tagd burtur av politiskum grundum eina. Í fyrsta lagi er hendan søgan ikki tagd burtur – bløðini skrivaðu um hendingina í samtíðini, hendingin hevur verið viðgjørd í eini blaðgrein við fleiri myndum í myndablaðnum *Eygað* í 1974, (*Eygað*, Nr. 3, 1974) hon hevur verið nevnd í eini sjónvarpssending í 1996 (*Fólkaatkvøðan, ið hvarv* hjá Høgna Hoydal um Fólkaatkvøðuna í 1946), atsóknin er lýst í bókini hjá Heina Madsen (Madsen 1999, 214), og so er hon umrødd í eini ritgerð frá 2016 (Sølvará 2016, 142 – sí eisini 2021, 18). Eisini hevur Tjóðskjalasavnið gjørt nakað burturúr bumbuatsóknini í sambandi við framsýningar av varðveittum skjølum, og á Vísindavøkuni, sum Granskingarráðið skipaði fyri í 2015, hava

myndir av blaðgreinum verið vístar fram í so stórari stødd, at tey vitjandi kundu lesa um hesa skelkandi hendingina í teimum gomlu bløðunum. Í skaldsøguni *Bommhjarta* hjá Jóannesi Nielsen (1953) er hendan atsóknin móti løgtingshúsinum eisini umrødd í skaldskaparligum høpi (Nielsen 2016, 102, 265-274).

Eisini hava ymisk fólk í politiskum høpi gjørt nakað burturúr hesi atsókn í (sosialu) miðlunum á hvørjum ári á ársdegnum fyri bumbuatsóknini 18. september í 1945. Tað er hinvegin rætt, at tað ikki er so nógv skrivað og granskað av søgufrøðingum um hesa atsóknina, men høvuðsorsøkirnar mugu óivað vera aðrar enn virkin politisk burturskotran. Tað kann hugsast, at m.a. loysingarrørslan neyvan hevur nakað stórt ynski um at varpa ljós á atsóknina móti løgtingshúsinum, men tað er eingin sannførandi grund til at halda, at føroyska sjálvstýris- og/ella loysingarrørslan skal hava havt so stóra ávirkan á varðveitta føroyska søguskriving, at tað eisini skuldi havt eydnast hesi politisku rørsluni at fáa bæði sambands- og javnaðarrørslurnar til at gloyma bumbuspreingingina við løgtingshúsið í september 1945. Atsóknin er heldur ikki umrødd í m.a. drúgvum søguligum verki um søguna hjá Sambandsflokkinum (Andreasen 2006). Heldur ikki í verkum um politisku søgu Føroya hjá sambandsmanninum Eiden Müller (1921-1989) frá 1981 og 1983 (Müller 1981 og 1983).

Eiden Müller var sjálvur millum tey avhoyrdu í Havn í september 1945, so vantandi vitan var valla ein orsøk til, at hann ikki nevndi atsóknina móti løgtingshúsinum, tá ið hann umrøddi tíðarskeiðið frá krígsenda og til fólkaatkvøðuna. Orsøkin er neyvan heldur, at hann var serliga mjúkur við loysingarrørsluna, tí hann er rættiliga bersøgin móti tí sambært honum sera ósakliga atburðinum hjá Fólkaflokkinum undir og beint eftir kríggið (sí m.a. Müller 1981, 112-113). Eiden Müller arbeiddi eisini sum blaðmaður á *Dimmalætting* í september 1945, og hann varð av føroyskum loysingarfólkum undir illgruna fyri í september 1945 at hava sent eitt fjarrit til *Politiken* við upplýsingum um, at ónøgd sjálvstýrisfólk stóðu aftan fyri spreingingina við løgtingshúsið. Hann kann valla hava gloymt hesa hendingina, og hans-



Á Vísindavøkuni í 2015 var hendan plakatin við tilfari úr føroysku bløðunum millum søguliga tilfarið, sum vitjandi kundu stytta sær stundir við at lesa. Í dag er tilfarið teldutøkt á tidarrit.fo, men tað var tað ikki tá

ara stílur gevur okkum onga grund til at halda, at hann ikki hevði nevnt bumbuspreingingina í sínum bókum, um hann metti, at føroysk loysingarfólk – fólkafloksfólk – stóðu aftanfyri. Tvørturímóti. Kanska metti hann, tá ið samanum kom, at bumbuatsóknin ikki hevði so nógv uppá seg ella eisini helt hann kanska ikki longur, at tað var skilagott at skriva um eina atsókn, sum ongantíð varð uppklárað. Tað er møguligt. Um bumbuatsóknin í september 1945 hevur verið lutfalsliga lítið umrødd ella viðgjørd í politisku søgu Føroya, so eru høvuðsorsakirnar til tað helst at finna onkra aðrastaðni enn í tí, at sjálvstýris- og loysingarkreftir í Føroyum hava roynt at dylja hesa bumbuatsóknina fyri føroyingum. Duld hevur hon heldur ikki verið hesi seinastu árini, har hon javnan er umrødd í politiskum høpi.

Eitt triðja sjónarhorn

Í september 2017 var hendan árliga politiska viðmerkingin hjá Virgari Dalsgaard um bumbuatsóknina móti løgtinginum 18. september 1945 at finna á teimum sosialu miðlunum í Føroyum:

„Í dag er 72 ára dagur fyri eina av teimum ússaligastu níðingsgerðunum í nýggjari føroyskari søgu. Henda dagin sprongdu yvirgangsmenn eina sterka dynamittbumbu undir okkara Løgtingi, og tað var als eingin ivi um, at tað var ein planløgd attentat-roynd móti javnaðarformanninum, Petur Mohr Dam, sum hevði sitið í tinginum beint frammanundan og arbeitt, men heilt av tilvild var farin eitt lítið ørindi í eini grannahús, tá bumban brast. – Eftirsum ein rættiliga fanatiskur bólkur av loysingum treiskliga royna at hátíðarhalda eina miseydnaða fólkaatkvøðu tann 14. september, er avgjørt vert nógv sterkari at gera vart við okkara herostratiska terrordag í 1945. – Tað unga ættarliðið av føroyingum er illa statt, tí eingin „søgubók" nevnir henda terror-tilburðin við einum einasta orði, so hvis føroyskur ungdómur ikki verður orienteraður av søguliga skilagóðari familju, fáa tey einki at vita um hesa feiku terroratsóknina hjá fanatiskum loysingarfólki. – Ætlanin er, at hetta málið skal fortreingjast, gloymast og skrivast burtur úr føroyskari søgu. – Hetta er tann skendska republikanska dagsskráin. – Teir vilja heldur gráta um eina banala fólkaatkvøðu við sera lítlari valluttøku og dubiøsum úrsliti, enn teir vilja minnast eitt vitleyst álop á okkara løgting og demokrati. Hvar er tann republikanski logikkurin?" (Dalsgaard 2017).

Politiski boðskapurin er týðiligur, og alt er heldur ikki heilt rætt. Sambært Peturi Mohr Dam vóru hann og tríggir aðrir javnaðarmenn um midnáttina, t.e. ein tíma frammanundan, farnir úr løgtinginum í felag, og teir høvdu ongar ætlanir um at koma aftur, sum teksturin tykist leggja upp til. Teir vóru allir fýra, eftir at tríggir fyrst høvdu spákað runt í Havnini, farnir heim og vóru í ella á veg í song, tá ið bumban brast umleið ein tíma seinni. Petur Mohr Dam visti ikki, at ein bumba varð brostin við løgtingshúsið fyrr enn dagin eftir, tá ið hann fór út. Bumbumaðurin má eisini, um hann var uttanfyri løgtingið stutt áðrenn bumban brast, hava vitað, at eingin var inni í løgtinginum, tá ið bumban brast hesa myrku heystnáttina í 1945. Heldur ikki hevur nakar roynt at burturkveistra minnið um hesa bumbuatsóknina, sum ongantíð varð uppklárað. Og fólkaatkvøðan 14. september í 1946, har valluttøkan var tann størsta, sum hevur verið á nakrari fólkaatkvøðu í Føroyum, 67,5 %, hevur av heilt eyðsýndum grundum eitt nógv størri pláss í politisku søgu Føroya enn ein bumbuspreinging (uttanfyri eitt tómt løgting), sum stórt sæð onga ávirkan hevur havt á føroyskan politikk og føroysk samfelagsviðurskifti.

Heldur ikki er tað heilt rætt, at „eingin søgubók" hevur umrøtt bumbuspreingingina, sum ofta hevur verið fört fram seinastu árini, eisini heilt nýliga (sí m.a. Dalsgaard 2020), tí hendingin hevur verið umrødd í onkrum søgubókum síðan í øllum førum 1999 (sí m.a. Madsen 1999, 214 og Sølvará 2016, 142). Bumbuspreingingin við løgtingshúsið hevur ongantíð verið gloymd, men keldutilfarið hevur til fyri nýliga verið óatkomiligt. Tað man vera ein høvuðsgrund til, at hendan hendingin í 1945 ikki hevur fingið nakra søgufakliga viðgerð.

Ein eyðsýnd frágreiðing til vantandi umrøðuna og viðgerðina seinni tykist vera, at fútin/løgreglan ongantíð avdúkaði, hvør ella hvørji stóðu aftanfyri bumbuspreingingina. Og hóast løgreglan gjørdi nógvar kanningar og forhoyr í sambandi við málið, so hevur tilfarið ikki verið atkomuligt. Tað hevur tí ikki verið so nógv (nýtt) at skriva um. Og tað hevur ikki fyrr enn nýliga verið møguligt at fáa atgongd til keldutilfarið hjá løgregluni.

Ein onnur orsøk er óivað, at bumbuspreingingin við løgtingið ikki hevur havt so stóran týdning fyri politisku søgu Føroya, sum onnur nógv umrødd og viðgjørd politisk fyribrigdi í Føroya søgu, t.d. fólkaatkvøðan í 1946 og læknastríðið í 1952-1956 – fyri at nevna

onkur dømi at samanbera við. Meðan atsóknin við løgtingshúsið hevur sett fá spor eftir seg í politisku søgu Føroya, – í tí veruligu søguni eins og varðveittu søguni – so hevur fólkaatkvøðan í 1946, sum flest allir føroyingar máttu fyrihalda seg til í samtíðini, harumframt havt týðandi ávirkan á tað føroyska samfelagið og á veruligan føroyskan politikk. Fyrst og fremst eru Heimastýrislógin og Tjóðveldisflokkurin, sum var seinasta liðið í politisku skipanini í Føroyum undir heimastýrisskipanini við fýra stórum flokkum, ein avleiðing av fólkaatkvøðuni, meðan bumban við løgtingshúsið var ein einstøk hending, sum mest sannlíkt lítlan týdning hevur havt fyri tað føroyska samfelagið og fyri veruligan føroyskan politikk.

Samanberingin tykist vera tann sama, um vit seta atsóknina móti tinghúsinum í samband við læknastríðið í 1952-1956, sum ávirkaði føroyskan politikk eins og viðurskiftini millum Danmark og Føroyar í fleiri áratíggju aftaná – í veruleikanum síggja vit framvegis stóra ávirkan frá læknastríðinum. Harafturat kemur, at meðan bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum eftir øllum at dømá var ein einstøk hending, sum politiska skipanin í Føroyum allarhelst lítlan – ella ongan – leiklut hevði í, so snúðu fólkaatkvøðan í 1946 og læknastríðið í 1952-1956 seg um nakrar grundleggjandi samfelagsligar rembingar, sum eisini øll tann politiska skipanin var ein partur av. Tað ber kanska til at siga, at bumban við løgtingshúsið – um sæð verður burtur frá, at eingin var inni í løgtingshúsinum, tá ið bumban brast – kann samanberast við bumbuspreingingina við løgreglustøðina í Klaksvík í 1955, tá ið fýra løgreglufólk inni í húsinum fingu skaða, sum eisini var ein einstøk atsókn undir læknastríðnum. Á sama hátt var bumbuatsóknin við løgtingshúsið einstøk hending í árunum eftir kríggið, tá ið tær stóru politisku ósemjurnar um framtíð Føroya, og spenningurin yvirhøvur í Føroyum, var í hæddini. Í báðum førum var óivað talan um einstaklingar, sum í eini spentari støðu framdu nakað rættiliga víðgongt, sum neyvan hevði nakra undirtøku innan politisku skipanina í Føroyum ella millum fólk í Føroyum yvirhøvur. Í hvørgum føri umboðaðu fólkini aftanfyri atsóknirnar grundleggjandi

Havnará millum kommunuskúlan og løgtingið.

rembingar í føroyska samfelagnum, og í hvørgum føri var talan um hendingar, sum fingu varandi týdning fyri føroyskan politikk og samfelag.

Tað ger á ongan hátt illgerðirnar minni, men tá metast skal um, hvønn týdning tær hava, er tað umráðandi, at tær verða settar inn í rætta samanhangin, sum ofta er meira avgerandi og týðandi enn sjálvar gerðirnar.

Fólkaatkvøðan í 1946 hevur leingi havt eitt fast pláss í varðveittu politisku søgu Føroya, meðan læknastríðið ikki fyrr enn nýliga hevur

fingið fast pláss í varðveittu søguni, sum samsvarar við ta ávirkan og tann týdning, sum tað í veruleikanum hevur. Bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum í september 1945 hevur valla havt tað plássið í varðveittu føroysku søguni, sum hon átti at havt, men óivað eru tvær av grundunum til hetta, 1) at atsóknin ikki hevur sett nøkur varandi spor eftir seg í føroyskum politikki ella í føroyska samfelagnum, og 2) at atsóknin í veruleikanum – ikki bert í varðveittu søguni – hevur verið „duld" fyri øllum, uttan fyri tey, sum gita og kunnu koma at skapa mytur. Bumbuatsóknin í 1945 hevur sjálvandi einans verið „duld" í tí týdningi, 1) at sjálvt løgreglumálið ongantíð varð uppklárað, og 2) at skjølini, sum vóru framleidd í sambandi við løgreglumálið, hava verið hildin loynilig, men sjálv hendingin hevur ongantíð verið duld, og hon hevur heldur ongantíð verið hildin loynilig fyri nøkrum. Tílík óloyst mál eru sjálv ráevnini, sum seiglívaðar politiskar mytur, uttan neyðug skjøl, kunnu verða skaptar burturúr.

Ein triðja orsøk er, at í einum lítlum samfelag, har nógv hava tøtt familjubond ella kenna hvønn annan, kann tað vera persónliga – ikki endiliga politiskt – trupult at tosa um eym og óloyst løgreglumál sum her. Heldur ikki offur fyri tílíkum atsóknum eru sinnað at umrøða ella avdúka tílík eym mál, sum søgan um Petur Mohr Dam, sum onkrar keldur upplýsa var málið við atsóknini, vísir. Eins og við læknastríðnum, sum eisini fevndi um nøkur fyri løgregluna duld (t.e. óloyst) bumbumál, skal tíð til fyri at mál eru búgvin at koma fram í ljósið.

Tað er kanska ikki heilt so óskiljandi, at hetta málið hevur fingið lítla søgufakliga viðgerð í Føroyum, meðan tað er lættari at skilja, at tað hevur verið gitt nógv um hetta málið í politiskum samanhangi.

Tað verður ofta sagt, at betur er at vita enn at gita, men tá fólk lítið fáa at vita, so fara tey ofta at gita.

Einki í tilfarinum bendir á, at nøkur stór samansvørjing lá aftan fyri bumbuspreingingina við løgtingshúsið. Eisini frásøgnin um eitt seinni samband millum bumbumannin, sum lá til at doyggja, og Petur Mohr Dam, bendir á, at talan var um ein einstakling, sum framdi og seinni viðurkendi gerðina – áðrenn november 1968. Tað er ikki óhugsandi, at bumbumaðurin eigur at finnast í umhvørvinum av víðgongdum loysingarsinnaðum føroyingum á høgra- ella vinstravonginum, sum vóru hart ímóti, at ein (lítil) meiriluti í løgtinginum, uttan at fólkið fyrst varð spurt, avgjørdi, at føroyingar aftur skuldu fara at brúka ta donsku krónuna og tað danska krónuvirðið. Tað var í øllum førum tann politiska myndin, sum ávísar kreftir (í Føroyum) longu í september 1945 royndu at mála av bumbuatsóknini móti løgtingshúsinum, tá ið lagt varð upp til, at ónøgdir partar av føroysku sjálvstýrisrørsluni, við tí endamáli at vinna atkvøður á komandi løgtingsvalinum í november 1945, høvdu skipað fyri bumbuatsóknini. Tað er hinvegin ikki so líka til at skilja, hvussu ein tílík bumbuatsókn móti løgtingshúsinum kundi havt gagnað sjálvstýrisrørsluni í Føroyum til løgtingsvalið í november 1945, sum varð útskrivað 17. september, dagin fyri atsóknina móti løgtingshúsinum. Tvørturímóti tykist tað meira sannlíkt, at bumbuatsóknin við løgtingshúsið í veruleikanum kom sjálvstýris- og loysingarrørsluni í Føroyum rættiliga illa við, og at bumbuatsóknin ímóti løgtingshúsinum í veruleikanum kundi gagna Sambandsflokkunum til tað rættiliga avgerandi løgtingsvalið 6. november 1945. Fólkaflokkurin manglaði undan hesum avgerandi løgtingsvalinum í 1945 einans eitt løgtingsumboð fyri einsamallur at hava meirilutan í løgtinginum, og tað eydnaðist heldur ikki flokkinum í november 1945 at fáa reinan meiriluta í løgtinginum – flokkurin manglaði framvegis eitt umboð. Tað ber neyvan til at siga nakað um, at bumbuatsóknin ímóti løgtingshúsinum hevði nakran avgerandi týdning fyri úrslitið av løgtingsvalinum í november 1945, men tað tykist greitt, at hevði Fólkaflokkurin fingið ein avgjørdan meiriluta í løgtinginum, so høvdu samráðingarnar millum føroyingar og danir í 1946 verið nakað øðrvísi enn tær blivu. Leita vit eftir einum størri politiskum leikluti til hesa óloystu bumbuspreingingina í politisku søgu Føroya, so er tann møguliga ávirkanin, sum hon hevði á løgtingsvalið 6. november 1945, kanska eitt møguligt stað at leita. Heldur ikki hetta er nakrantíð kannað í føroyskari søgu.

Í hesum sambandi kundi bumbuatsóknin skaða møguleikarnar

hjá Fólkaflokkinum upp undir løgtingsvalið. Tað er áhugavert, at meðan tær flestu seinnu frásagnirnar tykjast gita, at sjálvstýris- ella loysingarfólk stóðu aftanfyri, so tykjast longu í samtíðini eisini aðrar søgur hava verið fortaldar. Bjarni Wilhelm, sum er sonur løgreglumannin Thomas Wilhelm, sum saman við Jacob Andreas Arge gekk tætt framvið løgtinginum, tá ið bumban brast 18. september 1945, sigur frá, at sambært pápa sínum høvdu løgreglufólkini illgruna til heilt onnur fólk (Wilhelm 2022). Sambært Bjarna Wilhelm høvdu Thomas Wilhelm og onnur løgreglufólk illgruna til Magnus Andreas Samuelsen, sum var spreingikønur og hildin at vera sambandsmaður. Og endamálið við bumbuatsóknini skuldi havt verið at skapa ruðuleika í sjálvstýrisrørsluni. Hendan søgan tykist ikki hava sín uppruna millum sjálvstýris- ella loysingarfólk, men – sambært Bjarna Wilhelm – millum sambandsfólk.

Hetta er tó valla ein frásøgn, sum vit eiga hava fult álit á, tí talan var bert um ein illgruna, ið løgreglufólkini høvdu (einki prógv var fyri hesum), men tað er áhugavert, at hesin illgrunin eftir øllum at døma eisini hevur verið orðaður í samtíðini, í 1945. Tað tykist eisini vera avbjóðandi at fáa hendan illgrunan til at samsvara við frásøgnina hjá Bergi P. Dam um, at bumbumaðurin hevði ætlað sær at rakt Petur Mohr Dam, og at hann tí seinni á deyðastrá setti seg í samband við Petur Mohr Dam fyri at fáa fyrigeving. Tað verður bara uppaftur torførari at greiða frá hesum, um ætlanin ongantíð hevði verið nøkur onnur enn at skapa stóran ruðuleika í *loysingarrørsluni*, t.e. tað øvugta av at raka Petur Mohr Dam, fýra javnaðarmenn ella kanska bert politiskt at raka allan sambands- og javnaðarmeirilutan í løgtinginum, ið sambært samtíðarkeldunum tykist sannlíkari. Serliga torført verður tað, tá vit vita, at bumban heldur ikki sprongdist nærhendis har, sum Petur Mohr Dam var staddur. Tað ber illa til at fáa hetta at hanga saman, uttan so, at vit vraka meginpartin av tí, sum Petur Mohr Dam seinni fortaldi fyri Bergi P. Dam. Ein bumbumaður, sum hevði sambandshugsanir, kundi sjálvandi eisini fingið ringa samvitsku, um hann seinni gjørdist varugur við, at hann kundi verið so óheppin, at rakt ein samríkjamann, – Petur Mohr Dam – men tað er ósannlíkt, at hann so skuldi havt fortalt Peturi Mohr Dam, at bumban var ætlað honum, um upprunaliga ætlanin einans var at skapa stóran ruðuleika í loysingarrørsluna. Tá tykist søgan hóast alt sannlíkari, um bumbumaðurin við bumbuni upprunaliga hevði ætlað at mótmæla tí politisku ætlan, sum Petur Mohr Dam og løgtingsmeirilutin virkaðu fyri í 1945. Harafturat kemur, at einki í frágreiðingini hjá Magnusi Andreas Samuelsen bendir á, at løgreglufólkini høvdu nakran illgruna til hann. Hinvegin kann tað ikki útihýsast, at ein grund til, at Petur Mohr Dam, ein samríkjamaður, ikki vildi avdúka bumbumannin var, at hann vildi verja ein angrandi samríkjamann. Í veruleikanum gevur hendan tulkingin av akkurát hesum spurninginum helst betri meining enn, at Petur Mohr Dam við at sýta fyri at avdúka navnið á bumbumanninum fyri nøkrum vildi verja ein angrandi loysingarmann.

Tað stutta av tí langa er, at vit kenna ikki motivini hjá bumbumanninum, og samtíðarkeldurnar geva okkum heldur ikki nakrar upplýsingar um, hvør bumbumaðurin var. Samtíðarkeldurnar tykjast hinvegin leggja upp til, at bumbumaðurin valla hevði nøkur ávís fólk í hyggju, tá hann legði og sprongdi bumbuna við løgtingið. Tað sannlíkasta tykist vera, at bumbuatsóknin varð vend móti løgtingsmeirilutanum. Sæð í hesum høpi er illgrunin til ein, sum kanska einans vildi skapa politiskan ruðuleika, kanska heldur ikki fullkomiliga ósannlíkur, men nakra samtíðarkeldu, sum gevur okkum orsøk til at mistonkja m.a. Magnus Andreas Samuelsen, hava vit ikki.

Tí mugu vit meta henda illgruna um eina sambandsráðagerð vera ivasama, og bert gera vart við, at atsóknin neyvan gagnaði sjálvstýrisrørsluni upp undir valið í november 1945. Tá hesin illgrunin kortini verður festur á blað her, so eru grundirnar, 1) at hesin illgrunin leggur ein nýggjan tulkingarmøguleika á bumbuatsóknina, sum ongantíð varð loyst, 2) at eg eisini havi hoyrt hendan illgruna frá øðrum fólki, sum vilja vera ónevnd, 3) at illgrunin í hesum førinum er líka tætt at løgreglufólkunum, sum frásøgnin hjá Bergi P. Dam er at Peturi Mohr Dam (faðir og sonur), 4) at hóast illgrunin er ósannlíkur og

– eins og seinni frásøgnin um Petur Mohr Dam og bumbumannin – ikki grundaður á nakra skrivliga samtíðarkeldu, so er hann ikki heilt ómøguligur, 5) at tað er ilt at síggja, hvussu bumbuatsóknin kundi hjálpt loysingarrørsluni til løgtingsvalið í november 1945 og 6) at líknandi óváttaðir illgrunar um fleiri onnur fólk, t.d. um Marius Ziska, eru orðaðir í keldutilfarinum.

Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hildu eisini framman undan valinum 1945, at bumbumálið kundi skaða flokkarnar til løgtingsvalið. Løgfrøðingar, sum umboðaðu báðar sjálvstýrisflokkarnar, vendu sær til fútan við málinum og upplýstu, at flokkarnir kendu seg „injurierede“ av nøkrum útsøgnum í svenskum bløðum um, at misnøgdir partar av sjálvstýrisflokkunum stóðu aftan fyri atsóknina á tinghúsið. Flokkarnir ætlaðu at leggja eina „Injuriesag“ fyri rættin, og vildu hava fútan at hjálpa teimum við at finna fram til, hvørji stóðu aftanfyri. Fútin skrivaði 26. september til sýslumannin: „De paagældende var – forståeligt – bange for, at Attentatet vilde blive brugt som Agitationsstof mod Selvstyrepartierne ved det kommende Valg.“ Hetta tykist benda á, at Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin óttaðust fyri, at bumbumálið kundi skaða flokkarnar til løgtingsvalið.

Ein leyslig gjøgnumgongd av heitunum á greinum í føroysku bløðunum tykist kortini ikki benda á, at nógv varð gjørt burturúr hesum málinum í bløðunum og minni í sambandi við løgtingsvalið 6. november 1945. Frá 19. september 1945 og árið út havi eg talt 15 greinar ella smástubbar í teimum stóru føroysku bløðunum: eina í *Tingakrossi*, tríggjar í *Dagblaðnum*, seks í *Tímanum*, eina í *Føroya Sosialdemokrati*, tríggjar í *Dimmalætting* og eina í *Føroyatíðindi*, allar í tíðarskeiðinum frá 19. september til 11. oktober, tær tólv í september. Bløðini gjørdu sostatt nakað við hetta málið í byrjanini, men áhugin fyri tí minkaði skjótt, og málið gjørdist ongantíð ein partur av løgtingsvalinum 6. november. Tað vóru onnur mál, m.a. krónuvirðið, sum bløðini skrivaðu um.

Sambandsblaðið *Føroyatíðindi* helt, at atsóknin móti løgtingshúsinum ikki var annað enn „En Gadedrenge-Streg i Kæmpeformat“

Bringumyndin av Christian X stendur á eini hyll omanfyri formansstólin. Tað gjørdi hon eisini eftir atsóknina.

(*Føroyatíðindi* 22.9.1945). Blaðið gjørdi onga roynd uppá at geva nøkrum politiskum vongi skyldina, men blaðið helt, at allir flokkar áttu at hildið seg vera ov góðar til „at slaa politisk Mønt af … pludselige Stemninger, skabt af den Slags skammelige Hændelser“. Sambandsflokkurin fór í øllum førum at brúka orkuna uppá at fremja meira umráðandi politisk mál og lata løgregluna um at uppklára bumbumálið.

Helst hevði Buhlsbrævið, sum varð prentað í føroysku bløðunum seinast í oktober 1945, har danska stjórnin hjá Vilhelm Buhl gav føroyingum lyfti um økta tjóðskaparliga viðurkenning og peningaligan stuðul, um teir valdu eina loysn innanfyri ríkið, størri ávirkan á valið 6. november 1945, enn bumbuatsóknin 18. september.

Tað er ikki fyrr enn nýliga, at hetta bumbumál, sum ongantíð varð uppklárað og hevði lítla politiska ávirkan í samtíðini, er vorðið partur av politiskum kjaki millum ávís sambands- og loysingarfólk. Tað er kortini framvegis soleiðis, at hetta mál – bæði í tí veruligu og í tí varðveittu søguni – hevur havt lítla ávirkan.

Heldur ikki politiska stríðið í løgtinginum um krónuvirðið í august 1945, sum tykist vera ein partur av spentu støðuni aftan fyri atsóknina móti løgtingshúsinum, tykist hava havt ávirkan á framtíðar viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Krónuvirðið kom at vera soleiðis, sum tingið í august 1945 samtykti, at tað skuldi vera.

Tað var rætt, sum báðir sambandsflokkarnir í Føroyum søgdu í 1945, at føroyska keypikraftin vaks við 15 % orsakað av uppskrivingini av krónuni í mun til bretska pundið, men tað var samstundis ein sannroynd, at við uppskrivingini av krónuni varð føroyski feskfiskaútflutningurin á stóra bretska fiskamarknaðin ikki longur so gevandi, og støðan í hesum førinum gjørdist áleið tann sama sum áðrenn kríggið. Í 1948 fingu føroyingar – í kjalarvørrinum á fólkaatkvøðuni í 1946 – heimastýrislógina, og sama árið fóru oyggjarnar endaliga burtur úr sterlingblokkinum. Tað hoyrir eisini við til søguna, at í 1948 ynsktu føroyingar, stuðlaðir av dønum, at vera verandi í sterlingblokkinum, men tað vildu bretar ikki góðtaka (Hansen 2006, 38). Harvið vóru ríkisrættarligu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar aftur komin í trygga legu, og Føroyar á veg ímóti nýggjari kreppu.

Føroyar høvdu fingið heimastýri við nógv øktum politiskum og fíggjarligum sjálvstýri við danskari krónu (tó við føroyskum ímyndum), og fullveldisrembingarnar í kjalarvørrinum av krígnum fánaðu sum frá leið burtur.

Aftaná rembingarnar eftir kríggið var danska krúnan – eins og í løgtinginum í 1945 – enn óskalað í Føroyum.

NIÐURSTØÐA OG PERSPEKTIV

Bumbuatsóknin móti løgtingshúsinum 18. september 1945 hendi móti endanum á einum tíðarskeiði, har spenningurin í føroyskum politikki millum tey, sum vildu hava, at Føroyar skuldu vera verandi saman við Danmark, og tey, sum vildu, at Føroyar skuldu gerast sjálvstøðugar, gjørdist javnari og spentari. Meðan heimskríggið leikaði á, hevði Danmark verið hersett av Týsklandi, meðan Føroyar høvdu verið hersettar av Bretlandi. Krígsárini í 1940-1945 mentust Føroyar nógv politiskt og búskaparliga í samstarvi við Bretland, sum Føroyar eisini vóru í gjaldoyrasamstarvi við. Tað var ein grund til, at Fólkaflokkurin, sum í veruleikanum ynskti føroyskt fullveldi, fekk eitt kanónval í 1943 og einans manglaði eitt løgtingsumboð í at hava meiriluta einsamallur í løgtinginum. Tá hevði amtmaðurin – í 1942 – longu givið føroyingum eitt lyfti um, at hann eftir kríggið fór at boða stjórnini frá, at hann meinti, at føroyingar áttu at vera tiknir við upp á ráð, tá ið framtíðar viðurskiftini millum bæði londini skuldu viðgerast. Eftir samráðingar við donsku stjórnina eftir løgtingsvalið í november 1945 gjørdist avleiðingin, at føroyingar á eini fólkaatkvøðu

14. september 1946, við einum lítlum meiriluta, atkvøddu fyri loysing frá Danmark. Úrslitið gjørdist tó ikki loysing, men heimastýrislógin frá 1948.

Í sambandi við evnið í hesi bók er tað serliga politisku hendingarnar á heysti í 1945, sum eru áhugaverdar.

Spenningurin kom í hæddina í september 1945, tá ið løgtingið, áðrenn løgtingsval hevði verið, fór undir at viðgera eitt uppskot frá donsku stjórnini um, at føroyska krónan aftur skuldi hava sama virði sum danska krónan. Fólkaflokkurin rýmdi úr løgtinginum og boðaði frá, at flokkurin fór ikki at vera við til at viðgera hetta málið, fyrr enn føroyingar á løgtingsvali høvdu havt høvi til at siga sína hugsan um spurningin. Spenningurin var so stórur, at onkur umhugsaðu at „burturflyta" ein javnaðartingmann fyri at forða fyri, at løgtingið kundi samtykkja uppskotið, men hendan royndin miseydnaðist. Løgtingið samtykti 7. september við atkvøðunum hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, at føroyska og danska krónan aftur skuldu hava sama virði.

Tíggju dagar seinni brast ein bumba við løgtingshúsið, sum hevði stóran materiellan skaða við sær – bæði á løgtingshúsið og á hús í nærumhvørvinum. Tíbetur hendi eingin fólkaskaði. Fýra fólk úr Javnaðarflokkinum høvdu verið á fundi í løgtinginum um kvøldið, men vóru farin avstað umleið ein tíma áðrenn bumban brast.

Illgrunin fall skjótt á ávís fólk í tí víðgongda partinum av loysingarrørsluni, og tað er kanska eisini hugsandi, at bumbu*maðurin* – ein ella fleiri – kom/u úr tí víðgongda loysingarumhvørvinum. Hinvegin er tað ósannlíkt, at loysingar*rørslan* kundi fáa nakran fyrimun av bumbuspreingingini. Tað er heldur ikki nógv, sum bendir á, at talan var um skipaða politiska atsókn móti tinghúsinum. Kanningararbeiðið hjá fútanum hevði einstaklingar í miðdeplinum, og lítið bendir á, at hendan atsóknin hevði støði í gerðum hjá øðrum enn einstaklingum. Tað vóru mest ungfólk, sum løgreglan hevði illgruna til, men okkurt kundi bent á, at bumbumaðurin var komin nakað til árs. Ein seinni varðveitt søga um ein angrandi bumbumann og

Petur Mohr Dam kundi bent á tað. Í endurminningum sínum nevnir Kristian Djurhuus bert eldri menn millum tey, sum hann hevði illgruna til.

Kanningararbeiðið hjá løgregluni gav eingi úrslit. Tey, sum vóru undir illgruna, høvdu øll fráveruprógv, sum vardu tey móti skuldsetingum. Eisini Ziska fólkini, sum hoyrdu til vinstrahalla loysingarvongin kring *Fríu Føroyar*, og sum komu undir illgruna hjá løgregluni, høvdu fráveruprógv í sambandi við bumbuspreingingina.

Her skulu nøkur viðurskifti takast fram. Um bumban sprongdist umleið klokkan 00.55, so kunnu vit ganga út frá, at bumbumaðurin hevur verið á staðnum umleið 10 minuttir frammanundan, t.e. umleið klokkan 00.45. Kanska var bumban við løgtingið longu klár at spreingja. Um hann eisini skuldi leggja bumbuna á staðið og gera alt klárt, so hevur helst verið neyðugt við meira tíð. Tað ber illa til við vissu at siga, um bumbumaðurin brúkti elektriska tendring ella vanligt fjús til at seta eld á spreingievnið við, men við støði í tí, sum løgreglan fann á bumbustaðnum uttanfyri løgtingshúsið, tykist tað sannlíkasta vera, at hann brúkti vanligt fjús. Hevur hann brúkt vanligt fjús, so hevur hann óivað havt uppaftur styttri tíð enn teir 10 minuttirnar til spreinging. Ella eisini hevur hann verið á staðnum meira enn 10 minuttir áðrenn bumban brast. Tíðarinnstillaður spreingiblýantur kann kortini ikki heilt útihýsast, men tað er rættiliga ósannlíkt.

Tey flestu, sum vóru undir illgruna hjá løgregluni, høvdu eitt fráveruprógv, sum gjørdi tað trupult at prógva, at tey skuldu havt verið við løgtingshúsið umleið klokkan 00.45 og fest í eina bumbu, soleiðis at hon kundi bresta klokkan 00.55. Fleiri av fráveruprógvunum, m.a. fráveruprógvið hjá Preben Ziska, eru hinvegin ikki altíð í samsvar við upplýsingar hjá øllum at síggja til álítandi vitnum. Tað eydnaðist ikki løgregluni at avdúka tílík brek og óvissur í fráveruprógvunum, soleiðis at tey, sum vóru undir illgruna, annaðhvørt kundu verið fríkend, skuldsett ella dømd. Løgfrøðiliga sæð vórðu øll sjálvandi fríkend, tá ið eingin varð skuldsettur, men tann sosiali veruleikin er ofta eitt sindur meira fjølbroyttur enn sum so. Tað eydnaðist ikki

fútanum og løgregluni at finna fram til, hvør av Ziska brøðrunum tað var, sum fylgdi aftaná Peturi Mohr Dam nakrar fáar dagar áðrenn atsóknina, men tað eydnaðist seinni at fáa Petur Mohr Dam til at vátta frásøgnina. Heldur ikki eydnaðist løgregluni at finna fram til, hvør tað mundi vera, sum fyrst í august í 1945 hevði ognað sær eina „Tænddynamo“, ið kundi havt verið brúkt til at spreingja bumbuna við. Tað eydnaðist heldur ikki løgregluni at finna tann ókenda mannin, sum Jona Henriksen hevði tosað við beint eftir bumbuspreingingina. Tað átti, sum sýslumaðurin mótvegis fútanum hevði víst á, at borið til at sóknast eftir tí ókenda manninum, sum Jona Henriksen lýsti sum „lille og spinkel, iført mørk Jakkesæt og en stribet Trøje“. Fútin eftirlýsti seinni mannin soleiðis sum Jona Henriksen hevði lýst hann, men maðurin vendi sær sambært keldutilfarinum ikki til løgregluna. Tá tað ongantíð eydnaðist løgregluni at finna eitt líkinda svar uppá tílíkar umráðandi spurningar og ivamál, so gjørdist úrslitið, at eingin nakrantíð varð skuldsettur ella dømdur, men illgrunin hongur framvegis yvir fleiri.

Tað er við støði í tílíkum óloystum spurningum, at seiglívaðar politiskar mytologiir kunnu verða skaptar.

Um sæð verður burtur frá, at nógv hevur verið gitt um, hvør stóð aftan fyri hesa bumbuspreinging, so ber til at siga, at atsóknin valla hevur sett avgerandi spor eftir seg í politisku søgu Føroya – hvørki í ta veruligu ella í ta varðveittu. Hóast stóri samanhangurin var tað turbulenta tíðarskeiðið í føroyskum politikki í árunum eftir seinna heimskríggj, sum førdi til fólkaatkvøðuna í 1946, so hevur bumbuspreingingin í sjálvum sær ikki sett nøkur líknandi spor eftir seg sum fólkaatkvøðan í 1946 – um sæð verður burtur frá politisku gitingunum. Meðan fólkaatkvøðan í 1946 fekk rættiliga avgerandi ávirkan og týdning fyri veruligan føroyskan politikk og samfelagsviðurskifti, heimastýrislógin og Tjóðveldisflokkurin eru helst tey mest avgerandi, so fekk bumban lítlan týdning og stórt sæð onga ávirkan – hvørki í samtíðini ella í eftirtíðini. Í veruleikanum fekk hon so lítlan týdning, at

Løgtingshúsið og Niels Finsens gøta.

hon nærum hevur verið gloymd, meðan hon síðan hevur verið hildin á lívi við politiskum gitingum.

Fólkaatkvøðan í 1946 er eisini umgyrd av politiskum gitingum, men hon er so nógv annað enn tað.

Tað merkir sjálvandi ikki, at bumban við løgtingshúsið ikki eigur at verða tikin í stórum álvara sum ein dapur partur av politisku søgu Føroya – tað eigur hon sjálvandi. Nógv bendir eisini á, at hon kom sjálvstýrisrørsluni illa við stutt áðrenn løgtingsvalið 6. november 1945, men lítið bendir á, at atsóknin varð brúkt í valstríðnum.

Tað er í sjálvum sær sera álvarsamt at spreingja eina bumbu uttanfyri eitt fólkavalt parlamentshús. Tað er ikki minni álvarsamt, um

Inni á løgreglustøðini í Klaksvík eftir bumbuspreingingina í november 1955.

ætlanin var at gera seg inn á fólkavaldar politikarar. Men hetta vita vit ikki fyri vist.

Um bumbumaðurin doyði áðrenn 8. november 1968, soleiðis sum Petur Mohr Dam upplýsti fyri Bergur P. Dam áðrenn hann doyði 8. november 1968, so kann eingin av Ziska brøðrunum hava verið bumbumaðurin, sum við síni bumbuatsókn møguliga kundi havt eina ætlan um at skaða okkurt ella onkur fólk í løgtinginum. Keldutilfarið og samanhangurin benda kortini ikki á, at ætlanin hjá bumbumanninum var at skaða nakran. Løgtingshúsið hevði staðið tómt og myrkt í umleið ein tíma, áðrenn bumban brast har hesa myrku náttina.

Tað kunnu vit hinvegin ganga út frá, at ætlanin var – t.e. at skaða onkran – í november 1955, tá ið ein ungur maður legði eina líknandi bumbu við ta upplýstu løgreglustøðina í Klaksvík, har fýra donsk

løgreglufólk vóru inni. Hendan bumbuspreingingin hevði eins og tann við løgtingið í september 1945 stóran materiellan skaða við sær. Tíbetur fingu løgreglumenninir inni á løgreglustøðini bert smáar snuddir av spreingingini. Men eins og bumban við løgtingshúsið, so var bumban við løgreglustøðina ein einstøk hending í samtíðini, sum valla fekk stórvegis ávirkan á føroyska samfelagið og føroyskan politikk í tíðini aftaná. Saman við atsóknum móti øðrum bygningum í Klaksvík í 1950-unum, skotroynd móti Kristiani Djurhuus, sum tá var Føroya løgmaður, á Tvøroyri í 1955 (Sølvará 2013, 30-31) og eina skot- og morðroynd móti Atla P. Dam (1932-2005), løgmanni, á ólavsøku 1974 (*Dimmalætting* 1. august 1974), skrivar atsóknin móti tinghúsinum 18. september í 1945 seg kortini – sum tann fyrsta – inn í eina rød av ógvusligum atsóknum í politisku søgu Føroya síðan kríggið.

Allar hendingar hava ein ávísan týdning, serliga í samtíðini, men skal talan vera um avgerandi hendingar við politiskt-søguligum týdningi, so má eisini vera talan um størri rembingar, sum hava avgerandi samfelagsliga og politiska ávirkan á politikk og samfelagsviðurskifti í eftirtíðini. Bumban í 1945 er dømi um atsókn, sum hevði ein ávísan týdning í samtíðini, men valla hevur havt nakra serliga ávirkan – t.e. skapt rembingar og broytingar – í eftirtíðini. Fólkaatkvøðan í 1946 er dømi um rembing, – ikki bert hending – sum umframt at hava stóran týdning í samtíðini, fekk avgerandi ávirkan á føroyskan politikk og samfelagsviðurskifti aftaná.

Bumban við løgtingshúsið er partur av myrku síðuni av politisku søgu Føroya, sum ljós eigur at varpast á, men talan er neyvan um eina hending, sum hevur havt nakran avgerandi týdning fyri politisku søgu Føroya.

Men kanska fekk hendingin avleiðingar fyri einstaklingar, sum vóru undir illgruna, m.a. fyri Preben Ziska.

Sambært Jóannesi Nielsen tók hetta málið so hart uppá Preben Ziska, at hann rýmdi av landinum sum ein karakterdripin maður orsakað av tí viðferð, sum hann fekk frá landsins egnu myndugleikum

(*Dimmalætting* 28.01.2010). Kanska hekk hetta eisini saman við, at tíðirnar vóru ringar, og so hevði Preben Ziska eisini eins og aðrir brøður hansara danska konu. Fleiri av Ziska brøðrunum, har uppií Johan Ziska og Palli Ziska, fluttu seinni til Danmarkar. Preben Ziska varð avhoyrdir fleiri ferðir í hesum máli, men tað hekk helst eisini saman við, at hann varð sæddur á gøtuni tætt við løgtingshúsið, stutt áðrenn bumban brast. Løgreglan noyddist sjálvandi at kanna hetta gjølla, serliga tá Preben Ziska vildi vera við, at hann – mest sannlíkt fyri at sleppa sær undan at koma undir størri illgruna – hevði verið heima við hús saman við mammu síni í 35 minuttir, tá bumban brast við løgtingið 18. september 1945 klokkan 00.55. Tað gjørdi helst eisini sítt til, at Preben Ziska yvirhøvur kom undir illgruna í málinum, at hann var sonur gitna loysingarmannin Andrias Ziska. Hetta tykist við støði í keldunum vera tann mest sannlíki mátin at tulka ósamsvarið millum ta objektivu frágreiðingina uppá, nær Preben Ziska kundi vera komin heim (00.45), og hansara subjektivu frágreiðing uppá, nær hann kom heim (00.20), men paradoksalt nokk styrkti hetta óivað einans um illgrunan hjá løgregluni móti honum, hóast tann objektivi samanhangurin í veruleikanum styrkti hansara fráveruprógv.

Her verður ikki funnið fram til, hvør legði bumbuna, men fleiri møguleikar verða mest sannlíkt útihýstir.

FØROYSKUR SAMANDRÁTTUR

Stutt fyri klokkan eitt náttina til 18. september í 1945 brast ein bumba við løgtingshúsið og gjørdi stóran skaða. Bresturin hoyrdist víða um, og rútar brotnaðu í húsum í grannalagnum. Skaði hendi á løgtingshúsið, serliga uttanfyri, og nógvir rútar á vestursíðuni brotnaðu. Eitt hol, 130 sentimetrar í tvørmát og 35 sentimetrar djúpt, var við útnyrðingshornið á tinghúsinum, har bumban brast. Fýra javnaðarfólk høvdu fyrr um kvøldið verið inni í løgtinginum. Tey vóru í húsinum til stutt fyri klokkan 00.00, áleið ein tíma áðrenn bumban sprongdist.

Nakað hevur verið skrivað og gitt um hesa bumbuspreinging, hvør mundi havt lagt bumbuna og við hvørjari grund, men eingin hevur kannað keldutilfarið, sum hendingin hevur lagt eftir seg. Í hesi bókini verður tann søguligi samanhangurin lýstur, keldutilfarið verður kannað, og roynt verður at lýsa hesa hending so gjølla, sum tað ber til, við støði í tí varðveitta keldutilfarinum. Spurdómurin er, um talan var um skipaða politiska atsókn, ella talan var um atsókn hjá einstøkum persóni ella persónum. Í størri samanhangi verður her spurt, hvønn

týdning atsóknin móti tinghúsinum hevur í politisku søgu Føroya. Alment atkomuligt tilfar, føroysk bløð og løgtingstíðindi, verða brúkt til at lýsa politiska samanhangin í Føroyum, meðan føroysku bløðini og tilfar frá løgregluni, sum kannaði hetta mál rættiliga gjølla, verður brúkt til at lýsa tað ítøkiliga bumbumálið.

Niðurstøðan er, at álopið á løgtingshúsið var ein einstøk hending í teimum turbulentu árunum í føroyskum politikki undir og stutt eftir kríggið, sum neyvan hevur sett nøkur varandi spor eftir seg í føroyskum politikki. Bókin avdúkar ikki, hvør ella hvørji løgdu bumbuna, men fleiri høvuðsmistonkt verða mest sannlíkt útihýst.

ENGLISH SUMMARY

Just before 1 am on September 18th, 1945, a bomb exploded outside the Faroese parliament building, and caused a lot of damage. The explosion could be heard around the city, panes smashed at houses in the surroundings, and it caused damage to the parliament, especially outside, and many panes on the western side splintered. A hole, 130 centimetre wide and 35 centimetre deep, was at the north-western corner of the building, where the bomb exploded. Four Social Democrats had earlier, until around 12 pm, – approximately an hour before the bomb exploded – been in the building, where they had a meeting in the party's chamber in the house.

Something has been said and guessed about this explosion, who might have put the bomb there, and with what intention, but no one has analysed the source material that this event has left behind. In this book the historical context will be described, the source material will be examined, and an attempt will be made to describe the event as accurately as possible based on the preserved source material. The question is if it was an organized political attack or if it was an act of

a singular person or persons. In greater context the question is what significance the bomb attack against the parliament building has in the political history of the Faroe Islands. Official material, newspapers, and the parliament records, will be utilized to describe the Faroese political context, while the newspapers and source material from the Police Officer´s Office, who conducted extensive research related to the event, will be used to describe the tangible bomb explosion.

The conclusion is that the attack on the parliament building is an isolated act under the politically turbulent years under and immediately after the war, which hardly had lasting impact on the Faroese political history. The person or persons behind the bomb are not revealed, but some main suspects are most likely excluded.

MYNDAYVIRLIT

Permumynd: Løgtingshúsið 18. september 1945 – tilgjørd mynd, við støði í veruligum myndum og upplýsingum um hendingina.

S. 14. Skjal í savninum hjá Suðuroyar sýslumanni á Tjóðskjalasavninum. Hans Andrias Sølvará
S. 27. Á ólavsøku í 1945. Tjóðsavnið
S. 35. Andrias Ziska. Tjóðsavnið
S. 38. Bretskir hermenn í Tórsgøtu undir krígnum. Tjóðsavnið
S. 41. Føroyskur 10-krónuseðil frá 1940. Hans Andrias Sølvará
S. 46. Føroya-Sosialdemokratur 1945. tidarrit.fo
S. 50. Løgtingssalurin fyrst í 20. øld. Tjóðsavnið
S. 51. Plakat hjá fútanum frá 18. september 1945. tidarrit.fo
S. 53. Tingakrossur 19. september 1945. tidarrit.fo
S. 56. Løgtingshúsið í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 60. Skjal í savninum hjá fútanum á Tjóðskjalasavninum. Hans Andrias Sølvará
S. 64. Tekning yvir miðbýin í Havn frá 1945 í savninum hjá Fútanum á Tjóðskjalasavninum. Hans Andrias Sølvará

S. 67. Skjal í savninum hjá Paula Dahl frá 1945. Hans Andrias Sølvará
S. 71. Sverrisgøta í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 78-79. Kort yvir Havnina frá 1950. Umhvørvisstovan
S. 81. Havnará í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 92. Húsini hjá Arthuri Brend við Kongagøtu fyrst í 20. øld. Tjóðsavnið
S. 97. Havnará fyrst í 20. øld. Tjóðsavnið
S. 109. Á Vaglinum móti Niels Finsens gøtu í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 116. Tingakrossur frá 1945. tidarrit.fo
S. 119. Løgtingshúsið í 1937. Tjóðsavnið
S. 124. Áarvegurin í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 129. Dimmalætting frá 1945. tidarrit.fo
S. 146-147. Eygað frá 1974. Hans Andrias Sølvará
S. 149. Løgtingshúsið í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 150-151. Løgtingshúsið eftir bumbuspreingingina 18. september 1945. Eli Mortensen
S. 156. Skjal í savninum hjá fútanum á Tjóðskjalasavninum. Hans Andrias Sølvará
S. 167. Framsýning á Vísindavøkuni í 2015. Hans Andrias Sølvará
S. 171. Havnará í fyrru helvt á 20. øld. Tjóðsavnið
S. 177. Løgtingssalurin í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 183. Løgtingshúsið og Niels Finsens gøta í fyrru helvt av 20. øld. Tjóðsavnið
S. 184. Inni á løgreglustøðini í Klaksvík eftir bumbuspreingingina í november 1955. Tjóðsavnið

HEIMILDIR

Bókmentir

Andreasen, Anja. *Sambandsflokkurin í 100 ár – tættir úr søgu Sambandsfloksins*. Sambandsflokkurin. Tórshavn 2006.

Andreasen, Anja. *Hølisumstøður løgtingsins*. Løgtingið 150. Bind 2. Løgtingið. Tórshavn 2002.

Dalsgarð, Arnbjørn Ólavson. *Føroysk blaðsøga 1852-2002*. Sprotin. Vestmanna 2002.

Hansen, Jóannes et al. *Løgtingi 150*. Bind 3. Løgtingið. Tórshavn 2003.

Hansen, Jørn Astrup et al. *Føroyar og bankarnir í 100 ár*. Føroya Banki. Tórshavn 2006.

Harder, Kirstin. *De dansk-færøske forhold 1945-48*. Odense Universitetsforlag. Odense 1979.

Jacobsen, Óli. *Kristian Djurhuus. Havnarmaður, sýslumaður, tingmaður. 1895-1940*. Forlagið Tjørnustava 2021.

Johannesen, Birgar. *Havnin – fólk og yrki. 1940-1969*. Egið Forlag. Tórshavn 2008.

Johannesen, Birgar. *Havnin – fólk og yrki. 1900-1939*. Egið forlag. Tórshavn 2007.

Løgtingstíðindi. Vanliga Tingsetan. Løgtingið. Tórshavn 1945.

Madsen, Heini. *Færøernes hvornår skete det*. Skúvanes. Tórshavn 1999.

Mitens, Edward. *Eg minnist. Skrivstovustjóri Løgtingsins*. N.N. Jacobsens Bókahandils Prentsmiðja. Tórshavn 1969.

Mohr, Høgni. *Men hvar er tann nevin sum slær …* Sprotin. Vestmanna 2012.

Müller, Eiden. *Færøerne – en del af Norden*. Egið Forlag. Tórshavn 1983.

Müller, Eiden. *Minnislýsingar*. Egið Forlag. Tórshavn 1981.

Nielsen, Jóannes. *Bommhjarta*. Mentunargrunnur Studentafelagsins, Tórshavn 2016.

Patursson, Sverre. *Móti Loysing*. Tórshavn 1925.

Popper, Karl. *Kritisk Rationalisme. Udvalgte essays om videnskab og samfund*. Arnold Buscks. København 1996.

Skála, Anfinnur í. *Stjórnarskipanarmálið 1946*. Føroya Skúlabókagrunnur. Tórshavn 1992.

Skálagarð, Hjartvard. *Politi í Føroyum fyrr og nú*. Bókadeild Føroya Lærarafelags. Tórshavn 2000.

Sølvará, Hans Andrias. *Da Færøerne stemte for selvstændighed*. Æra. Nr 3. Årgang 1. RÆSON Medier. København 2021

Sølvará, Hans Andrias. *The Rise of Faroese Separatism. Danish-Faroese relations from 1906-1925 and the radicalization of the national- and home rule question*. Fróðskapur. Tórshavn 2016.

Sølvará, Hans Andrias. *Uppreistur í Klaksvík – læknasetanin sum elvdi til uppreistur*. Fróðskaparrit 60. Tórshavn 2013.

Sølvará, Hans Andrias. *Løgtingið 150*. Bind 1. Løgtingið. Tórshavn 2002.

Thorsteinsson, Jákup. *Loysingarpolitikkur í 1940-árunum. Við serligum atliti at virki Erlends Paturssonar*. Fólkatingsgrunnurin. Tórshavn 2014.

Wang, Zakarias. *Fólkaatkvøðan 1946*. Stiðin. Hoyvík 2010.

West, John F. *Faroe. The Emergence of a Nation*. C. Hurst & Company. London. Paul S. Erikson, INC. New York 1972.

Bløð

Dimmalætting
Eygað
Sosialurin
Tingakrossur
Tíðindablaðið
Tímin
14. September

Óprentað

Bombeattentatet mod Lagtingshuset 18/9-1945. E – Mál- og brævaskiftissavn skipað eftir øðrum skipanum. Journalmál – val o.t. 1848-1953. Journalsager (Hovedsageligt vedr. Valg til Rigsdagen), 1849-1918. Lagtinget, 1937–1946. Politimesteren. Suðuroyar Sýsla. Tjóðsavnið. E – LOO13.

Bombeattentatet mod Tinghuset. D – Mál- og brævaskiftissavn skipað eftir høvuðsskipan hjá stovninum. Dr – Journalmál – Revsimál. 40-55, 1945. Forundersøgelse. Efterforskning. Fútin. Tjóðskjalasavnið. Dr – LOO19.

Dahl, Pauli. Skjøl sum liggja millum skjølini eftir Paula Dahl frá 1945 – privat savn fingið frá Paula í Sandagerði í juli 2020.

Djurhuus, Kristian. *Erindringer*. Óprentað handrit, sum er skrivað í árunum frá 1962-1966 og aftaná 1970. Í varðveitslu hjá Høgna Djurhuus.

Heimasíður

Arkivloven 28/09/2016 https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2016/1201

Dalsgaard, Virgar. Grein 18. september 2020. „Terrordagurin 18. september 75 ár". http://www.vp.fo/news/terrordagurin-18-september-75-ar

Dalsgaard, Virgar. Grein 18. september 2017. „18. September. Terror- og skemdardagur Føroya“. http://www.vp.fo/news/18-september-terror-skammardagur-foroya

Dalsgaard, Virgar. Grein 20. november 2016. „Løgtings-bumbudagur“. http://virgardalsgaard.blogspot.com/2016/11/18-september-lgtings-bumbudagur.html

Dalsgaard, Virgar. Grein 23. september 2013. „Mikli skemdardagurin 18. september 1945“. https://www.in.fo/news-detail/mikli-skemdardagurin-18-september-1945

Dalsgaard, Virgar. Grein 19. september 2005. „Átjandi septembur 1945. Terror- og skammardagur Føroya“. https://www.in.fo/news-detail/tjandi-september-1945-terror-og-skammardagur-f-roya

Dalsgaard, Virgar. Grein 15. september 2000. „Eitt 55 ára minni um NÍÐINGSDAGIN MIKLA 18. september 1945“. https://www.in.fo/news-detail/eitt-55-ra-minni-um-n-ingsdagin-mikla-18-september-1945

Dam, Rigmor. Røða 27. apríl 2019. R7 2019. „Røðan hjá Rigmor Dam í sambandi við avdúking av standmynd av Petur Mohr Dam: https://r7.fo/news/16999/rodan-hja-rigmor-dam-i-sambandi-vid-avduking-av-standmynd-av-petur-mohr-dam. Sí eisini her: https://www.j.fo/ti%c3%b0indi-og-greinar/grat-ikki-mamman"

Heimabeiti 2018. Grind. Hagtøl: https://heimabeiti.fo/1926-1950

Samrøður

Bergur P. Dam, 3. november 2021A og 15. november 2021B.

Bjarni Wilhelm, 7. februar 2022.

Marius T. Rein, 24. juli 2022.

Sjónvarp

Fólkaatkvøðan, ið hvarv. KVF 1996.